# Viðmerkingar til uppruna-uppskot til MVG-lóg Løgtingsmál nr. 177/1991

(Løgtingstíðindi 1991, síðurnar 782 – 898)

Løgtingslóg um meirvirðisgjald er annar og seinni partur av stóru broytingini í føroysku toll- og avgjaldsskipanini.

Orsøkin til broytingina í føroysku toll og avgjaldsskipanini er fyrst og fremst handilssáttmálin við EF og nú eisini EFTA, har ið Føroyar hava:

**1)** bundið seg til frá 1. januar 1992 at gera eina tollskipan, ið lýkur GATT skyldurnar hjá Danmark, og sum veitir vørum við uppruna í EF tollfrítøku.

**2)** bundið seg til frá 1. januar 1993 at taka núverandi skipan við fíggjarinnflutningsgjøldum og framleiðslugjøldum av fyri í staðin at gera eina nýggja skipan við óbeinleiðis skattum grundað á:
a) eitt meirvirðisgjald grundað á somu meginreglur sum tær, sum Felagsskapurin tilmælir sínum limalondum, harundir ikki at gera mismun á innfluttum vørum, og
b) eina skipan við nýtslugjaldi, lagt javnt á innlendis framleiðslu og innfluttar vørur.

Til 1 er at siga, at hesin partur varð settur í gildi 1. februar 1992.

Í samband við at nýggj tolllóg varð gjørd, varð neyðugt at gera ymiskar broytingar í innflutningsgjøldunum, soleiðis at hesi komu at fylgja uppbýtingini í toll- og vøruskránni. Serligu og eyka innflutningsgjøldini vórðu tí umløgd til eitt gjald sambært lóg, ið fekk heitið "løgtingslóg um innflutningsgjald".

Henda lóg, ið vanliga fevnir um eitt gjald uppá 33%, ella 6% um tað t.d. er tilfar til fiskivinnuna, fellur við ígildissetanini av meirvirðisgjaldinum burtur.

Annars kann viðmerkjast, at teir trupulleikar, ið tóku seg upp, viðvíkjandi (GATT) tolli av triðja lands vørum, eitt nú vørur frá EFTA londunum, verða loystir, við at fríhandilsavtalurnar við hesi lond væntandi koma uppá pláss á sumri í ár.

Viðvíkjandi 2,a er at siga, at meirvirðislóggávurnar í flest londum í dag líkjast í stóran mun, av tí at meginreglurnar í meirvirðisgjaldinum eru eins.

Meirvirðisgjaldsskipanin snýr seg í stuttum um, at tann, ið selur vørur ella tænastur, ið ikki eru umfevndar av § 2, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini, skal skrásetast hjá tollvaldinum.

Tá ið viðkomandi selur eina vøru ella tænastu, skal meirvirðisgjald uppkrevjast. Verður vøran ella tænastan útflutt, skal einki meirvirðisgjald uppkrevjast. Hinvegin er eisini meirvirðisgjald á vørum, ið virkið hevur keypt ella innflutt.

Við endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði, tey verða 6 um árið, ger virkið upp, hvussu nógv ið er keypt, og hvussu stórur partur av hesum er meirvirðisgjald. Virkið ger eisini upp, hvussu nógv ið er selt, býtt sundur á innanlands sølu og útflutning, og hvussu stórur partur av hesum er meirvirðisgjald. Við at draga tølini frá hvørjum øðrum fæst so at vita, um virkið hevur keypt fyri meir, enn tab hevur selt fyri, ella um tað hevur selt fyri meir, enn tað hevur keypt fyri.

Er meirvirðisgjald á søluni størri enn meirvirðisgjald á keypinum, skal virkið rinda hetta í landskassan. Hinvegin fær virkið meirvirðisgjaldið endurgoldið úr landskassanum, um meirvirðisgjald av keypinum er størri enn meirvirðisgjald av søluni í einum avgjaldstíðarskeiði.

Hetta er vanliga, tá ið eitt virki er undir stovnan, tí tað tá ikki hevur nakra sølu, ella í førum tá ið virkið útflytir alla sína framleiðslu. Í sovorðnum førum uppkrevja tey ikki meirvirðisgjald av søluni og fáa endurgoldið alt tilfakturerað meirvirðisgjald.

Kjarnan í meirvirðisgjaldinum er, at sama avgjald verður uppkravt av einari innfluttari vøru sum av vøru, ið verður framleidd og seld innanlands, tað merkir, at hetta er ein skipan, ið kann nýtast í einari fríhandilsskipan við onnur lond og felagsskapir.

EF hevur síðani 1977 arbeitt við at tillaga meirvirðisgjaldslóggávurnar í sínum limalondum. Tað týdningarmesta direktivið í hesum sambandi er 6. meirvirðisgjaldsdirektiv. Eitt direktiv er bindandi fyri tey einstøku EF londini, men londini kunnu sjálvi gera av, hvussu tey gjøgnumføra tjóðskaparligar lógir, ið eru neyðugar fyri at gjøgnumføra direktivið.

Direktivið ásetir millum annað reglur um, hvat tey einstøku londini kunnu varðveita avgjaldsfrítt, og hvat tey ikki kunnu varðveita avgjaldsfrítt. T.d. er ásett, at søla av fastari ogn kann vera avgjaldsfrí.

Orsøkin til tillagingina er fyrst og fremst, at londini skulu kappast á jøvnum føti, og at tað tí er umráðandi, at tey virka undir somu avgjaldsskipanum. Harnæst rinda EF-londini til ein felags kassa. Gjaldið verður millum annað útroknað eftir meirvirðisgjaldsinntøkunum í teimum einstøku londunum. Tað er tí neyðugt, at útrokningargrundarlagið fyri gjaldinum er eins í øllum limalondum.

Orsakað av at tann innari marknaðurin ikki kann gerast veruligur, fyrr enn avgjaldslóggávan í EF er tillagað, hevur hetta arbeiðið gingið sera skjótt, aftaná at avgjørt varð at gera ein innara marknað, ið skal koma í gildi 1. januar 1993, so at kalla øll lond í EF nú hava somu avgjaldslóggávu. Tó hava nøkur lond fleiri meirvirðisgjaldssatsir, og meirvirðisgjaldssatsirnir eru ikki eins í teimum einstøku limalondunum. Í 1987 samtykti EF Kommissiónin tó, at stig skuldi takast til eisini at tillaga meirvirðisgjaldssatsirnar. 6. meirvirðisgjaldsdirektiv viðger annars ikki henda spurning.

Sambært uppskotinum kunnu londini hava tveir satsir. Ein vanligan sats, ið verður settur

millum 14 % og 20 % og ein reduseraðan sats, ið verður settur millum 4 % og 9 %. Vøruøkið, ið kemur undir tann reduseraða satsin, fevnir t. d. um matvørur, ravmagn, heilivág og bøkur.

Landsstýrisins uppskot til meirvirðisgjald fylgir teirri skipan, ið EF tilmælir sínum limalondum; tó verður skotið upp, at bert ein satsur verður brúktur. Hetta verður meira einfalt at umsita. Ein kompensatión á einstøkum økjum eigur í staðin fyri at nýta fleiri meirvirðisgjaldssatsir, at verða givin á annan hátt. Hetta er eisini tann skipan, sum Ísland, ið setti eins meirvirðisgjaldsskipan á stovn 1. januar 1990, hevur valt.

Annars kann sigast, at meirvirðisgjaldslóggávan í teimum londum, ið ikki eru limir í EF, t.d. í Noregi, Svønki, Íslandi og Finnlandi, líkist meirvirðisgjaldslóggávuni í EF.

Hesi lond tóku eisini stig til at tillaga teirra avgjaldslóggávur í 1987. Hvussu hetta arbeiði verður í framtíðini er ivingarsamt, tí at aftaná at Svøríki og Finnlandi hava søkt um limaskap í EF, verða hesi lond noydd at tillaga teirra skipan sambært galdandi EF reglum.

Tá eru eisini aðrar orsøkir enn handilssáttmálin við EF til, at neyðugt er at broyta óbeinleiðis skattaskipanina. Núgaldandi innflutningsgjaldsskipan, sum meirvirðisgjalds-skipanin kemur í staðin fyri, byggir á lóg um serligt innflutningsgjald frá 1961 og lóg um eyka innflutningsgjald frá 1979. Hesi gjøld vóru sokallað fíggjarinnflutningsgjøld. Tá vil siga, tey vóru áløgd, fyri at landskassin kundi fáa nakrar inntøkur.

Avgjøldini verða bert løgd á vørur, ið verða innfluttar, tað merkir, tænasturnar eru fríar, hvat óbeinleiðis skatti viðvíkur.

Fyri at føroysk framleiðsla kundi kappast við útlendska framleiðslu, varð gjørd ein skip-an, har ið virki, ið innfluttu vørur til framleiðslu, kundu fáa tær innfluttar við einum lægri tolli. Eisini er tilfar til fiskivinnuna í summum førum tollfrítt.

Orsakað av at avgjaldið bert verður kravt av vørum, ið verða innfluttar, hevur avgjalds-grundarlagið verið sera lítið. Tað eru tær somu vørurnar, ið hava goldið avgjaldið. T. d. verða matvørur í dag tollaðar við 33 %, meðan fyri klæði umframt tey 33 % skal rindast 15 % í avgjaldi, soleiðis at samlaða avgjaldið her er 48%.

Harnæst hevur avgjaldið verið uppkravt av fakturaprísinum, soleiðis at virðisgrundarlag-ið, tað ið avgjald skal roknast av, hevur verið sera lítið. Við meirvirðisgjaldsskipanini verður hetta broytt, tí her skal bæði gjaldast meirvirðisgjald fyri innfluttar vørur og tæn-astur. Somuleiðis gongur vinningurin inn í virðisgrundarlagið, ið meirvirðisgjald skal roknast av.

Broytingin í føroysku toll- og avgjaldslóggávuni hevur eisini sum endamál at skapa nakr-ar karmar, sum vinnulívið framyvir skal virka undir. Av tí at føroysk vinna aftaná 1. jan-uar 1993 ikki longur verður vard av einum tollmúri, hevur landsstýrið við hesi lóg lagt dent á at geva føroyskari vinnu somu sømdir, hvat avgjaldi viðvíkur, sum londini rundan um okkum geva teirra vinnulívi.

Tað er útflutningsvinnan, ið kemur at hava størsta fyrimunin av broytingunum.

Fyri tann vanliga brúkaran kemur broytingin í avgjaldsskipanini at merkja, at tænasturnar koma at rinda avgjald. Við broytingini í avgjaldsskipanini koma fleiri at gjalda tað, ið skal í landskassan, soleiðis at avgjaldstrýstið verður spjatt út yvir eitt størri øki.

Harnæst verður insitamentið hjá virkjum at seta prísin niður, t.d. tá ið útsøla er, størri, av tí at meirvirðisgjald verður roknað av søluprísinum.

Av tí at tað altíð er brúkarin, sum í síðsta enda kemur at rinda avgjaldið, verða tað teir brúkarar, ið brúka mest av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, ið koma at rinda mest í avgjaldi.

Soleiðis sum uppskot landsstýrisins er evnað, verður søla av mjólk og øðrum landbúnaðarvørum meirvirðisgjaldsskyldug.

Verða hesar vørur undantiknar meirvirðisgjaldsskylduni, skal innflutningur av hesum vørum eisini verða frítikin fyri meirvirðisgjald.

Landsstyrið heldur tað tí vera rættast at loysa hesar trupulleikar við teimum møguleikum ið eru sambært EF-sáttmálanum.

Til 2,b skal viðmerkjast, at í samband við nýggju tolllógina vórðu tey sokallaðu punktgjøldini, tað eru tey gjøld, ið áðrenn 1. februar 1992 vóru í løgtingslóg um innflutningsgjald, t.d. gjald á rúsdrekka, sigarettum, sjónvørpum og luktilsi, eisini broytt soleiðis, at hesi komu at fylgja uppbýtingini í toll- og vøruskránni. Neyðugt varð eisini her at gera eina nýggja lóg, og fekk henda lóg heitið "Løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi".

Henda lóg verður eisini galdandi aftaná 1. januar 1993, men neyðugt verður at gera ymsar broytingar í henni. Hetta kemst av, at sambært handilssáttmálanum við EF, skal sama avgjald krevjast av vøru, ið er framleidd í Føroyum, sum av vøru, ið verður innflutt til Føroyar.

Verður t.d. avgjørt, at avgjald sambært hesi lóg skal verða á luktilsi, so skal apotekið, um tað framleiðir hesa vøru, umframt meirvirðisgjald eisini rinda avgjald av síni framleiðslu. Tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi innfluttum klædnavørum og føroyskari framleiðslu av sovorðnum vørum.

Landsstýrisins ætlan er tí, at avgjald sambært lóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi í mest møguligan mun bert skal vera á vørum, ið ikki verða framleiddar her á landi, t. d. kann nevnast rúsdrekka, sigarettir, sjónvarp, radio og t.d. ymisk húsarhaldstól. Í tann mun avgjald sambært lógini eisini verður á føroyskari framleiðslu, kemur hetta eisini at skapa fyrisitingarligar trupulleikar. Mett verður tí, at hesi gjøld eiga at verða so fá sum gjørligt, og at inntøkur til landskassan í staðin eiga at koma frá meirvirðisgjaldinum.

Uppskot til broytingar í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi og aðrar lógir, ið neyðugt verður at gera ávísar broytingar í samband við umleggingina, verða løgd fram í ólavsøkutingsetuni.

Tá ið nýggja toll- og avgjaldsskipanin er liðug, fevnir hon um eina løgtingslóg um toll, eina løgtingslóg um meirvirðisgjald og eina løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi. Haraftrat koma so løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum og løgtingslóg um serligt gjald á brenniolju.

Orsøkin til, at viðmerkingarnar til hesa lóg eru so umfatandi, er, at lógin í stóran mun gevur landsstýrinum heimild til at seta nærri reglur við kunngerð viðvíkjandi fyrisitingini av lógini.

Roknast má við, at tað skulu gerast einar 15 kunngerðir við heimild í meirvirðisgjaldslógini. Fyri at løgtingið skal kunna seta seg nágreiniliga inn í málið, eru viðmerkingarnar skrivaðar soleiðis, at tær eisini í ávísan mun greiða frá innihaldinum í kunngerðunum.

Ætlanin er eisini, at viðmerkingarnar saman við álitinum hjá løgtinginum, kunnu vera grundarlag fyri einari bók um meirvirðisgjald, soleiðis at fyrisiting, virki og persónar, ið annars koma at arbeiða við hesum rúgvismikla tilfarinum, hava nakað at halda seg til.

Kanning er gjørd fyri at finna út av, hvussu nógv virkir fara at verða skrásett sambært meirvirðisgjaldslógini, og hvar tey liggja geografiskt, soleiðis at ein fyrisiting, ið skal fyrisita meirvirðisgjaldið, kann verða gjørd.

Henda kanningin er gjørd í samstarvi við Líkningarráð Føroya og er grundað á hesar upplýsingar:

1) Hvussu nógv partafeløg, ið hava goldið løn seinastu 18 mánaðirnar.

2) Hvussu nógv, ið hava fylt út teigarnar hall og vinningur av egnum rakstri í sjálvuppgávuni.

Niðurstøðan er, at tilsamans verða uml. 4.000 virkir skrásett sambært lógini. Afturat hesum skal roknast við, at fleiri lata seg skráseta í samband við útleigulsølu av húsum. Eisini má roknast við, at nøkur, ið hava sølu, ið er minni enn kr. 20.000, fara at lata seg skráseta.

Býtið av virkjum, ið verða skrásett sambært meirvirðisgjaldslógini, er víst niðanfyri:

**Stabbamynd**

| | Feløg | Einstakl. | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Streymoy, Sandoy og Nólsoy | 458 | 1470 | 1928 |
| Eysturoy | 211 | 645 | 856 |
| Norðoyggjar | 106 | 414 | 520 |
| Suðuroy | 95 | 374 | 469 |
| Vágoy | 60 | 239 | 299 |
| Tilsamans | 930 | 3142 | 4072 |




Fyrisitingin av meirvirðisgjaldinum er fyrst og fremst eftirlit við virkjum. Eftirlitið er fyri ein part roknskapareftirlit og fyri ein part eitt útgjaldingareftirlit.

Útgjaldingareftirlitið verður t.d. framt, tá ið eitt virki sendir landskassanum eina rokning orsakað av, at virkið hevur keypt meira av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, enn selt hevur verið fyri í einum avgjaldstíðarskeiði. Hetta eftirlit verður framt á tann hátt, at farið verður út til virkið, har ið skjøl og fakturar verða gjøgnumgingin. Roknskapurin verður ikki gjøgnumgingin, tá ið sovorðið eftirlit verður framt.

Roknskapareftirlitið verður harafturímóti meira nágreiniligt, tí her verður meirvirðisgjaldsroknskapurin grannskoðaður. Orsakað av at livitíðin hjá føroyskum virkjum er sera stutt, verður miðað ímóti, at hetta verður framt í minsta lagi 5. hvørt ár.

Útgjaldingareftirlitið er sostatt tað eftirlit, ið kemur oftast fyri.

Viðvíkjandi sjálvari fyrisitingini metir landsstýrið, at meirvirðisgjaldshøvuðsdeildin eigur at vera í Tórshavn. Henda deildin fær til uppgávu at skráseta virkir, hava eftirlit við inngjaldingum og útgjaldingum, gera roknskapareftirlit, útgjaldingareftirlit og at standa fyri umsitingini av meirvirðisgjaldi annars.

Í minsta lagi ein meirvirðisgjaldskønur eigur at vera á hvørjari tolldeild í landinum. Uppgávan hjá hesum er, at fyrisita útgjaldingareftirlitið og at ráðgeva virkjunum í meirvirðisgjaldsspurningum annars. Somuleiðis eigur viðkomandi at hjálpa roknskapareftirlitinum, tá ið eftirlit verður gjørt hjá virki í hansara øki.

Landsstýrið metir, at umframt ein leiðara fyri meirvirðisgjaldsdeildini skulu uml. 7 fólk setast til útgjaldingareftirlitið, meðan 10 fólk skulu setast til roknskapareftirlitiö. Av hesum kunnu 4 fólk takast úr teirra núverandi arbeiði á Føroya Tollstovu.

Tey, ið verða sett at arbeiða við meirvirðisgjaldsdeildina, eiga at hava útbúgving innan fyri roknskap.

Viðmerkjast skal, at landsstyrið í løtuni arbeiðir við at kanna, hvussu effektiv og rationel umsitingin av meirvirðisgjaldi kann vera, og um tað er rættast at samskipa umsitingina við aðrar almennar stovnar. Í hesum sambandi er ætlan landsstýrisins at seta ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk, ið skal koma við einum tilmæli hesum viðvíkjandi.

Í samband við meirvirðisgjaldið fær Føroya Gjaldstova, ið skal umsita eftirstøðurnar í hesi skipan, eina nýggja arbeiðsuppgávu. Landsstýrið metir tí, at neyðugt verður at eftirhyggja alla eftirstøðuskipanina hjá landskassanum, hetta fyri at samskipa eftirstøðurnar. Arbeiðið eigur at verða liðugt áðrenn 1. januar 1993.

Sambært fyribils metingum, ið Føroya Gjaldstova hevur gjørt, fer eyka arbeiðsuppgávan, ið meirvirðisgjaldið krevur, og ein miðsavnað eftirstøðuskipan hjá landskassanum á Føroya Gjaldstovu afturat núverandi arbeiðsorku at krevja 2½ fulltíðarstørv. Av hesum er neyðugt at seta ein leiðara, ið skal vera løgfrøðingur.

Viðvíkjandi eftirliti og revsireglunum skal landsstýrið boða frá, at uppskotið er sent fútanum til ummælis.

Har ið at kalla øll lond í vesturheiminum eru farin frá einari "oms"-skipan til eina meirvirðisgjaldsskipan, er landsstýrisins uppskot at fara beinleiðis frá innflutningsgjaldsskipanini til meirvirðisgjaldið. Meirvirðisgjaldið er á sama hátt sum "oms"-skipanin eitt sølugjald. Munurin á einum innflutningsgjaldi og einum sølugjaldi er, at innflutningsgjald er eitt gjald, ið verður uppkravt, tá ið vørur verða innfluttar, meðan eitt sølugjald er eitt gjald, ið verður uppkravt, tá ið selt verður innan vøru- og tænastuøkið ella innan ein breiðan úrskurð av hesum.

Sølugjald hevur higartil ikki verið nýtt í Føroyum. Framleiðslugjald er 0 á øli og mineralvatni. Munurin á framleiðslugjaldi og sølugjaldi er, at framleiðslugjald er eitt gjald, ið verður goldið, tá ið ávísar vørur verða framleiddar, meðan sølugjald verður goldið, tá ið vørurnar verða seldar. Sølugjald kann tí sigast at vera betri fyri gjaldføri hjá virkjum enn framleiðslugjald.

Sølugjald kann annaðhvørt innkrevjast í einum einstøkum søluliði, t.d. framleiðslu-, heilsølu ella smásøluliði (avgjald í einum liði), ella tað kann innkrevjast í øllum søluliðum (avgjald í fleiri liðum).

**AVGJALD Í EINUM LIÐI**
Um avgjald av hvørji einstakari vøru bert skal innkrevjast eina ferð, áðrenn hon kemur til brúkaran, stinga nógvir spurningar seg upp um, hvussu eitt tílíkt avgjald skal leggjast tilrættis.

Soleiðis kundi ein hugsa sær, at avgjald skuldi verið uppkravt av teimum rávørum, ið verða nýttar at framleiða vøruna. Í praksis er hesin møguleikin tó ikki góður, millum annað tí tað hevði verið sera torført at avgera, hvat heitið "rávøra" fevnir um. Ein vøra, sum í einum sambandi verður rokna sum liðugvøru, verður ofta nýtt sum rávøra at framleiða aðra vøru (t.d. epli og korn). Haraftrat hevði rávøruavgjald givið rættiliga lítlan vinning í mun til støddina á avgjaldssatsinum, og orsakað av skiftandi rávørubrúki hevði tað givið eitt sera skiftandi avgjald á lidnar brúkaravørur. At enda hevði tað verið trupult at áseta avgjald á innfluttar liðugvørur.

At leggja avgjald á vørurnar eigur tí ikki at verða gjørt, fyrr enn vørurnar eru lidnar til forbrúk. Á henda hátt slepst undan omanfyri umrøddu trupulleikum.

Sostatt kann talan vera um uppkrevjing í einum av hesum liðum:

a) framleiðslu- ella innflutningsliði
b) heilsøluliði
c) smásøluliði (síðsta liði)

Avgjaldsálegging í framleiðsluliði førir við sær, at vørur verða avgjaldsavgreiddar, tá ið tær verða seldar frá tí virkinum, ið hevur fingið vøruna lidna til forbrúk. Vørur lidnar til forbrúk, ið verða innfluttar úr útlondum, mugu tí undir hesi skipan vera avgjaldsavgreiddar, tá ið tær verða innfluttar.

At avgjald verður uppkravt í heilsøluliði merkir, at avgjaldsavgreiðslan vanliga fer fram í næstseinasta søluliði, áðrenn vøran kemur til brúkaran, tað er, tá ið hon verður seld smásøluni.

At enda merkir avgjald í smásøluliði, at avgjaldsavgreiðslan ikki fer fram, fyrr enn vøran verður seld brúkaranum.

Verður avgjald lagt í heilsølu- ella smásøluliðinum, má avgjaldseftirlit ikki bert fremjast á virkjum í viðkomandi liði, men eisini á virkjum í undanfarnu liðum, tí tær vørur, ið avgjald skal leggjast á, prinsipielt verða avgjaldsskyldugar, í tí løtu tær eru liðugt framleiddar. Hetta hevur so við sær, at framleiðandi virki, ið selja vørur sínar ella ein part av teimum beinleiðis til brúkarar (t.d. handverkarar), altíð skulu uppkrevja avgjald av hesari sølu og avrokna tað við avgjaldsmyndugleikarnar.

Avgjald í einum liði verður vanliga ikki roknað at vera egnað í relatión til nútímans sølugjald.

## AVGJALD Í FLEIRI LIÐUM

Avgjald í fleiri liðum kann vera kumulativt avgjald ella meirvirðisavgjald.

### Kumulativt avgjald

Kumulativt avgjald er soleiðis, at avgjald í hvørjum einstøkum søluliði skal uppkrevjast av fulla søluprísinum. Avgjald verður sostatt lagt á hvørja einstaka vøru ella tænastu fleiri ferðir á vegnum fram til endaliga brúkaran (tví- ella fleir avgjaldsálegging).

Heilt einfalt merkir kumulativt avgjald sum sett upp niðanfyri, at avgjald skal rindast av rávøru, tá ið hon verður latin fabrikantinum, at hesin av nýggjum skal seta avgjald á hálvfabrikatið, tá ið tað verður seft framleiðaranum av tí lidnu vøruni, og at avgjald síðani skal áleggjast lidnu vøruni, tá ið hon verður seld frá fabrikanti til heilsølu, frá heilsølu til smásølu og at enda frá smásølu til brúkara. Avgjaldið verður við hvørja av hesum sølum roknað við sama avgjaldssatsi, men grundað á prísin við hvørja einstaka sølu.

Fylgjandi konstrueraðu taldømi vísa bygnaðin á kumulativa avgjaldinum (her roknað við einum avgjaldssatsi, ið er 5 % av tí prísi, ið verður kravdur í hvørjum einstøkum liði):

| Søluprísur u/avgjald | | Avgjald |
|---|---|---|
| Rávøruframleiðsla (t.d. ull) | 100 kr | 5 kr |
| Hálvfabrikatframleiðsla (tógv) | 180 kr | 9 kr |
| Liðugvøruframleiðsla (meturvørur) | 260 kr | 13 kr |
| Heilsøla | 300 kr | 15 kr |
| Smásøla | 400 kr | 20 kr |

Brúkaraprísur, íroknaður avgjald = 420 kr. Samlaða avgjaldið goldið av vøruni = 62 kr, sum er umleið 15% av brúkaraprísinum, íroknað avgjaldið.

Samlaða avgjaldið verður sostatt eftir kumulativu skipanini munandi hægri enn avgjaldið, við sølu í síðsta liði (brúkaraprísinum).

Hesin avgjaldsháttur verður av somu orsøk ikki hildin at vera nýtuligur í samband við nútímans sølugjald.

**Meirvirðisavgjald**
Meirvirðisavgjald liggur so at siga millum avgjald í einum liði og kumulativt avgjald.

Meirvirðisavgjald ber í sær, at avgjald skal roknast av søluprísinum við eina og hvørja sølu eins og við kumulativum avgjaldi, men munurin er, at virki kunnu frádraga avgjaldið, sum tey hava goldið við innkeyp av t.d. rávøru og øðrum útreiðslum til framleiðslu av viðkomandi vøru.

Hvørt einstakt virki skal soleiðis bert inngjalda avgjaldið av tí virðisøkingingini, sum er farin fram í virkinum. Hetta kann vísast við fylgjandi dømi (avgjaldssatsur = 15%): 20%, incl. 16,67%

| | Prísur uttan avgjald kr | Inn gangandi avgjald kr | Útgangandi avgjald kr | Avgjalds tilsvar kr |
|---|---|---|---|---|
| Rávøruframleiðsla | | | | |
| keyp | 0 | 0 | | |
| søla | 80 | | 12 | 12 |
| Liðugvøruframleiðsla | | | | |
| keyp | 80 | 12 | | |
| søla | 200 | | 30 | 18 |
| Heilsøla | | | | |
| keyp | 200 | 30 | | |
| søla | 240 | | 36 | 6 |
| Smásøla | | | | |
| keyp | 240 | 36 | | |
| søla | 320 | | 48 | 12 |
| Avgjaldsupphæddirnar samanlagdar | | | | 48 |

Fyri eina og hvørja vøru er samanlagda upphæddin av avgjøldum goldin í øllum søluliðum tann sama sum tað roknaða avgjaldið við seinastu sølu av vøruni (útgangandi avgjald), tað merkir sama upphæddin, sum hevði avgjald í einum liði í staðin verið uppkravt við sama avgjaldssatsi við seinastu sølu av vøruni.

Fevnir meirvirðisgjald um allar søluliðir, herímillum smásølu, kemur avgjaldstrýstið fyri brúkaran soleiðis at svara til eitt avgjald í smásøluliði við sama avgjaldssatsi sum meirvirðisgjaldið. Verður smásøluliðurin undantikin avgjaldi, svarar avgjaldstrýstið á sama

hátt til eitt heilsøluavgjald, og verða bæði heilsølu- og smásøluliðirnir undantiknir, svarar avgjaldið til eitt avgjald í framleiðsluliðinum.

Búskaparliga kemur merivirðisavgjaldið tí at svara til eitt avgjald í einum liði.

Munurin frá avgjaldi í einum liði er millum annað av praktiskum slag, við tað at avgjaldstrýstið við meirvirðisgjaldi verður spjatt yvir eitt størri tal á virkjum. Um avgjaldið fevnir um allar liðir, kemur tað at hava tann fyrimun fyri virkini, at avgjald skal roknast við allar sølur, soleiðis at seljaranum ikki tørvar at ivast í, um hvør einstøk søla møguliga kann fara fram uttan avgjald.

Ikki kann sigast við vissu, um arbeiðið hjá virkjum og avgjaldsmyndugleikum samanumtikið verður størri ella minni enn undir einum samsvarandi avgjaldi í einum liði, men meirvirðisgjald kann tó føra við sær ein fyrimun viðvíkjandi eftirlitinum, av tí at virkini allarhelst hava áhuga fyri at føra nágreiniligan roknskap yvir keyp fyri soleiðis at tryggja sær frádráttarrætt fyri avgjald goldið í undanfarnum søluliðum.

Fyri at skilja meirvirðisgjaldsmeginregluna er umráðandi at hava í huga, at tá ið hvør einstøk vøra verður avgjaldsavgreidd, hevur virkið í praksis ikki møguleika fyri at rokna, hvussu mikið av hesari vørueind ið er goldið í avgjaldi í undanfarnum søluliðum. Skal virkið hava møguleika fyri hesum, má tað í hvørjum einstøkum føri kanna keypsfakturan gjølla, og tað kann ofta vera torført at finna, frá hvørjari vørusending hvør einstøk vørueind stavar. Hvat framleiðsluvirkjum viðvíkur, hevði tað verið eitt trupult rokniarbeiði, ið ikki kann gerast til fulnar.

Tí kann avgjaldsskipanin ikki vera soleiðis løgd til rættis, at frádráttir fyri avgjøld goldin av hvørjari einstakari vøru ella av hvørjari einstakari vørusending í undanfarnum liði verða gjørdir í praksis. Í staðin má virki uppgera avgjaldið av seldum vørum í einum ávísum tíðarskeiði á sama hált sum við avgjaldi í einum liði, tað er avgjald av fulla søluprísinum, og síðani draga avgjald goldið av vørum keyptar í sama tíðarskeiði frá hesari upphædd, hóast tær tá kanska ikki eru seldar.

Sum vansi við meirvirðisgjaldi í mun til samsvarandi avgjald í einum liði kann nevnast, at tað í ein størri mun gevur møguleika fyri einari sonevndari pyramiduavleiðing, tað vil siga vandin fyri, at seinni søluliðir rokna sær vinning av sølugjaldi, ið er goldið í undanfarnum liðum.

**Meirvirðisgjaldsneutralitetur**
Meirvirðisgjaldsneutralitetur er eitt sum lóggevandi myndugleikar í øðrum londum hava lagt stóran dent á, tá umhugsað hevur verið at gjøgnumføra meirvirðisgjaldsskipan. Tað merkir, at avgjald í sjálvum sær ikki ávirkar vinnulívs og brúkaradispositiónir.

Fyri at avgjald kann sigast at vera neutralt yvir fyri vinnulívsbygnaðinum, má tað krav setast til avgjaldsskipanina, at hon er soleiðis løgd til rættis, at sama avgjald skal rindast, uttan mun til hvussu nógvar handilsliðir ein vøra fer ígjøgnum, avgjaldið í prosentum av

prísinum á eini vøru er tað sama, uttan mun til hvørjum virki keyparin keypir frá, og avgjaldstrýstið er tað sama, uttan mun til um ein vøra er handverksframleidd ella framleidd við størri ella minni maskinu.

Við øðrum orðum má ikki vera størri fyrimunur fyri keypara at gera síni keyp hjá einum ávísum latara fram fyri aðrar, og skipanin má ikki mótvirka rationaliseringum innan vinnulívið.

Hvat innflutningi viðvíkur ber kravið um neutralitet við sær, at avgjaldið av innfluttari vøru skal vera tað sama sum av vøru, ið er framleidd innanlendis.

Hvat útflutningi viðvíkur, merkir neutralitetskravið, at útfluttar vørur skulu frítakast fullkomiliga fyri avgjald. Tí við atliti til kappingarføri hjá føroyskum útflutningsvirkjum á útlendskum marknaði, er umráðandi, at avgjøld hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis eru áløgd útflutningsvørum.

Í relatión til brúkaravalið merkir neutralitetur, at avgjaldið ikki má bera í sær nakað lyndi at broyta brúkarasamansetingina; tí mugu vørur og tænastur í størst møguligan mun vera avgjaldsskyldugar.

**§ 1. "Sambært hesi lóg skal avgjald rindast til landskassan í ellum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum."**

**Til § 1**
§ 1 Í meirvirðisgjaldslógini er ein innleiðandi grein, ið ásetir at "sambært hesi lóg skal rindast avgjald til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum". Tá eru sostatt tvær treytir, sum eru avgerandi fyri rindan av meirvirðisgjaldi, nevniliga innanlendis søla og innflutningur.

Í meirvirðisgjaldslógini eru ymsir hættir nýttir fyri at tryggja, at meirvirðisgjald ikki ella bert lutvíst verður álagt ávísum tænastum og vørum. Hesir hættir kunnu lýsast soleiðis:

**1.** Tænastur, ið eru nevndar í § 2, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini eru ikki meirvirðisgjaldsskyldugar. Somuleiðis eisini viðvíkjandi frítøku fyri meirvirðisgjaldsskyldu fyri ávís tiltøk við góðgerandi endamáli, samanber § 2, 5. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Hetta ger, at virki, ið selja tilíkar vørur og tænastur, ikki skulu meirvirðisgjaldsskrásetast. Men harvið fáa virkini heldur ikki møguleika fyri afturrindan av tí meirvirðisgjaldi, ið er rindað tá ið tilfar og rakstrargøgn v. m. verða keypt. Hesar vørur og tænastur verða sostatt bert fyri ein part frítiknar fyri meirvirðisgjald.

**2.** Ávís virki - t.d. listafólk, virki, hvørs árliga søla ikki fer upp um kr. 20.000, tannteknikarar, blind - verða frítikin fyri at gjalda meirvirðisgjald av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, møguliga sambært serligum treytum, samanber §§ 3-4 í meirvirðisgjaldslógini.

Á sama hátt sum undir pkt. 1. skulu viðkomandi virki ikki meirvirðisgjaldsskrásetast, og tær vørur og tænastur, sum virkini selja, verða sostatt bert lutvíst frítikin fyri meirvirðisgj ald.

**3.** Prinsipielt meirvirðisgjaldsskyldugar latingar kunnu sleppa undan meirvirðisgjalds-skyldu, samanber § 12 í meirvirðisgjaldslógini. Hetta er fyrst og fremst galdandi fyri út-flutning av vørum til útlond og tænastur, ið verða gjørdar í samband við útflutning og sølu av skipum og tíðindabløðum, eisini til innanlendis nýtslu.

Hetta hevur við sær, at meirvirðisgjaldsskrásett virki, ið hava frádrátt fyri meirvirðisgjald av keypi, ikki skulu uppkrevja meirvirðisgjald av tílíkari sølu. Sostatt sleppa latingar av umrøddu vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum heilt undan meirvirðisgjaldi.

## I. VAVIÐ Á AVGJALDSSKYLDUNI

**§ 2. Avgjaldsskyldan er galdandi fyri allar nýggjar og brúktar vørur. Gass, vatn, ravmagn, hiti o.t. eru at rokna sum vørur.**
**2. stk. Avgjaldsskyldan er galdandi fyri allar tænastur, undantikið tær, sum eru nevndar í 3. stk.**
**3. stk. Hesar tænastur eru undantiknar avgjaldsskylduni:**
**a. Viðgerð á sjúkrahúsi, læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiro-praktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.**
**b. Almanna umsorgan og stuðul, herímillum vøggustovur, barnagarðar, frítíðar-heim, vistarheim, umlættingarheim o.t. privatir ella almennir stovnar.**
**c. Undirvísing í skúla ella á fróðskaparsetri, faklig útbúgving, herímillum endurút-búgving, og onnur frálæra, ið líkist skúla ella fakligari útbúgving. Undirvísing í máli, tónleiki, fimleiki, handarbeiði, tekning, bókhaldi og maskinskriving er at rokna sum sovorðin útbúgving.**
**d. Mentunarligt virksemi, herímillum bókasøvn og forngripasøvn, o.t. Tó eru út-varps- og sjónvarpssendingar, sýning av sjónleiki og filmi, konsertir o.t. avgjalds-skyldug.**
**e. Ítróttur og ítróttartiltøk. Tó eru tiltøk sum professionellir ítróttarluttakarar lut-tala í, avgjaldsskyldug, fótbóltsdystir tó bert, tá professionellir leikarar eru á báðum liðum.**
**f. Fólkaflutningur.**
**g. Tænastur hjá postverkinum. Tó er pakkapostur avgjaldsskyldugur.**
**h. Útleiga, uppsiting og umsiting av fastari ogn. Tó er útleiga av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.t. avgjaldsskyldug, útleiga av kamari á virki, ið leigar út í tíðarskeið, sum er styttri enn 1 mánað, og útleiga av camping-, parkerings- og reklamuplássi.**
**i. Tryggingarvirksemi.**
**j. Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi. Tó er útleiga av bankaboksum avgjalds-skyldug.**
**k. Eydnuspæl og tílíkt.**
**l. Rithøvunda- og tónaskaldavirksemi og annað listarligt virksemi.**
**m. Tænastur beinleiðis í samband við jarðarferðir.**

**n. Ferðamannastovuvirksemi og ferðamanna leiðbeiningar- og upplýsingarvirksemi.**
**4. stk. Landsstýrið kann áseta nærri treytir fyri tey undantøk frá avgjaldsskyldu, ið eru nevnd í 3. stk.**
**5. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur fyri frítøku frá avgjalddskylduni í samband við tiltøk, hvørs yvirskot óskerd fara til vælgerandi endamál ella endamál, sum á annan hátt eru almannagagnlig.**

**Til § 2, 2. stk.**
Vavið á avgjaldsskylduni er at skilja sum allar tær vørur og tænastur, sum eru nevndar í lógini sum avgjaldsskyldugar, og sum avgjald skal gjaldast fyri við innanlanda keyp og sølu og við innflutning.

Sambært § 2, 1. stk. eru allar vørur - bæði nýggjar og gamlar - umfataðar av avgjaldsskylduni. Sum høvuðsregla verður sostatt toll- og vøruskráin avgerandi fyri, nær ið talan er um eina vøru.

Heilivágur, gass, vatn, ravmagn, hiti, kuldi, dampur o.t. og livandi djór og plantur verða eisini roknað sum vørur.

Gomul frímerki, myntar v.m., ið verða seld sum savnilutir, verða roknað sum vørur.

Føst ogn er ikki at rokna sum vøra. Við undir fasta ogn kemur sjálvt grundstykkið, trø, føst grøði, girðing, brunnar, útbúnaður, bygningar og bygningstilhoyr, tá hetta er fast á grundini ella í bygninginum.

Krøv (rættindi) eru heldur ikki at rokna sum vørur. Fyri at lýsa munin millum vørur og rættindi kann nevnast, at virðisbrøv sum skuldarbrøv og partabrøv, lutaseðlar, gávukort, frímerki o.t. eru at rokna sum vørur, tá tey verða seld sum prentlutir, meðan tey rættindi, sum virðisbrøv o.t. umboða, harafturímóti ikki eru at rokna sum vørur.

Sum nevnt fevnir avgjaldsskyldan um allar vørur. Tó eru flogfør og skip yvir 5 GT (undantikið sportsflogfør og lystfør) og bløð avgjaldsfrí. Sambært § 12 í lógini kunnu nevndu vørur verða seldar uttan avgjald. Tá vørurnar eru komnar inn undir avgjaldsskipanini á henda háti, merkir hetta, at hóast vørurnar kunnu seljast við ongum avgjaldi, er kortini fullur frádráttarrættur fyri avgjaldið viðvíkjandi útreiðslum v. m. til framleiðing og sølu av vørunum.

**Til § 2, 2. stk.**

**Avgjaldsskyldugar tænastur**
Høvuðsreglan er, at allar tænastur uttan tær, ið eru nevndar í 3. stk., eru avgjaldsskyldugar. Tænasturnar kunnu leysliga býtast í 4 bólkar, nevniliga:

1) tænastur í samband við vørur

2) tænastur í samband við fasta ogn
3) aðrar tænastur
4) óevnislig ogn (immateriel aktiv)

Fyri at lýsa, hvussu víttfevnandi avgjaldsskyldan er, verða nakrar av teimum tænastum, sum koma oftast fyri innan hesar bólkarnar, nevndar niðanfyri.

<u>Tænastur í samband við vørur:</u>
- arbeiðstænastur
- útleiga
- flutningur og goymsla

<u>Tænastur í samband við fasta ogn:</u>
- arbeiðstænastur
- verkætlanir v.m.
- útleiga av camping-, parkerings- og reklamuplássi

<u>Aðrar tænastur</u>
- advokatvirksemi
- lýsingar og reklamur
- skrivstovuvirksemi
- ognarmeklaravirksemi
- elektronisk dátuviðgerð
- stuttleikatiltøk vm.
- hárfríðkan og vakurleikaviðgerð
- viðtaluligt (konsultativt) virksemi
- meklara- og agenturvirksemi
- grannskoðan og bókhald v. m.
- servering á matstovu v. m.
- telefon, telegrafur, telex v. m.
- útleiga av hotelkamari v. m.
- útleiga av bankaboksum
- ávís sløg av undirvísing

**Óevnislig ogn**
- brúkararættur
- good will
- patentrættindi

<u>til 1) tænastur í samband við vørur:</u>

**a. Arbeiðstænastur, knýttar at vørum**
Avgjaldsskyldan fevnir um allar arbeiðstænastur, ið eru knýttur at vørum og konstruktión og tilevning av vørum.

Avgjaldsskyldan fevnir soleiðis um sundurgreining, kanning, máting, vigan, skiljing og

reingerð av vørum.

Arbeiðstænastur í samband við djór eru at rokna sum arbeiðstænastur knýttar at vørum. Røkting, fóðran, venjing, royting, klipping, vasking, fletting v.m. eru tí avgjaldsskyldug.

**b. Útleiga av vørum**
Avgjaldsskyldan fevnir um ein og hvønn máta at útleiga vørur, t.d. bilar, útvørp og sjónvørp, maslánur og amboð, veitsluklæði, borðbúnað.

Av tí at føst ogn ikki er at rokna sum vøra, er tað ein meginregla, at útleiga av bygningi, høli og aðrari fastari ogn ikki er avgjaldsskyldug (viðvíkjandi útleigu av kamari á hotelli o.t. sí niðanfyri).

Útlán av bókum av bókasavni er ikki umfatað av avgjaldsskylduni, sbr. § 2, 3. stk., pkt- d í lógini.

**c. Flutningur og goymsla v.m.**
Avgjaldsskyldan fevnir um flutning av vørum og goymslu v.m. av vørum.

Ein og hvør máti at flyta vørur er soleiðis avgjaldsskyldugur. Eisini bjarging, sleiping, lossing og lasting, flutningur av djórum, renovatiónskoyring, útbering av bløðum, lýsingarheftum v.m. og pakkaflutningur hjá postverkinum.

Brævbering, sum postverkið hevur monopol uppá, er ikki avgjaldsskyldug, javnber § 2, 3. stk. pkt. g.

Harumframt er goymsla av vørum avgjaldsskyldug, herímillum m.a. goymsla á koli- og frystigoymslu.

<u>til 2) tænastur í samband við fasta ogn:</u>

**a. Arbeiðstænastur á fastari ogn**
Avgjaldsskyldan fevnir um allar arbeiðstænastur á fastari ogn (jørð, bygningum v.m.)

Soleiðis skal avgjald rindast av velting, útgrevstri, slættan og javnan, og viðgerð av trøum og fastari grøði.

Nýbygging og umbygging, ístandgerð, viðlíkahald og reingerð av fastari ogn og tilhoyri er eisini avgjaldsskyldugt. Avgjaldsskyldan er sostatt ikki bert galdandi fyri byggiarbeiði, men eisini fyri gerð av vegi, kloakk, havnum og brúgvum.

**b. Verkætlanir v.m. viðvíkjandi fastari ogn**
Avgjaldsskyldan fevnir bæði um verkætlanir og um annan tøknifrøðiligan stuðul í samband við nýgerð, innrætting, umvæling og viðlíkahald av bygningum og aðrari fastari ogn.

Undir hetta hoyrir virksemi hjá byggifrøðingum og verkfrøðingum, sum eru avgjaldsskyldugir bæði viðvíkjandi ítøkiligum verkætlanum og viðvíkjandi planlegging, t.d. økis- og býarætlanum, endurskipanar- og miðbýarætlanum.

Sum dømi um annan tøknifrøðiligan stuðul kunnu nevnast virksemi hjá bústaðar- og handilsráðgevum, tilsjón við landi, skorsteinssóping og annað tilsjónarvirki.

**c. Útleiga av camping-, parkerings- og reklamuplássi**
Avgjaldsskyldan fevnir um útleigu av parkeringsplássum fyri motorakfor, campingvognar, súkklur v. m. Hetta er galdandi bæði fyri útleigu av garasjum, parkeringsøkjum o.t. og leigu av einstøkum parkeringsplássum í garasju, parkeringshúsi og á almennum vegi.

Eisini útleiga av plássi á havnaroki er umfevnt av avgjaldsskylduni.
Útleiga av reklamuplássi (plakattalvum, skeltiplássi o.t.) á bygningum, flutningsførum, ítróttarøkjum, reklamusúlum og øskubikrum v. m. er eisini umfevnd av avgjaldsskylduni.

til 3) aðrar tænastur:

**a. Advokatvirksemi**
Avgjaldsskyldan fevnir um tænastur sum advokatar gera undantikið viðgerð av lánimálum, herímillum útflýggjan av veðbrøvum og øðrum lániskjølum (fíggjarvirksemi), og fíggjarfyrisiting, § 2, 3. stk. pkt. j.

Tað skal viðmerkjast, at tænastur í samband við ognarfyrisiting eru frítiknar frá avgjaldsskylduni sambært § 2, 3. stk pkt. h.

**b. Lýsingar og reklamur**
Avgjaldsskyldan fevnir um lýsingar og reklamur av øllum sløgum.

Soleiðis eru lýsingar av øllum sløgum avgjaldsskyldugar t.m. eisini lýsingar í skráum, tíðindabløðum, lýsingarbløðum, fakfelagsbløðum v. m.

Ráðgevandi og skapandi virksemi í samband við reklamu er eisini avgjaldsskyldugt (t.d, reklamustovur og dekoratorar).

Harumframt eru reklamur hjá ítróttarfeløgum avgjaldsskyldugar, t.d. tá limir í ítróttafelagi, bera ítróttarklæði, ið hava navn ella merki hjá virki.

**c. Skrivstovuvirksemi**
Avgjaldsskyldan fevnir um sjálvstøðugar tænastur, ið verða framdar av ymiskum skrivstovuvirkjum, t.d. kunnu hesi verða nevnd:

innkrevjingarstovur, konsert- og sjónleikarhús (søla av atgongumerkjum), vaktartænasta og vikarstovur.

Tað skal viðmerkjast, at ferðamannastovuvirksemi og upplýsing á ferðamannastovu er

undantikið avgjaldsskylduni sambært § 2, 3. stk, pkt, n í lógini.

**d. Ognarmeklaravirksemi**
Avgjaldsskyldan fevnir um virksemi hjá ognarmeklara og ognarhandlara við at fáa í lag sølu og útleigu av fastari ogn.

Tað at ognarmeklarar luttaka í lánimálum (fíggingarvirksemi), er frítikið frá avgjaldi, og sama er galdandi fyri møguliga luttøku, tá trygging hevur verið teknað í samband við ognarhandil.

**e. Elektronisk dátuviðgerð**
Avgjaldsskyldan fevnir um bæði manuella viðgerð (ætlanir, forritan v.m.) og maskinviðgerð (holing av kotubandi, maskinskriving við ljóslesbærari skrift o.s.fr.), ið er við í dátuviðgerð (edv). Somuleiðis viðgerð í samband við at royna forrit og eftirviðgerð av útskrivaðum tilfari (skiljing, reinskering, falsing v.m.).

**f. Stuttleikatiltøk**
Avgjaldsskyldan fevnir um filmssýning í biografi, sjónleik, konsertir, v.m.

Atgongugjaldið frá tílíkum sýningum v.m. er avgjaldsskyldugt.

Verður stuttleikaøki gjørt, er atgongugjald til sovorðið øki avgjaldsskyldugt.

Í samband við stevnur eru bæði atgongugjald og keyp og søla í teimum ymisku búðunum avgjaldsskyldug, t.d. fiskibrunnur, eydnuhjól, 21-spæl, skjótibreyt v.m.

Bæði atgongugjald frá stevnum o.t., har avgjaldsskyldug stuttleikatiltøk eru, og keyp og søla í stuttleikabúðunum eru umfatað av avgjaldsskylduni. Sama er galdandi fyri sølu av hefti, ið umframt at vera lutaseðil til fleiri vinningar, eisini er atgongumerki til avgjaldsskyldugt stuttleikatiltak í staðin fyri atgongugjald.

Samsýning fyri nýtslu av billiardborði, og tann inntøka billiardklubbar hava av útleigu av billiardborði til onnur enn limir í klubbanum er eisini avgjaldsskyldug.

Tað skal viðmerkjast, at mentunarlig tiltøk eru frítikin frá avgjaldsskylduni.

Avgjaldsskyldan fevnir um ítróttartiltøk, har professionellir ítróttaríðkarar luttaka (fótbóltsdysti viðvíkjandi tó bert, tá professionellir spælarar luttaka á báðum liðum).

Onnur ítróttartiltøk eru frítikin frá avgjaldsskylduni sambært § 2, 3. stk. pkt. e.

**g. Hárrøkt og vakurleikaviðgerð**
Avgjaldsskyldan fevnir um hárrøkt o.t. Eisini ikki læknalig viðgerð av hári og høvuðbotni t.d. móti hármissi er umfevnt av avgjaldsskylduni.

Avgjaldsskyldan fevnir eisini um ymiska vakurleikaviðgerð, t.d. húðrøkt, massasju, ljós-

viðgerð, elektroterapi, zoneterapi og manicure og liting av eygnahári og eygnabrúm o.t. Somuleiðis er pedicure (pussing og lakering av neglum) avgjaldsskyldug.

**h. Viðtaluligt (konsultativt) virksemi**
Avgjaldsskyldan fevnir um ymiskar ráðgevandi og viðtaluligar tænastur, t.d. innan fíggjarliga og tøknufrøðiliga ráðlegging (planlegging), rationalisering, framleiðslumenning, samskifti og skipan (organisatión).

Avgjaldsskyldan fevnir eisini um tænastur í samband við marknaðarforing og -greining (analysa). Marknaðargreining er at skilja sum marknaðargransking, har tað so objektivt og sikkurt sum møguligt verður innsavnað vitan um marknaðin, ið kann verða nýtt sum grundarlag fyri avgerðum í samband við marknaðarføring av vørum og tænastum (bæði avgjaldsskyldugum og ikki avgjaldsskyldugum tænastum).

Týðingartænastur eru eisini avgjaldsskyldugar.

**i. Meklara- og umboðsvirksemi**
Avgjaldsskyldan fevnir um tað virksemi, sum verður framt av flutningsfyritøku, skipsmeklara, vørumeklara og umboðsmanni (vørumeklarar og umboðsmenn eru við at gera avtalur um keyp og sølu, men handla ikki fyri egna rokning).

Millumliðssøla av listaverkum og líknandi er eisini avgjaldsskyldug, tvs. gallarí v.m.

**j. Grannskoðan og bókhald v.m.**
Avgjaldsskyldan fevnir um virksemi við grannskoðan, bókhaldi og maskinskriving, fjølritan, ljósritan o. t.

Útinnan av hitaroknskapi fyri útleigarar av húsum o.ø. er eisini avgjaldsskyldug.

**k. Servering á matstovu v.m.**
Avgjaldsskyldan fevnir um servering á hotelli, matstovu, kondittaríi, kaffistovu, í køkubúð, o.t., og á kantinu (uttan mun til um hon verður rikin av arbeiðsgevaranum ella starvsfólkunum).

Servering, ið kann metast javnt við servering í nevndu fyritøkum, tvs. servering í serligum førum eins og á veitslum, fundum, fyribils framsýningum o.t., er eisini avgjaldsskyldug.

Søla frá pylsuvogni, kaffivogni, ísbúð o.t. er avgjaldsskyldug.

**1. Telefon, telegrafur, telex v.m.**
Avgjaldsskyldan fevnir um allar teletænastur (telefon, telegraf, telex o.t.).

**m. útleigu av hotelrúmum v.m.**
Avgjaldsskyldan fevnir um útleigu av rúmi á hotelli, gistingarhúsi, motelli o.t. og á virki, ið leigar út í styttri tíðarskeið enn 1 mánað.

At útleiga kømur er ikki avgjaldsskyldugt, tá ið tað bert verður útleigað í minsta lagi 1 mánað. Virki, ið samstundis leigar út kømur bæði í minni enn 1 mánað og í longri tíðarskeið, skal gjalda avgjald av allari útleiguni.

At útleiga veitslu- og felgsskapshøli og summarhús er ikki avgjaldsskyldugt, sbr. § 2, 3. stk. pkt. h. í lógini.

**n. Undirvísing**
Avgjaldsskyldan fevnir um undirvísing, ið sambært § 2, 3. stk, punkt c. í lógini ikki kann sigast at vera fakútbúgving (hvat koyriskúla viðvíkur, er undirvísing til koyrikort til motorsúkklu og persónbil soleiðis avgjaldsskyldug, meðan undirvísing til koyrikort til lastbil (vinnukort) er undantikin).

Avgjaldsskyldan fevnir harumframt um undirvísing, ið eisini kann metast at vera ráðgeving.

**Til § 2, 3. og 4. stk.**
Fyri at lýsa vavið á avgjaldsskylduni nágreiniligari verða í hesum í stuttum endurgivin tey undantøk frá avgjaldsskylduni, sum eru nevnd í § 2, 3. stk**.** í lógini við stuttum frágreiðingum til hvørt einstakt undantakið.

**a. Viðgerð á sjúkrahúsi, læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt.**
Hetta merkir, at heilsusektorurin aloftast verður hildin uttan fyri avgjaldsskylduna.

Tá ið avgerast skal um ein tænasta (viðgerð) kann metast at vera "onnur verulig heilsurøkt", verður hugsað um fylgjandi:

1) Verður viðgerðin gjørd av einum autoriseraðum læknapersóni, er hon stutt og greitt meirvirðisgjaldsfrí.

2) Sama er galdandi, um viðgerðin gevur rætt til refusión sambært sjúkrakassanum.

3) Um hvørki treytirnar í 1) ella 2) eru loknar, verður kannað um "Sundhedsstyrelsen" metir, at viðgerðin (møguliga í sambandi við ein ávísan bólk av sjúklingum) hoyrir undir heilsufrøðiliga økið, tað kann t. d. vera, av tí at viðgerðin fer fram sambært ávísan frá lækna ella sjúkrahúsi.

Avgjaldsskyldugar eru ein røð av viðgerðum, sum ikki eru góðkendar sum heilsurøkt av tí almenna. Hetta er m.a. galdandi fyri elektroterapi, húðrøkt, hypnosu og samrøðuterapi, manicure, pedicure, vakurleikarøkt, viðgerð hjá nátúrlækna við akupunktur og zoneterapi og massasjuviðgerð, sum ikki hevur ískoytisrættindi sambært sjúkrakassaskipani.

**b. Almannaumsorgan og stuðul, herímillum vøggustovur, barnagarðar, frítíðarheim, vistarheim, umlættingarheim og tílíkir privatir ella almennir stovnar.**

Sambært hesi reglu verður sosiali sektorurin hildin uttan fyri avgjaldsskylduna. Undir hesa reglu kemur t.d. svimjihylur, eisini um hesin kann bjóða savna og karbað.

**c. Undirvísing í skúla ella á fróðskaparsetri, faklig útbúgving, herímillum endurútbúgving, og onnur frálæra, ið líkist skúla ella fakligari útbúgving.**
Undirvísing í máli, tónleiki, likamsvenjing, handarbeiði, tekning, bókhaldi og maskinskriving er at rokna sum sovorðin útbúgving.

Sum likamsvenjing er at rokna: fimleikur, jazzballett, avspenning, yoga, judo (karate og annað sjálvforsvar úr fjareystri), dansur, heilsuítróttur v.m. Sum handarbeiði er at rokna: at seyma, binda, veva, brodera, flætta v.m.

Sambært hesi reglu verður størsti parturin av útbúgvingarøkinum soleiðis hildin uttan fyri avgjaldsskylduna.

Undirvísingarvirksemi, ið ikki er umfevnt av regluni um frítøku, er soleiðis meirvirðisgjaldsskyldugt, tá ið tað verður selt/framt við vinnuligum endamáli. Hetta er m.a. galdandi fyri koyrilæru. Læra til vinnukoyrikort er frítikin sum faklig útbúgving, meðan onnur koyrilæra er meirvirðisgjaldsskyldug.

Tá ið avgerast skal, hvat kemur undir fakliga útbúgving og eisini endurútbúgving, verður dentur lagdur á, um undirvísingin einans við vinnuligum endamáli miðar ímóti at veita ella viðlíkahalda kunnleika. Í ivamálum verður dentur lagdur á, um undirvísingin er góðkend av tí almenna og/ella av einum fakfelagi. Meirvirðisgjaldsfrítøka er treytað av, at undirvísingin ikki fer fram sum ráðgeving til virkir.

**d. Mentunarligt virksemi, t.d. bókasøvn og forngripasøvn.**
Tó eru útvarps- og sjónvarpssendingar, sjónleikar- og filmssýningar, konsertir o.t, avgjaldsskyldugar.

**e. Ítróttavirksemi og ítróttartiltak.**
Hetta merkir, at amatørítróttartiltøk vanliga verða hildin uttan fyri avgjaldsskylduna.

Tó eru tiltøk, har professionellir luttaka, avgjaldsskyldug, fótbólti viðvíkjandi tó bert tá professionellir leikarar eru á báðum liðum.

Sum professionellir fótbóltsleikarar verður hugsað um leikarar, ið leika fótbólt burturav, og sum liva av hesum.

**f. Fólkaflutningur**
Hetta merkir, at allur fólkaflutningur - við bussi, ferju hýruvogni o.t. - verður hildin uttan fyri avgjaldsskylduna.

**g. Tænastur hjá postverkinum**
Høvuðsreglan er, at tænastur framdar av postverkinum eru avgjaldsfríar. Fyri ikki at avlaga kappingarføri fyri onnur ið koyra pakkar út, er fyrisett, at pakkapostur er avgjalds-

skyldugur.

**h. Útleiga, uppsiting og fyrisiting av fastari ogn**
Hetta merkir, at útleiga/uppsiting av fastari ogn - eins og søla av fastari ogn - í høvuðsheitum verður hildin uttan fyri avgjaldsskylduna, t.d. vanlig útleiga av íbúð. Sama er galdandi fyri fyrisiting av fastari ogn.

Tó er útleiga av kamari á hotelli, gistingarheimi, motelli o.t. avgjaldsskyldug. Sama er galdandi fyri útleigu av kamari á øðrum virki, ið leigar út í styttri tíðarskeið enn 1 mánað (t.d. feriugistingarhús). At enda fevnir avgjaldsskyldan um útleigu av camping-, parkerings - og reklamuplássi.

Frítøkureglan fevnir ikki um millumliðssølu viðvíkjandi útleigu av fastari ogn, eftirlit við hitamátara og at føra hitaroknskapi. Tílíkt virksemi er soleiðis eisini meirvirðisgjaldsskyldugt.

**i. Tryggingarvirksemi**
Hetta merkir, at tryggingarfeløg eru hildin uttan fyri avgjaldsskylduna.

Frítøkureglan fevnir eisini um virðismetingar og annað arbeiði, ið er neyðugt í samband við tryggingarvirksemi. Verður føst ogn tryggjað av ognarmeklara í samband við sølu, er hetta sostatt avgjaldsfrítt.

**j. Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi**
Hetta merkir, at bankar, sparikassar, kreditfeløg og annað tílíkt virksemi er hildið uttan fyri avgjaldsskylduna.

Frítøkureglan fevnir eisini um, advokatviðgerð av lánimálum, herímillum at útflýggja veðbrøv og onnur lániskjøl og ognarfyrisiting. Harumframt virðismetingarhandil, ið verður gjørdur fyri kreditstovnar v.m. við tí fyri eyga at kunna veita lán.

Avgjaldsskyldugt er tó at útleiga bankaboksir.

**k. Eydnuspæl o.t.**
Avgjaldsfrítøkan fevnir um eydnuspæl við sølu av lutaseðlum, tombola, bingo og tílík spøl, um burturlutingin er til frama fyri almannagagnlig ella góðgerandi endamál, javnber løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 1987 um eydnuspøl v.m. Undantikin avgjaldi er eisini burturluting, sum sambært lógini ikki krevur landsstýrisins loyvi. Somuleiðis eru happadráttur, ítróttarvedding og happadráttarloyvi hjá Útvarp Føroya undantikin avgjaldsskylduni.

**1. Rithøvunda- og tónaskaldavirksemi og annað listarligt virksemi**
Undantikið avgjaldsskylduni sambært hesi reglu er t.d. free-lance tíðindafólk, ið skriva greinar fyri tíðindabløð, fyrilestrarhaldarar, týðingarvirksemi, rithøvundar og komponistar.

Orkestur, ið spæla til dans, og sum ikki skipa fyri tiltakinum skulu ikki rinda meirvirðis-

gjald. Harafturímóti skal tann, ið skipar fyri tiltakinum rinda meirvirðisgjald.

**m. Tænastur beinleiðis í samband við jarðarferðir**
Undir hetta kemur t. d. flutningur av líki, meðan undantakið ikki fevnir um sølu av gravsteinum, kistum og kransum.

**Til § 2, 5. stk.**
Sambært § 2, 5. stk. í lógini kann landsstýrið áseta reglur fyri frítøku frá avgjaldsskylduni í samband við tiltøk, hvørs vinningur fer óskerdur til vælgerandi endamál, ella sum á annan hátt eru almannagagnlig.

Nærri reglur fyri frítøku verða ásettar í eini kunngerð, har tað verður ásett sambært ávísum treytum, at avgjaldsfrítøka kann loyvast eftir áheitan fyri:

- Støk tiltøk (t.d. konsertir og loppumarknaður).
- Innsavning og søla av brúktum lutum við lítlum virði, t. d. fløskur, pappír og metal, ið vælgerandi feløg v.m. skipa fyri.

Reglan hevur m.a. týdning fyri ítróttar- og skótaarbeiði og annað ungdómsarbeiði, kirkjuligar felagsskapir, Reyða Kross, "Red Barnet" v. m.

**H. VIRKI, IÐ SKULU RINDA AVGJALD.**

**§ 3. Avgjald skal rindast av:**
**a. Tí, sum rekur sjálvstøðugt vinnuvirki við sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.**
**b. Lutafeløgum og øðrum feløgum, hóast felagið bert selur til limir ella bert selur vørur og tænastur hjá limum.**
**c. Almennum veitingarvirkjum, sum selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur.**
**d. Øðrum ríkis-, lands- ella kommunalum stovnum, í tann mun teir selja vørur og av**
**gjaldsskyldugar tænastur í kapping við vinnurekandi virki.**
**e. Tí, sum skipar fyri uppboðssølum.**
**2. stk. Í samráð við nevndina, sum er umrødd í § 35, avger landsstýrið, í hvønn mun vinnurekandi virki og feløg skulu rinda avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, tá tær bert verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum ella felagnum, og í hvønn mun kommunur kunnu fáa endurgoldið avgjald sambært hesi lóg av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.**
**3. stk. Latingar av gassi, vatni, ravmagni og hita sum liður í útleigu av húsi ella húsarúmi hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.**
**4. stk. Søla av egnum listaverki av tí slagnum, ið hoyrir undir vøruflokk 9701-9703 í toll og vøruskránni hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.**
**5. stk. Servering og útleiga av kamari á skúlum og skeiðvirksemi í samband við egna frálæru hevur ikki við sær skyldu at rinda avgjald.**

**Til § 3, 1. stk.**

Persónar (likamligir og løgfrøðiligir), ið skulu krevja og rinda avgjald, verða nevndir avgjaldsskyldugir ella skrásetingarskyldugir persónar. Seinna heitið kemur av tí, at hesi hava skyldu at boða tollvaldinum frá til skrásetingar.

Tað er keyp og søla við vinnuligum endamáli frá sjálvstøðugum virkjum v.m., ið førir við sær skyldu at gjalda avgjald. Skylda at lata seg skráseta er eisini galdandi, hóast keyp og søla eru árstíðarbundin ella bert fara fram av og á.

At eitt virki verður vinnuliga rikið merkir, at endamálið við søluni av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum miðar ímóti einum fíggjarligum vinningi, og tað hevur í hesum sambandi ongan týdning um endamálið - at fáa vinning - ikki verður rokkið.

Eitt virkið, ið selur uttan at útflyta, hvørs meirvirðisgjaldsskyldugu útreiðslur eru støðugt størri enn inntøkur av sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, kann ikki metast at verða rikið við vinnuligum endamáli.

Eitt sovorðið virki má roknast sum ítriv og kann tí ikki skrásetast sambært meirvirðisgjaldslógini. Tílík virki kann hóast hetta fáa loyvi at vera skrásett framyvir, um útlit eru fyri, at tað kemur at geva yvirskot. Eisini má metast, um skattavaldið metir virki at verða rikið vinnuliga. At eitt virki (felag) sambært viðtøkum ella líknandi er ætlað at hvíla í sær sjálvum ella at geva undirskot, merkir ikki treytaleyst, at aktiviteturin sambært meirvirðisgjaldslógini skal metast sum ikki vinnuligur.

Eitt virki, ið sambært vanligum roknskaparreglum gevur undirskot, kann, t.d. um útreiðslurnar fyrst og fremst eru ikki meirvirðisgjaldsskyldugar lønir, geva meirvirðisgjaldsyvirskot.

Søla av leysafæ hjá einstaklingi (egnum innbúgvi o.t.) og søla av brúktum innbúgvi og rakstrargøgnum hjá ikki skrásetingarskyldugum virkjum førir ikki við sær skyldu at rinda avgjald. Men selur virki bert vørur, sum eru móttiknar í umboðssølu ella søluumboði, skal avgjald rindast.

Virki skulu harumframt vera sum sjálvstøðug. Soleiðis skal ikki rindast avgjald av tænastum, sum verða gjørdar av leyst settum hjálparfólki, t.d. handilshjálparfólki, húshjálp, vaskifólki og ørindafólki, ið øll mugu sigast í ein ávísan mun at vera sett í starv hjá tí, sum arbeiðið verður gjørt fyri, og tí mugu roknast sum lønmóttakarar.

Trotabúgv, deyðsbúgv v. m., ið føra skrásett virki víðari, skulu eisini rinda avgjald.

Útlendsk virki, ið reka avgjaldsskyldugt virksemi her á landi (t.d. við entreprenørarbeiði, arbeiði sum útlendskir montørar gera í samband við tænastu ella útleigu av vørum), skulu somuleiðis skrásetast og rinda avgjald.

**Til § 3, 2. stk.**
Virki, ið ikki selja, men bert framleiða vørur ella gera avgjaldsskyldugar tænastur til egna nýtslu, eru ikki beinleiðis umfevnd av lógini. Landsstýrið kann tó sambært fyriskipanum í § 3, 2. stk. í lógini áseta, at tílík virki skulu rinda avgjald. Tílík avgjaldsskylda kann áleggjast bæði vanligum vinnuvirkjum og feløgum og feløgum og ríkis-, lands- og kommunalum stovnum.

Hesar reglur eru at nýta í førum, har kappingarorsøkir í serligan mun tala fyri tí, og har tað í ítøkiligum føri kann ávísast, at ikki skrásetingarskyldug virki, feløg, stovnar v. m. tarna søluni hjá skrásettum virkjum vegna meirvirðisgjald, t.d. tí at tey í stóran mun sjálvi framleiða vørur ella gera arbeiði til egna nýtslu.

Landsstýrið kann t.d. í samráð við nevndina í § 35 áseta, at tað almenna ella kommunur skulu rinda avgjald fyri arbeiði, t.d. reingerð og prosjektering, ið verður gjørt av egnari arbeiðsmegi, um hetta virkar kappingaravlagandi fyri onnur skrásett virki.

Vandi kann t.d. vera fyri omanfyri nevndu kappingaravlagingum í byggivinnuni. Byggir ein húsasmiður, ið er meirvirðisgjaldsskrásettur, eitt hús fyri egna rokning og síðani selur tað, skal meirvirðisgjald ikki rindast av hesum, uttan so at henda regla verður sett, av tí at føst ogn ikki verður rokna fyri vøru. Byggir húsasmiðurin eini hús fyri annars rokning, er tað ein tænasta viðvíkjandi fastari ogn, og er hon tí meirvirðisgjaldsskyldug.

Fyri ikki at gera mismun á um húsasmiðurin selur húsini, áðrenn ella aftaná at tey eru bygd, ásetir landsstýrið í kunngerð, at tann (persónur ella virki), sum á egnari grund (fyri egna rokning) ger bygning til sølu ella útleigu, skal rinda avgjald av tí arbeiði við verkætlan og bygging, sum verður gjørt av viðkomandi og hansara starvsfólki, og av tí tilfari, ið nýtt verður til hetta arbeiði.

Tað sama ger seg galdandi, tá ið starvsfólk hjá einum avgjaldsskyldugum virki byggja ella umvæla bygning hjá virkinum. Skylda at gjalda meirvirðisgjald fellur í tí løtu, tá tað er eyðsað, at søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum hjá virkinum fara upp um kr. 50.000 árliga.

Um avgjaldsskylduga virðið annars við bygging fyri egna rokning verður víst til § 8, 3. stk.

Reglan ásetir eisini, at kommunur kunnu fáa meirvirðisgjald endurrindað, sum tær í ávísum førum hava goldið fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið eru keyptar frá vinnurekandi.

Hetta ger seg galdandi, tá ið kommunur eins væl kunnu seta fólk til at gera tað arbeiðið, ið annars skuldi verið keypt uttanífrá. Tað kann vera reingerð, arkitektatænastur og tænastur frá ráðgevandi verkfrøðingum.

At ein kommuna av og á keypir vørur og avgjaldsskyldugar tænastur er ikki nóg mikið til at koma undir hess reglu.

**Virki, ið ikki skulu gjalda avgjald.**

**Til § 3, 3. stk.**
Søla av gassi, vatni, ravmagni og hita førir ikki við sær skyldu at rinda avgjald, tá latingin fer fram sum liður í útleigu av húsi ella húsarúmi.

Henda frítøka frá skrásetingarskylduni er grundað á, at útleiga av húsi ella húsarúmi (fastari ogn) vanliga ikki er umfatað av avgjaldsskylduni, tí eru viðkomandi útleigarar ikki skrásetingarskyldugir. Um avgjørt varð, at gass-, vatn-, ravmagns- og hitaveitingar altíð skuldu verið avgjaldsskyldugar, hevði hetta ført við sær, at næstan allir umrøddir útleigarar kortini høvdu verið skrásetingarskyldugir, við tað at nevndu latingar í flestu førum fylgja við leigumálanum.

Um gass-, vatn-, ravmagns- og hitaveiting fer fram í samband við útleigu av høli til eitt skrásett virki, kann útleigarin tó lata seg skráseta. Lating av gassi, vatni, ravmagni og hitaveiting førir annars altíð við sær skrásetingarskyldu.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 6.

**Til § 3, 4. stk.**
Søla hjá listáfólki av tí slagnum, ið hoyrir undir toll- og vøruskránna vøruflokk nr. 9701-9703, hevur ikki við sær skyldu at gjalda meirvirðisgjald.

Undir hesar vøruflokkar koma t.d. málningar, pastellur, og tekningar, ið burturav eru gjørd við hond, "original stik", prent og litografi og upprunaligar (originalar) standmyndir.

Fritøka fyri at rinda meirvirðisgjald kann eisini fevna um sølu av listaverkum á listaframsýning (í hesum sambandi søluframsýningar hjá listafólkasamtøkum) og frá feløgum fyri listafólk. Hetta er tó treytað av, at sølan fer fram í navninum hjá einstøkum listafólki og fyri rokning hjá viðkomandi, soleiðis at framsýningin ella felagið bert virkar sum umboð (formidler).

Tá ið metast skal, um talan er um umboð, verður dentur eisini lagdur á, um listafólkið hevur fullan ognarrætt til listaverkið, til sølan er framd.

**Til § 3, 5. stk.**
Útleiga hjá skúlum og skeiðvirksemi av hølum og servering í samband við egna undirvísing hevur ikki víð sær skyldu at gjalda meirvirðisgjald.

Frítøka er t.d. galdandi fyri háskúlar, eftirskúlar, fakskúlar og annað skeiðvirksemi, har uppihald við mati verður veitt í tilknýti til egnu undirvísing skúlans.

Reglurnar føra við sær, at t.d. ein háskúli, ið leigar kømur og/ella selur mat til næmingar á

skúlanum, ikki skal gjalda meirvirðisgjald av hesum virksemi. Hetta er eisini galdandi, hóast útleigan fer fram í styttri tíðarskeið enn 1 mánað, samanber § 2, 3. stk. punkt h.

Um skúlin leigar út kømur og t.d. selur mat til gestir uttan samband við egna undirvísing annars, skal skúlin rinda meirvirðisgjald sambært vanligu reglunum.

**§ 4. Tann, sum hevur eina árliga sølu av vørum og tænastum, ið er minni enn 20.000 kr., skal ikki rinda avgjald sambært § 3.**
2. **stk. Landsstýrið kann áseta reglur, soleiðis at onnur virki verða frítikin fyri at rinda avgjald sambært** § **3.**

**Til § 4, 1. stk.**
Eitt virki hevur ikki skyldu at gjalda meirvirðisgjald, um so er, at søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum ikki fer upp um kr. 20.000 árliga, tað merkir prinsipielt innan eitt tilvildarligt 12 mánaða tíðarskeið.

Tá ið søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum verður uppgjørd í relatión til 20.000 kr. markið, skulu allir meirvirðisgjaldsskyldugir aktivitetir hjá virkinum roknast við til tær 20.000 kr. Tá ið uppgjørrt verður, skal kortini ikki hugsast um studning frá tí almenna v. m., uttan so at studningurin er soleiðis vorðin, at hann skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, samanber viðmerkingarnar til § 7.

**Til § 4, 2. stk.**
Sambært § 4, 2. stk. kann landsstýrið frítaka serligar bólkar av virkjum fyri at rinda meirvirðisgjald.

Orsøkirnar at nýta hesa reglu kunnu vera rættiliga ymiskar í hvørjum einstørkum føri. Sum dømi um hetta kunnu nevnast ymisk kappingarviðurskift, ikki tilætlað tvískatting, sosial viðurskifti og teknisk eftirlits- og fyrisitingarlig viðurskifti, og tá ið inntøka landskassans í seinast nevnda førri samstundis má metast at verða av lítlum og ongum týdningi.

Reglan er í fyrstu atløgu ætlað t.d. blindum, ið selja vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, bjargingarfeløgum, bankum og tryggingarfeløgum, ið selja vørur, ið eru afturtiknar orsakað av mislíkahaldi, og tannlæknum og tannteknikarum, ið framleiða úrtøkuligar eftirgjørdar tenn.

**§ 5. Tann, sum sambært §§ 3-4 skal rinda avgjald, skal fráboða virki sitt til skrásetingar hjá Toll- og Skattstova Føroya. Hetta er eisini galdandi fyri útlendsk virki. Hevur eitt virki ikki deild ella tílíkt her á landi, skal tað skrásetast við persóni, ið er búsitandi her á landi, ella við virki, sum hevur sølustað her á landi.**
**2. stk. Hevur viðkomandi fleiri virki, skulu hesi fráboðast til skrásetingar undir einum. Verður roknskapur førdur fyri hvørt virki sær, kunnu virkini kortini eftir áheitan verða skrásett hvørt sær.**
**3. stk. Skrásetingarskyldug virki, sum ikki hava sama ánara, kunnu eftir áheitan**

**verða skrásett undir einum.**
**4. stk. Virki, sum verða skrásett undir einum, eru at rokna sum eitt virki.**
**5. stk. Fráboðan til skrásetingar skal fara fram í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn virksemi byrjar. Broytingar í ánaraviðurskiftum, leiðsluábyrgd ella staði skulu fráboðast, áðrenn 8 dagar eftir, at broytingin er farin fram.**
**6. stk. Skrásett virki fáa útflýggjað prógv um skráseting.**
7. **stk. Virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, skulu fráboða virki sítt til skrásetingar hjá Toll- og Skattstova Føroya í seinasta lagi 31. oktober 1992.**

**Til § 5, 1. stk.**
Virki, ið skulu rinda avgjald, í hesum sambandi eisini virki, sum áløgdum er at rinda avgjald, skulu sjálv boða tollvaldinum frá, at tey skulu skrásetast. Virkið fær prógv um skrásetingina.

Í mótsettum føri skulu virki, ið ikki skulu rinda avgjald, ikki boða frá til skrásetingar. Skylda at rinda avgjald og harvið skylda at boða frá til skrásetingar fellur, tá ið tað er eyðsæð, at søla virkisins av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum fer at koma upp um kr. 20.000 um árið, samanber § 4, 1. stk.

Virki, hvørs søla ikki fer upp um kr. 20.000 árliga, eru eins og áður nevnt ikki skrásetingarskyldug, men virki av hesum slag kunnu skrásetast eftir áheitan. Hetta kann hava týdning fyri virki, hvørs latingar bert fara fram til onnur skrásett virki ella til útflutning.

Trotabúgv, deyðsbúgv o.t. eftir skrásett virki skulu skrásetast undir nýggjum tali fyri at avgreiða virkið v.m., ið farið er á húsagang.

Útlendsk virki, ið her á landi reka avgjaldsskyldugt virksemi, og sum ikki hava deild ella tílíkt her á landi, skulu boða frá til skrásetingar við persóni, ið er búsitandi her á landi, ella við virki, ið hevur handilsstað her á landi. Útlendska virki og umboðið her á landi hava samábyrgd fyri, at avgjald verður rindað.

Noktar skrásetingarskyldugt virki at boða frá til skrásetingar, skipar tollvaldið fyri, at skráseting fer fram (tvingsilsskráseting).

Er spurningurin um eitt virki skal rinda avgjald ivasamur, skal virkið skrásetast.

Eitt sovorðið virki eigur tó at sleppa undan at rinda avgjald, til spurningurin viðvíkjandi avgjaldsskylduni er avgjørdur av nevndini, ið er nevnd í § 35.

Orsakað av, at hvør einstakur íognari ábyrgdast persónligt, solidariskt og beinleiðis fyri skuld hjá íognarafelagnum, er hvør einstakur íognari skrásetingarskyldugur.

**Til § 5, 2. stk.**
Hevur tann, ið skal skrásetast, fleiri handilsdeildir, framleiðsludeildir, latingardeildir ella tílíkt, verður skrásett undir einum. Verður roknskapur førdur fyri hvørt virki ella hvør á deildina sær, kunnu hesi tó eftir áheitan skrásetast hvørt sær (lutaskráseting).

**Til § 5, 3. og 4. stk.**
Virki, ið ikki hava sama ánara, kunnu eftir áheitan skrásetast undir einum. Felagsskrásett virki verða í samband við avgjald roknað fyri eitt virki. Felagsskráseting førir við sær, at virkini ikki skulu rinda avgjald við sølu sínámillum, og at viðkomandi hava samábyrgd fyri, at avgjald verður rindað.

**Til § 5, 5. og 6. stk.**
Fráboðan til skrásetingar skal fara fram í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn avgjaldsskylduga virksemi byrar.

Fráboðan skal undirskrivast av handhava virkisins (e) (einmansvirki, íognarfelag, og lutareiðarí). Fyri partafelog skal fráboðanin undirskrivast av tí (n), ið hevur tekningarrættindi, og fyri felog av formanni leiðslunnar.

Er handhavi ella ábyrgdarhavandi á virkinum ikki myndigur (ikki fyltur 18 ár), skal viðkomandi virki skrásetast við verjanum, og skrásetingfráboðan skal undirskrivast bæði av aldursómyndinginum og av verjanum.

Broytingar í viðurskiftum hjá skrásettum virki skulu skrivliga fráboðast tollstovuni innan 8 dagar eftir, at broytingin er farin fram.

Hetta er galdandi, um broytingar eru í ábyrgdarhavandi leiðslu (stjóra o.t.), navnabroyting, broyting í bústaði, tali á smásølum, latingardeildum v. m.

Tann, ið heldur uppat at reka skrásetingarskyldugt virki (t.d. við sølu), skal boða frá og siga seg undan skrásetingini. Sama er galdandi, um aðrar broytingar fara fram í eigaraviðurskiftum á einum virki, sum føra við sær broytingar í gjaldsábyrgdini á virkinum.

Prógv um skráseting skal útflýggjast skrásettum virkjum.

**§ 6. Landsstýrið kann áseta reglur um skráseting eftir áheitan frá virkjum, sum selja aðrar tænastur enn tær, ið sambært § 2 eru avgjaldsskyldugar (sjálvboðin skráseting).**
**2. stk. Virki, ið eru sjálvboðin skrásett, skulu rinda avgjald av sølu av tænastum, sum eru umfevndar av sjálvbodnu skrásetingini.**
**3. stk. Sjálvboðin skráseting kann í fyrsta lagi halda uppat 2 ár eftir skrásetingina.**

**Til § 6**

Fyri at geva møguleika fyri at virki, ið selja aðrar tænastur enn tær sambært § 2 avgjaldsskyldugu tænastur, skulu hava møguleika fyri at føra meirvirðisgjald víðari til skrásett virki, er sett ein regla í § 6, har ið landsstýrið kanra áseta reglur um, at virki, ið selja aðrar tænastur enn tær, ið sambært § 2 eru skrásetingarskyldugar, kunnu skrásetast eftir áheitan.

Ein tílík skráseting verður nevnd sjálvboðin skráseting (- má ikki mistakast við skráseting av virkjum, hvørs árliga søla er minni enn kr. 20.000).

Sjálvboðin skráseting førir við sær, at virki sambært vanligu reglunum skulu rinda avgjald av annars avgjaldsfríum tænastum, ið eru umfevndar av sjálvbodnu skrásetingini.

Sjálvboðin skráseting kann hava týdning fyri virki, sum í samband við sølu til skrásett virki ella til útflutning av sínum tænastum nýta fíggjarkrevjandi útgerð.

Virki, ið sjálvboðin lata seg skráseta skulu sum nevnt rinda avgjald, tá ið tey selja tænastur, og skrásettir móttakarar kunnu draga hetta avgjald frá sum inngangandi avgjald. Samstundis kunnu sjálvboðin skrásett virki, draga avgjald, ið er goldið av útgerð v.m., frá sum inngangandi avgjald, tá ið tey avrokna sítt egna avgjald til landskassan.

Av praktiskum orsøkum er ásett, at sjálvboðin skráseting bert kann fara fram fyri eitt tíðarskeið, ið er í minsta lagi 2 ár roknað frá tí degi, tá ið virkið varð skrásett.

Ætlan landsstýrisins er at áseta reglur, ið loyva sjálvbodna skráseting, tá ið fest ogn verður leigað út til annað endamál enn bústað og umsiting av fastari ogn.

Sambært § 3, 3. stk. skal avgjald ikki rindast fyri lating av gassi, vatni, ravmagni og hita, tá ið hetta verður latið sum liður í útleigu av húsi ella húsarúmi.

Fyri at ein meirvirðisgjaldsskrásettur leigari skal hava frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald, má meirvirðisgjaldsskrásetingin hjá útleigaranum eisini fevna um hesar latingar.

**Vinnuskráin**

Tá ið byrjað varð at gera nýggja toll- og avgjaldsskipan í september 1990, var beinanvegin greitt, at neyðugt varð at gera eina landsumfatandi edv-loysn viðvíkjandi toll- og avgjaldsskipanini.

Áðrenn hetta hevði Føroya Tollstova bert edv á høvuðsdeildini í Tórshavn.

Tá ið fyrsti partur av tollskipanini varð tikin í nýtslu í februar 1992, var størsti partur av edv-skipanini gjørdur. Tó mangla framvegis nakrar serstakar edv-loysnir, ið væntandi verða lidnar í heyst í ár.

Edv-skipanin, ið er gjørd, fevnir um eina vinnuskrá, har ið allir vinnuligir innflytarar og annars øll, ið verða meirvirðisgjaldsskyldug, skulu skrásetast.

Fyri virki, ið verða skrásett sambært meirvirðisgjalds- og tolllógini, verður skrásetingin harumframt grundardag undir stýringini av og eftirliti við avrokning hjá virkjunum av avgjaldi, rykkjaraskrivum og tilfari til Føroya Gjaldstovu at nýta til at fáa inn eftirstøður. Toll- og avgjaldsskráin verður harumframt nýtt at adressera "aperiodiskar" sendingar til

skrásett virki. At enda er ætlanin at samarbeiði skal vera við Hagstovuna og Føroya Líkningarráð, ið kann faa/fær allar upplýsingar í Toll- og avgjaldsskránni.

Virki, ið verða skrásett í Toll- og avgjaldsskránni, kunnu býtast upp í privatar juridiskar eindir og almennar eindir.

**Privatar juridiskar eindir:**
Einmansfyritøkur
Íognarfeløg
Samløguíognarfeløg (kommanditselskaber)
Partsreiðarí
Deyðsbúgv og trotabúgv
Partafeløg
Lutafeløg
Sjálveigandi stovnar
Feløg
Útlendsk virki
Annað, í hesum sambandi feløg við avmarkaðari ábyrgd

**Almennar eindir:**
Ríkisstovnar
Landsstovnar
Kommunalir stovnar
Fólkakirkjuligt virkni, í hesum sambandi eisini
"Blandaðir" stovnar

Tá ið virki á henda hátt verða býtt upp, er høvuðsdentur lagdur á ábyrgdarviðurskifti. Ábyrgd kann vera knýtt at samlaðari ogn (formue) hjá einum ella fleiri persónum ella vera avmarkað til felagsogn og ísettan pening í feløg v. m.

Í Toll- og avgjaldsskránni verða identitetsupplýsingar um hvørja einstaka skrásetingar-eind og upplýsingar at nýta til fyrisiting.

Toll- og avgjaldsskráin hevur fylgjandi upplýsingar um hvørt einstakt virki:

**Identitetsupplýsingar**
- nummar
- starv og persónsnavn ella virkisnavn - gøtu- og postbústaður - telefonnummar
- postgirokontonummar - P/F-nummar ella

**Fyrisitingarligar upplýsingar**
Fyrisitingarligar upplýsingar, ið verða nýttar at stýra ymiskar eftirlits- og fyrisitingarligar uppgávur, fevnir m.a. um:

- kommunukotu
- sendingarupplýsingar

- seinast kannaða avgjaldstíðarskeið
- ognarviðurskifti
- upplýsingar um einstøku skrásetingarviðurskiftini, í hesum sambandi kotu fyri
    - lógarøki
    - avrokningartíðarskeið
    - skrásetingardagfesting
    - endadagfesting
- vinnugreinskota
- møguligar ávísingar til onnur toll- og avgjaldsnummur

## III. AVGJALDSSKYLDUGA VIRÐIÐ

**§ 7. Við sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum er avgjaldsskylduga virðið, samsýningin, ikki íroknað avgjaldið sambært hesi lóg.**
**2. stk. Við í avgjaldsskylduga virðið skal roknast:**
**a. Tey avgjøld sambært øðrum avgjaldslógum, sum eru uppkravd í undanfarnum søluliðum, ella sum skulu rindast í samband via innflutning úr útlondum, ella sum eitt virki hevur skyldu at gjalda í samband via viðkomandi sølu.**
**b. Tær útreiðslurnar til pakking, sending, trygging og tílíkt, sum eru við í prísinum, ella sum latarin krevur serstakt gjald fyri frá móttakaranum.**
**c. Íbindingar- og stovningargjald og aðrar upphæddir, sum latarin krevur frá móttakaranum sum treyt fyri, at vørur og avgjaldsskyldugar tænastur kunnu verða latnar.**
**d. Umboðsløn o.t. og uppboðssøluløn.**
**e. Kassaavsláttur og annar avsláttur, ið er treytaður av krøvum, sum ikki eru lokin við latingina (faktureringina).**
**f. Ískoyti til avgjalding og fígging o.t.**
**3. stk. Rentur, ið vera roknaðar av tí til eina og hvørja tíð skylduga partinum av keypspeninginum, kunnu haldast uttan fyri avgjaldsskylduga virðið, treytað av at tað er ávíst í keypssáttmálanum ella fylgiskiali viðvíkjandi gjalding, hvussu stórur partur rentan er av hvørjari einstakari gjalding.**

**Til § 7, 1. stk.**
Meirvirðisgjaldsskylduga virðið er avgjaldsgrundarlagið ella tað virðið, ið er grundarlag, tá ið meirvirðisgjald skal roknast av eini lating ella av aðrari veiting, sum forir við sær meirvirðisgjaldsskyldu, t.d. úttøku til handhavans egnu nýtslu av vørum frá goymslu hjá virki.

Tá ið vørur/tænastur verða seldar, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið samsýningin, ikki íroknað meirvirðisgjald.

Tað er uttan týdning, um samsýningin verður veitt sum ein "eingangs"samsýning ella við regluligari rindan.

Móttekur eitt virki rindan fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar í fremmandum valuta til ein avrundaðan kurs, og valuta seinni verður veksíað í peningastovni til ein hægri kurs, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið tann upphædd, ið verður útgoldin, tá ið vekslað verður til DKK.

Virki, ið móttaka eitt (leysoyra-) veðbræv sum heil ella partvis rindan fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar, skulu rokna áljóðandi virði á veðbrævinum við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, hóast kursurin er undir pari.

Meirvirðisgialdsskylduga virðið fyri bygging, tá ið byggivirki móttaka privat veðbrøv frá ánaranum sum rindan fult ella partvíst fyri tað, ið bygt er v, m., kann tó ásetast sambært reglum í § 8, 2. stk. (analogt).

Trygd, t.d. bankatrygd og trygging ella ognarveðbrøv, sum latarar krevja frá keyparanum við atliti til, at hesir skulu luka treytir í samsvari við avtalur, ið gjørdar eru um latingar av vørum/tænastum, ávirka ikki meirvirðisgjaldsskylduga virðið, so leingi sum latararnir ikki fáa inntøku við hesum.

**Til § 7, 2. stk. a**
Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast tey avgjøld í samsvari við aðrar lógir, ið eru uppkravd í undanfarnum søluliði, ella sum skulu rindast í samband við innflutning úr útlondum, ella sum virki skal gjalda í samband við viðkomandi sølu.

Sambært hesum skulu øll (punkt) avgjøld, ið eru goldin í undanfarnum søluliðum, ella sum eitt virki skal rinda í samband við sølu, roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Selur eitt virki vøru fyri eina upphædd, ið er lægri enn tollur, og møguligt (punkt) gjald, ið eru goldin við innflutning, er avgjaldsskylduga virðið hesi gjøld. Viðvíkjandi meirvirðisgjaldi við innflutning verður víst til § 27.

Skrásetingargjald, ið verður rindað í samband við sølu av bilum, skal tó ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Hetta stendst av, at hetta avgjald prinsipielt skal rindast av honum, í hvørs navni akfarið verður skrásett (keyparanum).

**Til § 7,2. stk. b**
Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast tey avgjøld til pakking, sending, trygging o. t., sum eru við í prísinum, ells sum latarin krevur, at móttakarin skal rinda serstakt gjald fyri.

Sambært hesum skulu allar útreiðslur í samband við sølu av vørum/tænastum hjá einum virki prinsipielt roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, undantikið tá ið keyparin fráheldur útreiðslurnar, t. d. við sjálvur at lata pakkitilfar, við at tekna flutningstrygging ella við at skipa fyri flutningi.

Sum dømi um útreiðslur, ið skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, kunnu

nevnast:

- brævaporto og pakkaporto, ið skal rindast av keyparanum.

Tað er uttan týdning um tílíkar útreiðslur viðvíkja avgjaldsfríum tænastum, tá ið tær eru roknaðar við í eina lating av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

útreiðslur til ferð, kost og innivist fyri starvsfólk hjá seljaranum- í ávísum førum kunnu hesar útreiðslur tó haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið (samanber reglu um útreiðslur, sum eru nevndar seinast í viðmerkingunum til § 7).

**Til § 7, 2. stk. c**

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast íbindingar- og stovningarútreiðslur og aðrar upphæddir, sum latarin krevur frá móttakaranum sum treyt fyri lating av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Reglan hevur sum mið at tryggja meirvirðisgjaldsjavnstøðu millum virki, ið krevja "eingangs"upphædd við byrjan av regluligum latingum, og virki, ið ikki krevja tílíkar "eingangs"upphæddir, men sum harafturímóti krevja eitt samsvarandi hægri gjald fyri regluligar latingar.

Reglan hevur haraftrat sum endamál at tryggja, at stovningarútreiðslur hjá einum virki ikki verða hildnar uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, tá ið "eingangs"upphædd verður uppkravd frá keyparanum til at gjalda hesar útreiðslur, soleiðis at virkið kann sleppa undan meirvirðisgjaldi.

Uppkrevjing av "eingangs"upphædd sum treyt fyri latingar av vørum/tænastum verður serliga nýtt av virkjum, ið veita gass, vatn, ravmagn og hita og av telefonverkinum.

Harumframt verða "eingangs"upphæddir ofta uppkravdar, tá ið bátapláss verður leigað út, og tá ið rakstrargøgn verða leigað út ella leasað.

"Eingangs"upphæddir, ið skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, fevna t.d. um ibindingar- og stovningaravgjøld, innskot og trygdarfæ (deposita). Upphæddirnar skulu roknast við, hóast hesar einans eru fyribils inngoldnar sum trygd fyri ábyrgd keyparans. Verða meirvirðisgjaldsskyldugar upphæddir seinni afturrindaðar, t.d. tá ið leigumáli endar, kann meirvirðisgjaldsskylduga sølan hjá virkinum tó verða útjavnað.

Í samband við avdrátt fyri útreiðslur til íbinding og stovning v. m. skulu bæði rentur og avdráttur roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Peningur, ið verður settur í eitt felag í staðin fyri ibindingargjald, skal roknast við í avgjaldsskylduga virðið á latingum til brúkarar, í førum tá ið hetta ikki verður afturrindað, tá ið viðkomandi persónur fer úr felagnum. Verður peningurin afturgoldin, tá ið persónur

fer úr felagnum, skal peningurin ikki roknast við í avgjaldsskylduga virðið.

**Til § 7, 2. stk. d**
Søluútreiðslur sum t. d. umboðsløn (agentprovision) og uppboðssøluløn (auktionssalær), servisu- og reklamuútreiðslur og gjald fyri brúk av patentrættindum skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal roknast umboðsløn (provisión) o.t. og uppboðssøluløn (auktionssalær).

Fyri vørur seldar á uppboðssølu er meirvirðisgjaldsskylduga virðið sostatt **boðið** + **ómaksløn.**

**Til § 7, 2. stk. e**
Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skulu roknast kassaavsláttur og annar avsláttur, ið hava treytir, ið ikki eru loknar við latingina (faktureringina).

Sostatt skal meirvirðisgjald roknast av fulla søluprísinum, uttan at treytaður kassaavsláttur, bonus- og o. t. er drigið frá.

Hóast ein treytaður avsláttur verður effektivur seinni, kann lækking í meirvirðisgjaldsskylduga virðinum ikki fara fram. Um so er, at avslátturin viðvíkur latingum til meirvirðisgjaldsskyldug virki, kann tó sambært ávísum treytum útjavnast í meirvirðisgjaldsskyldugu søluni (samanber viðmerkingar til § 13, 7. stk.).

Avsláttur, ið er veittur treytaleyst við latingina (faktureringina), skal ikld roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Verður fakturi útflýggjaður, kann avsláttur bert haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, um hann treytaleyst er frádrigin í fakturaupphæddini, áðrenn meirvirðisgjaldið varð roknað.

Fylgjandi dømi lýsa meirvirðisgjaldsviðgerð av avsláttri v.m.:

- **Avsláttur vegna gjalding frammanundan.** Avsláttur, ið er veittur, orsakað av at viðskiftafólk hava goldið frammanundan undir ymsum sparingarskipanum, skal ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Her er talan um avsláttur, hvørs treytir eru loknar, tá ið vørurnar verða latnar, og meirvirðisgjaldsskylduga virðið kann sostatt ásetast til tann prís, sum viðskiftafólkið rindar fyri vørurnar (samsýningina).

- **Avsláttursseðlar.** Virðið á avsláttursseðlum, ið virkið sendir út í samband við reklamutiltak, og sum móttakarin kann nýta sum partvís rindan, tá ið hann í smásølu keypir ávísar vørur, ið eru tilskilaðar á seðlinum, kann smásølan ikki halda uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

- **Avsláttursmerki.** Virðið á avsláttursmerkjum, sum verða handað keyparum, tá ið vera verður seld, og sum eru at klistra í avsláttarshefti og verða loyst seinni, skulu roknast við

í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

**Til § 7, 2. stk. f**
Við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal roknast ískoyti til kredit, fígging, v.m.

Reglan skal síggjast í samband við § 7, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini, sum ásetir, at vanligar kreditrentur undir ávísum treytum kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Burtursæð frá § 7, 3. stk. er meginreglan, at ískoyti í samband við fígging, sum ein latari krevur frá viðskiftafólki sínum, tá ið vørur/tænastur verða seldar við krediti, skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

**Til § 7, 3. stk.**
Rentur, ið verða roknaðar av tí til eina og hvørja tíð skylduga partinum av keypsprísinum, kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, treytað av at tað sæst á keypssáttmála ella fylgiskjali viðvíkjandi gjaldingum, hvussu stórur partur rentan er av hvørjari einstakari gjalding.

Sum dømi um at rokna rentu, ið lýkur treytirnar fyri at halda rentuna uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, kann nevnast:

- Kreditsøla, har seldi luturin verður verandi ogn seljarans, til allur keypsprísurin, íroknaður kreditrentur, er goldin (søla við ognarfyrivarni). Kreditrentan verður uppgjørd mánaðarliga (tá ið handilin verður gjørdur, er støddin sostatt ókend) og verður roknað sum ein prosentpartur av ultimosaldo fyri viðkomandi mánað.

Tað sæst ikki í fylgiskjølunum viðvíkjandi hvørjari einstakari gjalding, hvussu stórur partur av inngoldnu upphæddini er rentur, men virkið sendir hvønn ársfjórðing kontoavrit, har m.a. inngjaldingar, rentur og avdráttur eru tilskilað.

Upphæddir/gjøld, sum eitt virki fær frá viðskiftafólki sum afturrindan av útreiðslum, ið virkið hevur havi í navninum hjá viðskiftafólkinum og fyri rokning hjá viðkomandi, kunnu í ávísum førum haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið fyri tær tænastur, sum virkið hevur gjørt fyri viðskiftafólkið.

Hetta er tó treytað av, at tað ikki snýr seg um útreiðslur, ið sambært vanligum reglum skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið sum vanligar útreiðslur fyri virki, tá ið meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða gjørdar fyri viðskiftafólk.

Treyt fyri at halda hesar útreiðslur uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, er eisini:

*at* vinningur ikki verður roknaður av teimum,

*at* serligar útreiðsluuppgerðir kunnu útvegast kundanum viðvíkjandi útreiðslunum (kann útgreinast serstakliga sum útreiðsla í faktura viðvíkjandi meirvirðisgjaldsskyldugum latingum), og

*at* upprunaligu skjølini viðvíkjandi útreiðslunum verða send víðari til viðskiftafólkið.

Harumframt skal kunna greiðast frá útreiðslum og inntøkum viðvíkjandi umrøddu útreiðslum.

Virkið hevur ikki frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av útreiðslum til keyp, ið verða viðgjørd sum útreiðslur fyri viðskiftafólkið.

Fyri virki hava reglurnar sostatt bert veruligan týdning, hvat meirvirðisgjaldi viðvíkur, tá ið tað snýr seg um útreiðslur av keyptum tænastum, ið ikki eru meirvirðisgjaldsskyldugar (t.d. fólkaflutningur), ella útreiðslur, sum virkið ikki hevur rætt at draga frá.

Sum dømi um útreiðslur, ið sambært omanfyri standandi treytum kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið, kunnu nevnast:

- útreiðslur til metingarmenn og samsýningar til serkøn vitni,
- útreiðslur fyri avgjald til tað almenna fyri at avgreiða mál,
- útreiðslur fyri almennar váttanir/"attestir",
- útreiðslur til tónleik, sum hotell fáa til vega eftir áheitan frá vitjandi, og sum verða afturrindaðar av tí vitjandi. Samsýningar fyri tónleik, sum eitt hotell letur við starvsfólk ella við persónum, ið eru settir av hotellinum, kunnu harafturímóti ikki haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Ráðgevandi virki, t.d. advokatar, arkitektar, verkfrøðingar, grannskoðarar, ráðgevar, kunnu halda ferðaútreiðslur, tað er útreiðslur til ferðir, steðg og mat v.m., uttanfyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið treytað av,

*at* vinningur ikki verður roknaður av hesum útreiðslum,
*at* ein serlig uppgerð yvir útreiðslur verður útvegað kundanum viðvíkjandi útreiðslunum, og
*at* upprunaligu fylgiskjølini verða send kundanum.

Tað, sum flutningsfyritøkur gjalda fyri flutning og av- og áskipan í samband við flutningin, sum aðrar fyritøkur hava framt, kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga virðið sum eitt úttak fyri viðskiftafólkið.

Útreiðslur í samband við sigling við ferju kunnu ikki roknast at vera úttak fyri viðskiftafólkið, men mugu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið fyri flutningin.

Stuðul, ið kann metast at vera samsýning ella ein partur av samsýningini fyri vørur/ tænastur, skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið.

Skrásett virki skulu sostatt rinda meirvirðisgjald av studningi, sum kann metast at vera beinleiðis ells óbeinleiðis rindaður fyri vørur/tænastur, sum virkið letur.

Hetta merkir m.a., at meirvirðisgjald vanliga skal rindast av studningi, sum eitt virki fær frá somu persónum, sum fáa vørur/tænastur frá virkinum, og meirvirðisgjald skal rindast av studningi til príslækkan á vørum/tænastum, tá ið hetta beinleiðis ella óbeinleiðis kemur studningsveitaranum til góðar.

Studningur, ið líkist gávum, skal ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, hóast tílíkur studningur kann ávirka prísin á vørum/tænastum, ið verða seldar av skrásettum vikrjum. Tað er tó ein treyt, at virkið als einki ger í staðin, fyri tann, sum veitir studning, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis.

Studningur, ið líkist gávu, er m.a. almennur studningur sum vanligar stuðulsskipanir til vinnuvirki og stovnar, tá ið einki ítøkiligt verður gjørt afturfyri.

Vanliga kann rættur til frádrátt fyri inngangandi meirvirðisgjald, ið stendst av, at virki fáa "meirvirðisgjaldsfrían" studning, ikki avmarkast.

Niðanfyri eru sett upp nøkur dømi, um hvørjar upphæddir annars skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið:

Tá ið t.d. entreprenørfyritøkur krevja endurgjald frá viðskiftafólkið, sum tær hava avtalu/ sáttmála við um lating av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, og móttakarin er atvoldin til broytingar í avtaluni, sum gera, at endurrindan verður kravd, tá skal endurgjaldið roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, um so er, at endurgjaldið má metast at vera ein partur av samsýningini fyri viðkomandi latingar.

Soleiðis er t.d., tá ið entreprenørfyritøkur krevja endurgjald, av tí at latingin er minkað, við tað at prísásetingin í sáttmálanum kann hava verið fyri eindarprís, ið er roknaður eftir upprunaliga avtalaðu latingini. Minkar latingin, kann vera neyðugt at hækka eindarprísin fyri at faa føstu útreiðslurnar innaftur. Eitt tílíkt endurgjald, ið skal svara føstu útreiðslunum, má metast at vera ein príshækking (partur av samsýningini).

Harafturímóti skal meirvirðisgjald ikki rindast av endurgjaldinum (verður ikki mett at vera samsýning), ið einans verður kravt, av tí at givin tilboð um lating av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum eru strikað, t.d. orsakað av at viðkomandi vøra ikki verður fullfíggjað.

Orsakað av at endurgjald, ið tryggingarfeløg veita fyri vørur v. m., ið eru mistar, t. d. orsakað av eldsbruna ella innbroti á virki, ikki er samsýning fyri eina vøru ella avgjaldsskylduga tænastu, skal meirvirðisgjald vanliga ikki rindast av sovorðnum upphæddum.

Gullsmiðir v. m. skulu rinda meirvirðisgjald av fulla søluprísinum, tá ið gullvørur v. m. verða seldar, sum eru framleiddar av egnum gulli (gull keypt ella fingið í býti frá einstaklingum), og sum hoyrir við til vanligu vørugoymsluna hjá virkinum. Um gullsmiðir gera

gullvørur fyri viðskiftafólk, ið sjálvi lata gulli at nýta til framleiðing av einari ávísari vøru, skal virkið bert rokna meirvirðisgjald av tí samsýning, sum viðskiftafólkið skal gjalda fyri framleiðing av viðkomandi vøru, og av samsýning fyri tað gull, ið framleiðarin møguliga leggur afturat.

Tá ið lastbilar við førara verða fluttir við ferju, er avgjaldsskylduga virðið ferðaseðlaprísurin, frádrigin vanligan prís fyri ein persónferðaseðil. Tað skal á ferðaseðlinum prógvast, av hvørjum prísi meirvirðisgjald er roknað.

Tá ið bátapláss verða leigað út, skal meirvirðisgjald rindast av samsýningini fyri hetta. Samsýningin fyri útleigu av "føstum" bátaplássi fevnir - umframt árliga leigu - vanliga eisini um møguligan innskotspening ella depositum, sum verður kravt frá leigaranum sum treyt fyri, at avtala kann verða gjørd um leigu ella sum treyt fyri at fáa yvirræðisrætt (dispositiónsrætt) fyri eitt bátapláss.

Tá ið føst ogn, t.d. hús, verður niðurbrotin, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið ásetast til ta samsýning, sum virkið tekur fyri at bróta niður. Virðið á brúktum tilfari, sum virkið tekur frá niðurbrotna húsinum, skal ikki roknast við í avgjaldsskylduga virðið. Verður brúkta tilfarið møguliga selt, skal meirvirðisgjald gjaldast.

Verður selt til starvsfólk, er søluprísurin meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Er søluprísurin minni enn keyps- ella framleiðsluprísurin, ymisk avgjøld íroknað, skal meirvirðisgjald roknast av keyps- ella framleiðsluprísinum.

Er vanligi søluprísurin hjá virkinum lægri enn keyps- ella framleiðsluprísurin, t.d. tá ið útsøla er, kann meirvirðisgjald tó roknast av hesum.

Stovningargjald skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið. Fellur stovningargjaldið heilt ella lutvíst burtur, av tí at haldarin í staðin keypir skuldarbrøv ella partabrøv í virkinum, skal meirvirðisgjald rindast grundað á vanliga stovningargjaldið.

Fyri vørur, ið eftir at hava verið leigaðar út við forkeypsrætti, verða seldar leigaranum fyri normalprís, frádrigin fyrr rindaða - og meirvirðisgjaldsavgreidda - leigu ella ein part av hesari, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið restupphæddin (endaligi søluprísurin).

**§ 8. Fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða brúktar av handhavanum av virkinum, er avgjaldsskylduga virðið keypsprísurin ella framleiðsluprísurin, ikki íroknað avgjaldið sambært hesi lóg, javnber tó 3. stk. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða brúktar til endamál, sum ikki viðvíkja sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum hjá virkinum, ella til endamál, sum nevnt í § 16, 3. stk. Við í avgjaldsskylduga virðið skulu roknast avgjøld, sum nevnt í § 7, 2, stk. punkt a. Hevur virki sjálvt innflutt vørurnar frá útlondum, verður eitt sambært reglunum í § 27, 2. stk. ásett virði við møguligum tolli løgdum aftrat, roknað sum keypsprísurin.**
**2. stk. Fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum heilt ella fyri ein part verða**

**latnar móti aðrari gjalding enn við peningi (býtishandil), er avgjaldsskylduga virðið vanligi prísurin hjá virkinum við sølu av viðkomandi vøru ella tænastu. Er eingin slíkur vanligur søluprísur, er avgjaldsskylduga virðið ein roknaður søluprísur, sum skal fevna um allar útreiðslur og vinning, sum vanliga verða roknað við í avgjaldsskylduga virðið fyri vørur ella tænastur av viðkomandi slagi.**
**3. stk. Fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum eitt virki nýtir við bygging av fastari ogn til nýtslu hjá handhavanum av virkinum, verður avgjaldsskylduga virðið ásett á tann hátt, sum er nevndur í 2. stk. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum virkið brúkar við bygging av fastari ogn fyri egna rokning, tá ið ognin skal nýtast til endamál, sum ikki viðvíkja keypi og sølu hjá virkinum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, herímillum til sølu ella útleigu, ella til endamál sum nevnt í § 16, 3. stk.**

**Til § 8, 1. stk.**
Í § 8, 1. stk. í meirvirðisgjaldslógini eru ásettar reglur um uppgerð av meirvirðisgjaldsskylduga virðinum í teimum førum, tá meirvirðisgjald skal rindast, tá ið vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða brúktar,

- til handhavans nýtslu
- til endamál, ið ikki viðkoma sølu virkisins av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ella
- til tey endamál, sum eru nevnd í § 16, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Fyri vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, ið virkið framleiðir ella selur, sum verða tiknar í nýtslu til endamál, ið ikki geva rætt til frádrátt, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið

**- keyps- ella framleiðsluprísurin (frároknað meirvirðisgjald), íroknað avgjøld.**

Hevur virkið sjálv innflutt vørurnar úr útlondum, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið tað virðið, ið vøran hevði, tá ið hon varð innflutt, og sum meirvirðisgjald var roknað av, tað merkir: Fakturaprísur, meirvirðisgjald og møgulig punktgjøld, ið eru goldin við innflutning.

Meirvirðisgjaldsskylduga virðið á tí úttikna skal gerast upp og skrivast upp, tá ið tikið verður úr virkinum.

Tá ið tað ikki er møguligt regluliga at skriva tað upp, sum fer til egna nýtslu hjá handhavanum, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið gerast upp grundað á eina meting yvir brúkið í meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum. Nýtslan kann møguliga gerast upp grundað á eitt mett ársbrúk.

Tá ið tollvaldið metir um tað, sum handhavin hevur nýtt av vørum v. m. hjá virkinum, er rætt sett upp í meirvirðisgjaldsroknskapinum, skal tann upphædd, sum líkningarráðið hevur sett av til hesa nýtslu, leggjast til grundarlag.

Eisini í øðrum førum, har tað ikki er møguligt regluliga at skriva upp tær vørur v, m. , ið verða tiknar, t.d. matur til starvsfólkið á matstovum, kunnu tær upphæddir, sum líkningarráðið góðkennir ella vanliga nýtir fyri hesa nýtslu, leggjast til grund, tá ið meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal gerast upp.

Er meirvirðisgjaldsskylduga virðið sambært tí, sum eitt virkið hevur skrivað upp av tiknum vørum v. m. til handhavans ella starvsfólksins egnu nýtslu, lægri enn tann upphædd, sum líkningarráðið hevur sett av til hesa nýtslu, skal meirvirðisgjaldsskylduga virðið hækkast samsvarandi.

Harumframt gevur § 9, 2. stk. í meirvirðisgjaldslógini møguleika fyri at áseta meirvirðisgjald, tá ið vørur/tænastur verða tiknar grundað á standardvirðið. Nærri reglur fyri hesum verða ásettar við kunngerð um áseting av meirvirðisgjaldi av egnari nýtslu.

Reglurnar verða ásettar fyri at skapa eina ávísa javnstøðu millum virki, ið kunnu taka vørur og tænastur til nevndu endamál frá egnari goymslu ella framleiðslu, og virki og einstaklingar v. fl., ið noyðast at keypa tílíkt aðrastaðni (uttan møguleika fyri at draga tað meirvirðisgjald, ið sostatt verður rindað, frá).

Tá ið rakstrargøgn verða úttikin til endamál, sum ikki gevur rætt til frádrátt av inngangandi meirvirðisgjaldi sambært § 16, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið, tá ið rakstrargøgnini eru undir virðisminkan,

**- keyps- ella framleiðsluprísurin, frároknað meirvirðisgiald, lækkaður við 20% fyri hvørt fulla ár, ið er farið síðani keypsdagin.**

Fyri rakstrargøgn, ið eru keypt uttan tilfakturerað meirvirðisgjald, skal lækkingin roknast av tí prísi, ið var goldin, tá ið keypt var.

Tá ið meirvirðisgjald verður uppgjørt, skulu útreiðslur av vanligum viðlíkahaldi og umvæling ikki roknast við.

**Dømi:**
Fingið til vega: 15. juni 1989
Tikið út: 10. apríl 1992

| | |
|---|---|
| Keypsprísur, meirvirðisgjald ikki íroknað | 20.000 kr. |
| Lækking 40 % (2 ár) | 8.000 kr. |
| Meirvirðisgjaldsskyldugt virði | 12.000 kr. |
| Meirvirðisgjald | 2.640 kr. |

Verður tikið út, eftir at 5 heil ár eru farin síðani tann dagin, tá ið viðkomandi rakstrargøgnini vóru fingin til vega, er meirvirðisgjaldsskylduga virðið 0 kr.

Tá ið rakstrargøgn, ið ikki eru undir virðisminkan, verða tikin út, kemur lækkingin, sum er 20%, ikki í nýtslu. Hetta merkir, at meirvirðisgjaldið í hesum førum skal roknast grundað á keypsprísin.

Málningar, standmyndir og onnur list og ektað teppi verða mett - um rættur er at draga meirvirðisgjald frá, tá ið keypt verður - sum rakstrargøgn, ið ikki eru undir virðisminkan.

Tá ið motorakfør, sum eru keypt við tilfaktureraðum meirvirðisgjaldi, verða tikin út til endamál, sum ikki gevur rætt til frádrátt, skal meirvirðisgjald roknast av

**- keypsprísinum, frároknað meirvirðisgjald, men íroknað møguligt skrásetingargjald, lækkað við 20% fyri hvørt heilár, ið er farið síðani keypsdagin.**

Reglurnar um uppgerð av meirvirðisgjaldsskylduga virðinum, tá ið rakstrargøgn verða tikin út, eru ikki galdandi fyri íløgugøgn, ið eru umfevnd av reglum um regulering av inngangandi meirvirðisgjaldi fyri rakstrargøgn.

Fylgjandi rakstrargøgn verða mett at vera íløgugøgn:

1. Rakstrargøgn, hvørs keypsprísur er størri enn 50.000 kr., ikki íroknaður meirvirðisgjald, og sum eru undir virðisminkan. Keypsprísurin á bilum, ið eru keyptir við tilfaktureraðum meirvirðisgjaldi, er tann upphædd, sum meirvirðisgjald er roknað av.

2. Rakstrargøgn, hvørs reguleringsskylda - sambært reglunum um regulering av inngangandi meirvirðisgjald fyri íløgugøgn - er tikin yvir, t.d. vegna avhending uttan meirvirðisgjald sambært § 12, 5. stk. í lógini.

Fyri tílík rakstrargøgn (íløgugøgn) er galdandi, at meirvirðisgjald ikki skal rindast sum vanligt, men harafturímóti skal regulering av frádráttinum ella ein regulering grundað á yvirtikna reguleringsskyldu fara fram.

Nærri reglur um íløgugøgn verða ásettar í kunngerð við heimild í § 16, 2. stk. í lógini. Hetta er eisini umrøtt í viðmerkingunum til regluna.

**Til § 8, 2. stk.**

Reglurnar um uppgerð av meirvirðisgjaldsskylduga virðinum á vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ið verða latnar fult ella partvíst móti aðrari gjalding enn pengi (býtishandil), eru nevndar í § 8, 2. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Sambært hesum skal meirvirðisgjald við býtishandil roknast grundað á vanligan søluprís hjá einum virki, tá ið tílík vøra ella tænasta verður seld.

Er eingin vanligur søluprísur, skal meirvirðisgjald roknast grundað á ein mettan søluprís. Hesum prísur skal innihalda keyps- ella framleiðsluprís virkisins, allar útreiðslur og vinning, ið vanliga er við í meirvirðisgjaldsskylduga virðinum fyri tílíkar vørur ella tænastur, og møgulig avgjøld.

Hesar reglur eru galdandi bæði fyri býtishandil við vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum

tænastum, sum eitt virki selur ella framleiðir, og fyri rakstrargogn hjá einum virki.

Eru báðir partar í einum býtishandli meirvirðisgjaldsskrásett virki, sum kunnu rokna meirvirðisgjald av tí, tey hava fingið í býti, við í inngangandi meirvirðisgjald, kann meirvirðisgjaldið roknast grundað á munin, javnber viðmerkingarnar til § 17, 4. stk.

§ 8, 2. stk. kann t.d. nýtast, tá ið eitt byggivirki frá ánaranum móttekur skuldarbræv, sum heila ella partvísa gjalding fyri arbeiði. Meirvirðisgjaldið skal í sovorðnum førum roknast av vanliga prísinum hjá byggivirkinum fyri tílíka bygging.

Er eingin sovorðin prísur, skal ein prísur ásetast. Prísurin skal fevna um allar útreiðslur og vinning, ið vanliga verða roknað við í avgjaldsskylduga virðið fyri tílíkar latingar.

**Til § 8, 3. stk.**
Tá ið vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða tiknar at nýta til bygging, umbygging ella til at gera nútíðarhóskandi fasta ogn til handhava virkisins ella til endamál, sum ikki hava rætt til frádrátt, herímillum til tey endamál, ið eru nevnd í § 16, 3. stk. meirvirðisgjaldslógini, skal meirvirðisgjaldsskylduga virðið, sambært § 8, 3. stk. gerast upp sambært somu reglum, sum eru galdandi fyri býtishandil, samanber § 8, 2. stk. í lógini.

Umvæling og viðlíkahald, hvørs samlaða virðið er hægri enn kr. 50.000 árliga, skal metast javnt við umbyggingararbeiði ella arbeiði at gera nútíðarhóskandi.

Sambært hesum skal meirvirðisgjald roknast grundað á virkisins

**- vanliga søluprís fyri eina samsvarandi lating til einstaklingar.**

Er eingin vanligur søluprísur, skal meirvirðisgjald roknast av einum mettum søluprísi, ið skal innihalda tær útreiðslur og tann vinning, ið vanliga er við í meirvirðisgjaldsskylduga virðinum fyri tílíkar vørur og tænastur, tá ið selt verður til einstaklingar.

Verður føst ogn, ið verður bygd fyri egna rokning, og sum meirvirðisgjald skal rindast av sambært § 3, 2. stk., seinni seld, skal meirvirðisgjald ikki rindast av søluni, av tí at søla av fastari ogn er avgjaldsfrí.

Verður ognin seld við tapi, kann virkið hinvegin ikki draga tapið frá í avgjaldsskyldugu søluni.

**§ 9. Eru felags áhugamál millum lataran og móttakaran av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, t.d. soleiðis, at annar er búskaparligt áhugaður í virki ella ogn hjá hinum partinum, kann landsstýrið krevja, at avgjaldsskylduga virðið skal ásetast á tann hátt, sum er ásettur í § 8, 2. stk.**
**2. stk. Fyri bólkar av virkjum kann landsstýrið áseta fyridømispeninganøgd, sum vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið vera nýttar sum nevnt í § 8, 1. stk., kunnu**

**avgjaldsavgreiðast sambært. Í førum tá ið avgjaldsskylduga virðið verður ásett eftir eini útrokning, kunnu somuleiðis ásetast reglur um avgjaldsavgreiðslu sambært fyridømispeninganøgd.**

**Til § 9, 1. stk.**
Tá ið vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verða seldar millum tvey búskaparliga sambundin virki (felagsáhugamál), er møguleiki fyri, at tann prísur, vøran/tænastan verður seld fyri, ikki er veruligur. Hetta merkir, at tað ikki er sami prísur, sum ein uttanveltaður triði persónur hevði skula goldið, um vøran/tænastan annars varð latin undir somu treytum.

Verða tílíkir serligir prísir nýttir til at minka um meirvirðisgjaldið hjá einum virki, kann reglan í meirvirðisgjaldslógini § 9, 1. stk. takast í nýtslu.

Sambært hesi reglu kann lansstýrið avgera, at meirvirðisgjald skal roknast grundað á eitt virði, ið er uppgjørt sambært reglum fyri býtishandil, javnber § 8, 2. stk. í meirvirðisgjaldslógini.

Reglan eigur bert at verða nýtt, tá ið prísásetingin - orsakað av tí búskaparliga áhugamálinum millum seljara og keypara - ávirkar samlaða meirvirðisgjaldstilsvarið.

Reglan kann hugsast at verða nýtt innan bygging, t.d. tá ið byggivirki byggja fasta ogn fyri feløg, ið byggivirki eigur, og hvørs uppgáva bert er at selja fasta ogn (meirvirðisgjaldsfrí virki), og tá ið byggivirkið við at nýta ein prís, ið er lægri enn tann prísurin virkið vanliga tekur fyri at byggja fasta ogn, flytur ein part av normalvinninginum til meirvirðisgjaldsfría virkið, og samlaða meirvirðisgjaldstilsvarið fyri byggingina sostatt verður lækkað.

Harumframt kann reglan hugsast at verða nýtt, tá ið samanfall er millum persónar í partafelagi, og tá ið tílík virki millum sín selja fyri undirprísir.

**Til § 9, 2, stk.**
Ætlan landsstýrisins er at áseta nærri reglur um standardupphæddir sambært § 8, 1. stk. Víst verður til viðmerkingar undir hesi grein.

**§ 10. Við sølu av brúktum persónmotorakførum og av vøru- og lastmotorakførum kann ein sølumaður - tá avgjald ikki er fakturerað sambært hesi lóg við útflýggjan til sølumannin - avgjaldsavgreiða akfarið grundað á eitt avgjaldsskyldugt virði, sum er 83,33% av muninum millum keypsprísin og søluprísin, avgjaldið íroknað. Fer søluprísurin ikki upp um keypsprísin, verður einki avgjald roknað.**
**2. stk. Fyri virki, ið leiga út motorakfør, og fyri koyriskúlar verður reglan sambært 1. stk. í hesi grein galdandi.**
**3. stk. Verður avgjaldið roknað sambært grundarlagnum, í 1. ella 2. stk., má hvørki avgjaldsupphæddin ella nakað annað, sum ger tað møguligt at rokna avgjaldsupphæddina, vera nevnt í fakturanum fyri viðkomandi sølu.**

**4. stk. Sum brúkt akfør eru at rokna akfør, sum, tá ognað verður, eru ella hava verið skrásett her á landi, javnber ferðslulógina.**

**Til § 10, 1. stk.**
Tá ið brúkt persónakfør og vøru- og lastvognar verða seld, hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið ásetast til eina upphædd, sum er 83,33% av muninum millum keypsprísin og søluprísin, íroknað meirvirðisgjald. Tað er ein treyt, at meirvirðisgjald ikki er tilfakturerað, tá ið akfarið verður latið seljaranum, og tá ið selt verður, má fakturi ikki útflýggjast, ið inniheldur upplýsingar um støddina á meirvirðisgjaldinum. (§ 10, 1. og 3. stk.).

Sum brúkt akfør eru at rokna akfør, ið eru ella hava verið skrásett her á landi sambært ferðslulógini.

Er ein brúktur bilur t.d. keyptur av einum seljara fyri 12.000 kr. og seldur fyri 22.000 kr., er meirvirðisgjaldsskylduga virðið, um meirvirðisgjaldið er 20%, 83,33% av 10.000 kr., sostatt skal meirvirðisgjald rindast við 20% av 8333 kr. Fer søluprísurin ikki upp um keypsprísin, skal meirvirðisgjald ikki rindast. Seljarin kann ikki mótrokna eitt møguligt tap í aðrari meirvirðisgjaldsskyldugari sølu.

Meirvirðisgjaldsreglurnar fyri brúkt akfør skulu síggjast grundað á, at skrásetingargjaldið ikki skal roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga virðið, tá ið nýggj persónmotorakfør v.m. verða seld.

Skrásetingargjaldið er harafturímóti ein partur av virðinum á brúktum akførum, og um so hevði verið, at vanligu reglurnar um avgjald av samsýningini (søluprísinum) skuldu verið galdandi, hevði hetta orsakað av støddini á skrásetingargjaldinum merkt, at meirvirðisgjald serstakliga við sølu av rættiliga nýggjum persónakførum v.m. ofta hevði farið upp um meirvirðisgjald av samsvarandi nýggjum akførum. Hetta kundi ført við sær, at brúkt akfør orsakað av meirvirðisgjaldinum vórðu seld frá brúkara til brúkara og ikki gjøgnum vanligu søluliðirnar.

**Til § 10, 2. stk.**
Tá ið bilútleigarar og koyriskúlar selja akfør, ið hava verið nýtt til at leiga út ella til meirvirðisgjaldsskylduga koyrilæru, kann meirvirðisgjaldsskylduga virðið ásetast til søluprísin, ikki íroknað meirvirðisgjald, lækkaður við nærri ásettum lækkingarprosentum. Hesi prosent verða ásett við kunngerð. Lækkingin kemur at samsvara við tann partin av virðinum á akfarinum, sum er skrásetingargjald. Verður avgjaldið roknað á hesum grundadagi, má fakturi ikki útflýggjast, tá ið selt verður, ið inniheldur upplýsing um staddina á meirvirðisjgaldinum (§ 10, 3. stk.).

Orsøkin fyri hesi reglu er tann sama sum fyri akfør, sum seljarar selja. Her er bert valdur ein annar framferðarháttur at taka burtur skrásetingargjaldið frá virðinum á brúktum akførum.

**Til § 10, 3. stk.**
Verður avgjaldið roknað sambært 1. og 2. stk., má hvørki avgjaldsupphæddin ella nakað annað, ið ger tað møguligt at rokna avgjaldsupphæddina, verða tilskilað á fakturanum.

Orsøkin til hesa reglu er, at keyp sambært § 10, 1. og 2. stk. ikki kunnu heimila keyparanum frádráttarrætt fyri inngangandi avgjald.

Hinvegin skal keyparin ikki rinda meirvirðisgjald, tá ið eitt sovorðið akfar verður selt.

## IV. VAVIÐ Á AVGJALDSSKYLDUGARI SØLU.

**Til § 11. Avgjaldsskyldug søla hjá skrásettum virkjum fevnir um latingar móti gjalding og vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum eru framleiddar ella umboðaðar á virkinum, og sum verða tiknar í nýtslu av handhavanum á virkinum. Harumframt fevnir avgjaldsskyldug søla um vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið vera tiknar í nýtslu til endamál, sum ikki viðvíkja sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum hjá virkinum, ella til endamál sum nevnt í § 16, 3. stk.**
**2. stk. Avgjaldsskyldug søla á ríkis-, lands- ella kommunalum stovnum av tí slagnum, sum er nevnt í § 3, 1. stk., punkt d, fevnir einans um latingar móti gjalding til annan enn viðkomandi ríkis-, lands- ella kommunalan stovn, ella tær kommunur, sum eru partaeigarar í stovninum.**
**3. stk. Við í avgjaldsskylduga sølu skal roknast søla v.m. av vørum, sum virkið hevur móttikið í umboðssølu ella søluumboði.**
**4. stk. Søla v.m. av maskinum og øðrum rakstrargøgnum hjá virkinum verður roknað við í avgjaldsskylduga sølu. Sama er galdandi fyri vørugoymslu, maskinur og onnur rakstrargøgn, tá virkið frámeldar frá skráseting.**

**Til § 11**

Trý heiti verða nýtt at lýsa søluna hjá einum virki í samband við meirvirðisgjaldslógina:
- samlað søla
- søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum
- meirvirðisgjaldsskyldug søla, sum útgangandi útgjald skal roknast av.

Samlaða sølan - ella bert sølan - hjá einum virki er at skilja sum samlaða virðið av latingum av vørum og tænastum, bæði meirvirðisgjaldsskyldugum og meirvirðisgjaldsfríum, innan eitt ávíst tíðarskeið. Virðið á vørum og tænastum, sum eru tiknar til egna nýtslu, skal eisini roknast við í søluna.

Samlað søla verður einans nýtt at rokna lutvísan frádráttarrætt fyri inngangandi meirvirðisgjald á virkjum við blandaðum rakstri, (javnber, niðanfyri).

Søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum er at skilja sum tann søla, sum

meirvirðisgjald skal roknast av, og tann søla, ið sambært § 12 í lógini (útflutningur, umvæling av skipum, flogførum v.m.) kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldugu søluna.

Heitið søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum verður somuleiðis nýtt at rokna partvísan frádráttarrætt á blandaðum virkjum, tað er virki, ið bæði hava meirvirðisgjaldsskyldugar og meirvirðisgjaldsfríar aktivitetir.

Meirvirðisgjaldsskyldug søla er tann parturin av sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, sum útgangandi meirvirðisgjald skal rindast av.

Henda søla fæst við at draga sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum frá virðinum av meirvirðisgjaldsskyldugum latingum, sum móttakarin í ávísum førum ikki skal rinda meirvirðisgjald av.

Søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum (§ 11) fevnir um:

a. Allar latingar av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum móti gjaldi. Vørur, sum virkið hevur tikið ímóti í umboðssølu (kommissión) ella søluumboði (konsignatión), og latingar av vørum, sum virkið letur í umboðssølu ella søluumboði.

   Er talan bert um at umboða (formidla) eina sølu, t.d. tá ið listasøvn selja listaverk í navninum hjá tí einstaka listamanninum, og tá ið hetta er avtalað millum listamannin og savnið, er talan ikki um umboðssølu, og listasavnið skal bert rinda meirvirðisgjald av samsýningini fyri at umboða (formidla) søluna.

   Vørugoymsla, maskinur og onnur rakstrargøgn skulu roknast við í sølu, tá ið effektirnar verða seldar, ella um tey á annan hátt ikki longur verða nýtt í meirvirðisgjaldsskylduga virkinum. Søla í samband við avhending av virkinum til nýggjan handhava er umrødd undir § 12, 5. stk.

   Rakstrargøgn, ið einans hava verið nýtt til avgjaldsfrítt virksemi á virkinum, og tá ið tað av hesi orsøk ikki var frádráttarrættur fyri inngangandi meirvirðisgjald, tá rakstrargøgnini vóru keypt, skulu ikki roknast við.

b. Vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, sum verða framleiddar ella seldar av virkinum og sum verða tiknar í nýtslu

   1) av handhava virkisins (eginnýtsla),

   2) til endamál, sum ikki viðvíkur sølu virkisins av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum (t.d. í samband við sølu av meirvirðisgjaldsfríum tænastum), ella

   3) til endamál nevnd í § 16, 3. stk. (naturalløn, matur, umboð, gávur v.m. og útvegan og rakstur av persónakførum).

c. Rakstrargøgn, ið verða nýtt sum nevnt undir b.

Hesar reglur gera, at skrásett virki eisini skulu rinda meirvirðisgjald av teimum av virkinum framleiddu ella seldu vørum og meirvirðisgjaldsskyldugu tænastum, sum verða brúktar til egna nýtslu, t.d. arbeiði hjá handverkara v.m. tá ið hann byggir hús til egna nýtslu ella at leiga út, ella tá ið hann byggir summarhús til starvsfólkið. Henda regla kann bert nýtast á virkjum, ið eisini selja meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur av sama slagi sum tann, ið verður tikin í nýtslu.

Reglurnar skulu eisini síggjast í samband við reglur um rætt til frádrátt fyri inngangandi meirvirðisgjald (§ 16). Virki hava prinsipielt ikki rætt til frádrátt í samband við keyp til egna nýtslu v. m. Men í praksis er ofta so at eitt virki ikki veit, tá ið keypt verður, um vørurnar skulu nýtast í skrásetta virkinum ella fara til egna nýtslu. Eitt virki má tí ikki rokna útgangandi meirvirðisgjald, tá ið vørurnar seinni verða nýttar til endamál, ið ikki hevur rætt til frádrátt.

**§ 12. Avgjaldsskyldug søla fevnir ikki um:**
**a. Vørur, sum av virkinum verða útfluttar til útlond, og tænastur, sum vera gjørdar í útlondum.**
**b. Flutning av vørum her á landi, tá flutningurin fer fram beinleiðis til ella frá útlondum.**
**c. Arbeiðstænastur á vørur, tá tænastan verður gjørd fyri útlendska rokning, og virkið eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útlond, og konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá framleiðslan av vørunum skal fara fram uttanlands.**
**d. Prosjekteringsarbeiði v.m. viðvíkjandi bygningum og aðrari fastari ogn uttanlands.**
**e. Neyðuga útgerð, sum verður latin til nýtslu um borð á flogfari og skipi í uttanlandsferðslu (undantikið sportsflogfør og lystfør), og tænastur, sum verða gjørdar fyri slík flogfør og skip.**
**f. Sølu og útleigu av flogførum og av skipum, sum eru 5 GT og meira, undantikið sportsflogfør og lystfør.**
**g. Umvælingar-, viðlíkahalds- og ísetingararbeiði av fastari útgerð í tey flogfør og skip, sum eru nevnd í punkt f, og tilfar, sum er latin av viðkomandi virki í hesum sambandi.**
**h. Søla av tíðindabløðum.**
**i. Útlendsk tíðarrit í blaðhaldi, tá haldaragjaldið er fingið í lag millum haldaran og útlendska útgevaran.**
**j. Søla undantikin sølu til heilsølu ella smásølu av fiski og skeljadýrum, lindýrum og øðrum ryggleysum vatndýrum (jbr. 3. kap. í toll- og vøruskránni).**
**2. stk. Landsstýrið kann áseta nærri treytir fyri nýtslu av 1. stk. og gera av, at tænastur, sum verða gjørdar fyri útlendska rokning í øðrum førum, kunnu haldast uttan fyri avgjaldsskylduga sølu.**
**3. stk. Landsstýrið ásetir reglur um, at hóast ásettu regluna í 2. stk. kann søla, ið er útleiging av kamari til útlendsk ferðafólk, haldast uttan fyri avgjaldsskylduga sølu.**

**4. stk. Landsstýrið kann áseta, um og í hvønn mun vistir, sum verða latnir skipum ella flogførum til nýtslu um borð ella til sølu til ferðafólk v.m., kunnu haldast uttan fyri avgjaldsskylduga sølu.**
**5. stk. Við í avgjaldsskylduga sølu skal ikki roknast søla av vørum, sum burturav eru fingnar ella tiknar í nýtslu til tey endamál, sum eru nevnd í § 16, 3. stk.**
**6. stk. Avhending av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum kann ikki roknast við í avgjaldsskylduga sølu, tá avhendingin fer fram sum liður í eini avhending av virkinum ella einum parti av hesum, og nýggi handhavin rekur skrásett virki. Virkið skal innan 8 dagar eftir avhendingina geva Toll- og skattstovu Føroya fráboðan um navn og bústað hjá nýggja handhavanum og um søluprísin á vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum, ið verða avhendað.**
**7. stk. Landsstýrið ásetir reglur um, at avgjaldsskyldug søla sambært hesi lóg ikki fevnir um sølu av bókum.**

**Til § 12**
Sambært § 12 kunnu ymiskar latingar av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Í samband við hesar latingar er talan um, at ein prinsipielt meirvirðisgjaldsskyldug søla, sleppur undan meirvirðisgjaldi. Frítøkan fer fram á tann hátt, at virkið fær somu fyrimunir sum fyri "meirvirðisgjaldsskylduga sølu", tað er frádrátt fyri meirvirðisgjald av keypi at nýta til tílíka sølu v.m. (t.d. rávørur at nýta til framleiðing av útflutningsvørum ella pappír at framleiða tíðindabløð).

Meirvirðisgjaldsfrí søla verður skift í tríggjar bólkar:

1. Søla av vørum, sum verða útfluttar til útlond, og tænastur, ið verða gjørdar undir viðurskiftum, ið kunnu metast javnt við útflutning.

2. Søla - og fyri ein part útleiga - av nøkrum vørum, sum ítøkiliga eru nevndar í lógini og av umvælingartænastum o. t. av ávísum av hesum vørum.

3. Søla av vørum, sum virkið hevur fingið til vega ella tikið í nýtslu, einans til endamál, har meirvirðisgjald av keypi ikki kann roknast við í inngangandi avgjald (§ 16, 3. stk.).

§ 12 í lógini inniheldur eisini eina reglu um, at avhending av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum hjá einum skrásettum virki ikki kann (má) roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið avhendingin fer fram sum ein liður í eini avhending av øllum virkinum ella einum parti av hesum, og nýggi handhavin rekur skrásett virki (er ella verður skrásett).

Harumframt kunnu ávísar latingar, t.d. sýnislutir, reklamulutir og endurgjaldslatingar, haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Ætlanin er at halda útflutning og latingar, ið kunnu metast javnt við útflutning, uttan fyri meirvirðisgjald - uttan mun til um tað snýr seg um vørur ella tænastur.

Hetta er galdandi fyri tær í § 12, 1. stk. punkt a - e, og 2. og 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini nevndu latingar, tað er:

- vørur, sum av virki verða útfluttar til útlond, og tænastur, ið verða gjørdar uttanlands,
- flutningur av vørum her á landi, tá ið flutningurin er beinleiðis til ella frá útlandi,
- arbeiðstænastur á vørur, tá ið tænastan verður gjørd fyri útlendska rokning, og virkið eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útlond, og konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá ið vøran skal framleiðast uttanlands,
- prosjekteringsarbeiði v.m. í samband við bygningar og aðra fasta ogn uttanlands,
- neyðug útgerð og vistir, ið verður latið at nýta umborð á flogførum og skipum í uttanríkis ferðslu (sportsflogfør og stuttleikafør undantikin), og tænastur, ið verða gjørdar fyri tílík flogfør og skip, og
- aðrar tænastur gjørdar fyri útlendska rokning - sambært fyriskipan landsstýrisins. Tílíkar reglur verða ásettar í kunngerð.

**Til § 12, 1. stk. a.**
Meirvirðisgjaldsskylduga sølan fevnir ikki um vørur, sum av einum virki verða útfluttar, til útlond og tænastur, ið verða gjørdar uttanlands.

Metast javnt við útlond kunnu tær í tolllógini § 8 nevndu sølubúðir.

Sum útlond eru at rokna øki uttan fyri føroyska tolløkið, tað er øki uttan fyri føroyska landøkið, (firðir) og havleiðina við Føroyar út til 3 sjómíl (5556 m) frá grundlinjum og loftrúmið yvir nevnda øki, sum ásett í § 1 í tolllógini.

Virki skulu sum prógv fyri meirvirðisgjaldsfríar latingar av vørum til útlond kunna vísa:

1. Avrit av faktura yvir útfluttu vørurnar.
2. Skriftligan ordra, brævaskifti við keypara, avrokning við banka o.t.
3. Útflytarans útflutningsfráboðan við váttan frá myndugleika, ið hevur eftirlit við útflutningi.

Krøvini um próvførslu eru galdandi, uttan mun til um vørurnar verða útfluttar við egnum ella fremmandum flutningsfari.

Vørur, ið verða fluttar til útlond av keyparanum, t.d. við egnum akfari, kunnu skrásett virki lata uttan meirvirðisgjald. Útflutningsváttanir skulu vísast.

Eru omanfyri nevndu treytir ikki loknar, er sølan ikki undantikin meirvirðisgjald.

**Til § 12, 1. stk. b.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um flutning av vørum her á landi, tá ið flutningurin fer beinleiðis til ella frá útlandi.

Flutningur av vørum innanlendis kann sostatt av skrásettum virkjum haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið flutningurin fer beinleiðis til ella frá útlandi.

Henda regla hevur til endamáls at sleppa undan møguligum tvíavgjaldi, við tað at møguleiki ikki er fyri meirvirðisgjaldsfrádrátti fyri ein flutning, tá ið flutningurin er rindaður av útlendskum latara.

Sum flutningur av vørum beinleiðis til ella frá útlandi er at skilja flutningur av vørum, ið sambært flutningsavtalu verður gjørdur frá einum staði her á landi til eitt stað í útlandi ella øvugt.

**Til § 12, 1. stk. c.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um arbeiðstænastur á vørur, tá ið tænastan verður gjørd fyri útlendska rokning, og virkið - eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útland, og konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá ið vøran skal framleiðast í útlandi.

Virki kunnu sostatt halda arbeiðstænastur á vørur uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið virki ger tænastuna fyri útlendska rokning og eftir viðgerðina útflytir vørurnar til útlond. Prógv fyri at vørurnar eru útfluttar, skal vísast.

Sum útflutningur er somuleiðis at rokna konstruktión og skapan av vørum fyri útlendska rokning, tá ið vøran skal framleiðast í útlandi. Virki skal kunna vísa fakturaavrit og aðra váttan sum skrivligar bíleggingar, brævaskifti, avrokning við banka ella tílíkt.

Umvælingar- og umbyggingararbeiði á útlendsk stuttleikafør og vinnufør sum eru undir 5 GT kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið umvælingararbeiðið v. m. fer fram fyri útlendska rokning, og farið, tá ið umvælingin er liðug, verður flutt aftur til útlandið.

Tó skal tað kunna skjalprógvast, at farið er útflutt.

Umvælingararbeiði v. m, sum er gjørt við persónakfar hjá útlendingi, meðan viðkomandi er staddur her á landi, kann ikki haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

**Til § 12, 1. stk. d.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um prosjekteringsarbeiði v.m. í samband við bygningar og aðra fasta ogn uttanlands.

Prosjekteringsarbeiði og annar tekniskur stuðul í samband við bygningar og aðra fasta

ogn uttanlands kann sostatt haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu hjá einum virki, uttan mun til um arbeiðið verður rindað av byggifyritøkum, ið hoyra heima her á landi.

Mekling av sølu av fastari ogn, ið er uttanlands, kann eisini haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, uttan mun til um meklingin verður fakturerað til ein keypara her á landi. Sama er galdandi fyri aðrar tænastur í samband við fasta ogn, ið er í útlandi, t.d. advokattænastur.

**Til § 12, 1. stk. e.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um neyðuga útgerð, ið verður latin at nýta um borð á flogforum og skipum í uttanríkis ferðslu (undantikið sportsflogfør og stuttleikafør), og tænastur, ið verða gjørdar fyri tílík flogfør ella før.

Latingar av neyðugari útgerð - bæði til installatión og leys útgerð - at nýta um borð á flogfari og skipi í uttanríkis ferðslu kunnu sostatt haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um tænastur, ið verða gjørdar fyri tílík flogfør og skip. Tænasturnar skulu vera í samband við sjálvt farið, herímillum teirra vanligu útgerð, og tænasturnar skulu verða gjørdar fyri rokning hjá flogfarinum ella skipinum.

Umframt vanligar útflutningsváttanir skal váttan eisini vísast frá skipara ella líknandi um, at latingin er fingin um borð.

Latingar av neyðugari útgerð og tænastur til sportsflogfør og stuttleikafør kunnu ikki haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, hóast farið fer til útland.

Skipsmeklaratænastur á samband við skip - føroysk og útlendsk - í uttanlands sigling kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið tænasturnar verða gjørdar fyri rokning hjá skipinum ella einum útlendskum virki.

Søla til útlendsk fiskifør av ísi, brennievni, skipsútbúnaði og skipsútgerð, sum skal roknast við í meirvirðisgjald av keypi her á landi, kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

**Til § 12, 1. stk. f.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um sølu og útleigu av flogførum og skipum, ið eru 5 GT og yvir, sportsflogfør og stuttleikafør undantikin.

Avgjaldsskylda fyri skip og bátar undir 5 GT hevur við sær, at fiskimenn, ið leiga ella keypa sovorðin skip/bátar, kunnu rokna meirvirðisgjald av keypi við í inngangandi avgjaldið.

Vanliga er tað ein treyt fyri meirvirðisgjaldsfría leigu av skipum og flogførum, at útleigan fer fram grundað á ein leigusáttmála ella leiguavtalu, sum partarnir hava gjørt.

Meirvirðisgjald skal rindast av leigu av serútgerð at nýta um borð og av rindan fyri oljunýtslu v.m. og annars av øðrum meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ið verða gjørdar í samband við útleiguna.

Eisini skal meirvirðisgjald rindast av brennievni, ið verður latið í samband við útleigu av skipi og flogfari. Hetta er galdandi, uttan mun til um brúkið av brennievni er íroknað í leigupeningin.

**Til § 12, 1. stk. g.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um umvælingar-, viðlíkahalds- og innstallatiónsarbeiði á teimum í litra f. nevndu flogførum og skipum og teirra føstu útgerð og um tað tilfar, sum viðkomandi virki, í hesum samband hevur latið.

Skipasmiðjur, flogverkstaðið o.t. kunnu sostatt halda umvælingar-, viðlíkahalds-, og installatiónsarbeiði, sum verður gjørt beinleiðis á skipi og flogfari og teirra føstu útgerð, uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir bæði um før í uttanlands ferðslu og før í innanlands ferðslu.

Tað, sum skrásett virki (skipasmiðjur, verkstaðir o.t.) lata av tilfari í samband við nevndu arbeiði á før og fasta útgerð, er eisini umfevnt av meirvirðisgjaldsfrítøkuni.

Tilfar, ið verður latið uttan tilknýti til nevnda arbeiði á skipi og flogfari og teirra føstu útgerð, kann ikki haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu sambært hesi reglu. Hetta viðvíkur t.d. máling, brennievni, fiskireiðskap og aðra leysa útgerð.

Heitið "og teirra føstu útgerð" er ikki nærri greinað, men má í ein vissan mun metast út frá, um útgerðin er installerað fast (t. d. radioútgerð, radar og onnur navigeringsútgerð, motorar), ella um útgerðin er neyðug orsakað av innrættingini og konstruktiónini v.m. á farinum (bjargingarbátar og annað trygdartilfar).

Útleiga (leasing) av føstum installatiónum (t.d. radar- og deccaútgerð) til før, sum eru 5 GT og yvir, kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskyldugu sølu útleigarans.

Tænastur, sum skrásett virki ger á skipi, so sum tíðarásett sýn, eftirlit og kanning í serligum førum, t.d. tá ið farið hevur fingið skaða, eru at meta sum umfevnd av reglunum í litra f.

Umvælingartænastur v.m. á skipsbingjur kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu, við tað at hesar tænastur verða mettar at vera gjørdar á fasta útgerð á skipinum.

Skipsbingjur eru eindir í einari altjóða skipan við fyrisettum mátum (ISO) við tí ávísa endamáli at vera í staðin fyri vanlig (konventionel) lastrúm á skipi.

Reglan fevnir bert um skipsbingjur, sum hava mát sambært fyrisettum ISO-mátum.

**Til § 12, 1. stk. h.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um sølu av tíðindabløðum.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um pening fyri at bera út tíðindabløð.

Tá ið avgerast skal, um eitt blað kann metast at vera tíðindablað, meirvirðisgjaldi viðvíkjandi, verður dentur lagdur á fylgjandi fyritreytir:

1. Um blaðið fyrst og fremst verður lisið vegna tað, ið verður skrivað av áleikandi (aktuellum) tíðindum. Fyri tey bløð, sum ikki kunnu geva nýggjastu tíðindi, av tí tey ikki koma út nóg ofta, er tað ein treyt, at innihaldið snýr seg um ella viðger evni, ið hava verið áleikandi síðani seinastu útgávu,

2. um blaðið vendir sær til ein hampiliga stóran skara av lesarum,

3. um tað viðger nógv ymisk evni.

Vanlig vikubløð koma sostatt ikki undir tess reglu.

Harumframt kann dentur - í samband við eina heildarmeting av blaðnum - t.d. leggjast á:

- um tað kann metast at líkjast tíðindablaði tekniskt og typografiskt (pappír, prent, layout osfr.),

- um tað verður selt í leysasølu ella bert til haldarar (felagslimir), og

- hvussu stórt upplagið er,

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um útlendsk tíðindabløð, ið lúka treytirnar í hesi grein.

**Til § 12, 1. stk. i.**
Meirvirðisgjaldsskyldug søla fevnir ikki um útlendsk tíðarrit í haldi, tá ið haldið er millum haldaran og útlendska útgevaran.

Føroyskar bókasølur v. fl. kunnu sostatt lata vera at krevja meirvirðisgjald av haldum millum haldaran og útlendska útgevaran. Útlendsk tíðarrit, ið verða seld í leysasølu, skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Tá ið avgerast skal, um ein útgáva kann metast sum tíðarrit, meirvirðisgjald viðvíkjandi, er nummarið í toll- og vøruskránni vegleiðandi. Sambært hesum kunnu t.d. handbøkur, orðabøkur, koyriætlanir, vegvísarar og bibliografiir, ið hoyra undir vøruflokk 49.01 (bøkur) í toll- og vøruskránni, ikki metast sum tíðarrit.

**Til § 12, 2. stk.**
Prinsipielt skal meirvirðisgjald rindast, tá ið meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, ið verða gjørdar her á landi, verða seldar, eisini um keyparin ikki hoyrir heima her á landi.

Sambært § 12, 2. stk. verða nærri reglur ásettar, fyri at tænastur, ið vera gjørdar fyri útlendska rokning í øðrum førum enn nevnt í § 12, 1. stk., kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu.

Kunngerð um meirvirðisgjald av ávísum tænastum, ið verða seldar til útlond ella keyptar í útlondum, fer at innihalda nærri reglur fyri, undir hvørjum umstøðum ein røð av ítøkiligum tænastum, ið gjørdar verða fyri útlendska rokning, kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu. Hesar reglur verða lýstar niðanfyri.

Fylgjandi tænastur kunnu sambært kunngerð, ið verður gjørd, í ávísum førum seljast uttan at rokna meirvirðisgjald:

a. Heil ella partvís avhending av upphavsrætti, patentrættindum, licensrættindum, rætti til vørumerki, felagsmerki og mynstur og onnur tílík rættindi.

b. Tænastur í samband við reklamur.

c. Tænastur frá ráðgevandi virkjum, verkfrøðingum, prosjekteringsvirkjum, advokatum og grannskoðarum og aðrar tílíkar tænastur; dátuviðgerð og upplýsing. Marknaðarkanningar, týðing og umsjónarvirki koma undir hetta punkt.

d. Tænastur frá vikarstovum.

e. Skyldur til fult ella lutfalsliga at lata vera við at reka vinnuligt virki ella nýta eitt av rættindunum, ið nevnd eru í a-g.

f. Tænastur, ið verða gjørdar av millummonnum, sum handla í navni og fyri rokning hjá øðrum, um so er, at teirra virki viðvíkur lating av tílíkum tænastum, sum nevndar eru í punki a-g.

g. Útleiga av leysoyrafæ, burtursæð frá flutningsførum.

Við meting av um meirvirðisgjald skal rindast av tílíkari sølu, er avgerandi, um tænastan verður brúkt úttan fyri Føroyar.

Sum dømi um tænastur, ið á henda hátt verða mettar sum fult ella lutfalsliga brúktar her á landi, kunnu nevnast: rættarsakir í Føroyum, innheintingar móti føroyskum debitorum, umboðan av arvingum í føroyskum deyðsbúgvi, "responsa" um føroysk rættarviðurskifti og sakkøn hjálp viðvíkjandi keypi ella stovnsetan av virki her á landi.

Tá ið tænastur, ið einans verða nýttar uttan fyri Føroyar, verða seldar, verða fylgjandi reglur galdandi:

**Meirvirðisgjald skal altíð roknast,**

- um keyparin er eitt meirvirðisgjaldsskrásett virki við handilsstaði her á landi.

**Meirvirðisgjald skal ikki roknast,**

- um keyparin hevur handilsstað ella bústað uttan fyri Føroyar, ella
- um keyparin er eitt ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki ella einstaklingur við handilsstaði ella bústaði her á landi.

Tá ið flutningsfør verða leigað út (útleigingartænastur), skal meirvirðisgjald altíð roknast, um tænasturnar fult ella lutfalsliga verða nýttar innan føroyskt øki.

Tá ið annað leysafæ enn flutningsfar verður leigað út, og tá ið aðrar tænastur verða seldar enn (punkt a-f), sum fult ella lutfalsliga verða nýttar innan føroyskt øki, eru fylgjandi reglur galdandi:

**Meirvirðisgjald skal altíð roknast**

- um keyparin hevur handilsstað ella bústað í Føroyum
- um keyparin hevur handilsstað ella bústað uttan fyri føroyskt øki.

Tá ið niðanfyri nevndu tænastur verða seldar, skal meirvirðisgjald altíð roknast, uttan mun til meirvirðisgjaldsstatus, handilsstað ella bústað keyparans:

a. Tænastur viðvíkjandi fastari ogn, ið er her á landi, herímillum tænastur frá ognarmeklara, ognarseljara v.fl., og tænastur sum prosjektering og ráðgeving.

b. Tiltøk v.m. innan ítrótt, undirhald, undirvísing, vísindi v.m., um so er, at tiltøldni eru umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni, og tænastan verður gjørd her á landi.

c. Arbeiði gjørt á leysafæ her á landi.

d. Serkøn metan av leysafæ her á landi, um so er, at metingin er umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni.

Við heimild í § 12, 2. stk. verða eisini settar reglur um frítøku frá meirvirðisgjaldi av vørum, sum verða útfluttar sum ferðagóðs.

**Til § 12, 3. stk.**
Reglur verða ásettar um frítøku fyri avgjald av provianti, ið verður latin skipum og flogførum. Hetta kemur eisini at galda fyri frítøku fyri toll og avgjald á framleiðslu og innflutningi.

Latingar av vørum, ið ikki eru umfevndar av toll- og avgjaldsfríari proviantering, kunnu

ikki haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu. Hetta er t.d. galdandi fyri latingar av pípu, tendrara, radio, plátuspælara og ávísum vørum, ið eru ætlaðar at verða seldar í kiosk o.t. í skipi og flogfari i uttanríkis ferðslu.

**Til § 12, 5. stk.**
Sambært § 12, 5. stk. í hesi lóg, kann avhending av vørugoymslu, maskinum og øðrum raksgøgnum ikki roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu, tá ið avhendingin fer fram sum liður í einari avhending av virkinum ella einum parti av hesum, og nýggi handhavin rekur skrásett virki.

Virkið skal innan 8 dagar eftir avhendingina boða tollvaldinum frá navni og bústaði hjá nýggja handhavanum og søluprísi fyri vørugoymslu, maskinur og onnur rakstrargøgn, ið verða avhendað.

Orsøkin fyri regluni er at mótvirka tí áhuga, sum meirvirðisgjaldsskrásett virki í ávísum førum kunnu hava at rokna meirvirðisgjald við sølu av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum, við tað at tey á henda hátt kunnu fáa rentufrítt lán frá landskassanum, ið samsvarar við roknað meirvirðisgjald.

Reglan hevur sostatt sum endamál at fyribyrgja órættvísari nýtslu av reglum fyri meirvirðisgjaldsavrokning.

Reglan merkir, at við avhending (søla) av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum hjá einum virki, má meirvirðisgjald ikki roknast, tá ið fakturi ella avrokningarskjal verður latið, um avhendingin fer fram sum liður í einari heilari ella lutfalsligar avhending av einum virki, og nýggi handhavin er ella verður meirvirðisgjaldsskrásettur.

Meirvirðisgjaldsfría avhendingin av rakstrargøgnum v.m. er ikki treytað av, at nýggi handhavin (eigarin) rekur meirvirðisgjaldsskrásett virki innan somu vinnugrein.

Tá ið § 12, 5. stk. skal umsitast, má - út frá einari heildarmeting av nærri umstøðum í samband við avhending virkisins av rakstrargøgnum v. m. - dentur at verða lagdur á, um talan er um vanligar sølu-/keypsumstøður, sum sambært § 11, 4. stk. prinsipielt skulu rinda meirvirðisgjald, ella um handilin líkist heilari ella lutfalsligar avhending av virkinum.

Fyri at tað kann sigast, at talan er um, at eitt virki ella ein partur av tí verður avhendað, er tað ein treyt, at talan er um, at eitt virki ella rakstrargøgn v. m. (búskaparlig eind) verða avhendað, við tí fyri eyga, at keyparin annaðhvørt heldur áfram at reka virkið ella nýtur avhendaðu aktivini á ein sovorðnan hátt, at tað kann metast javnt við rakstur.

Samstundis skal talan vanliga vera um, at seljarin ta løtuna, tá ið avhendað verður, heldur uppat at reka avhendaðu virkið ells ein part av hesum.

Við metingina verður dentur sostatt lagdur á, at seljarin heldur uppat at reka avhendaðu búskaparligu eindina, og á ætlan keyparans við at taka yvir búskaparligu eindina.

Hetta merkir, at meirvirðisgjald skal rindast sambært § 11, 4. stk., tá ið eitt virki avhendar t.d. størsta partin av rakstrargøgnum virkisins til ein seljara (bilseljara, maskinseljara, kríatúrseljara v.fl.), sum eftir yvirtøkuna selur rakstrargøgnini til ymisk viðskiftafólk.

Reglurnar í § 12, 5. stk. verða vanliga nýttar í samband við sølu (ognarskifti) av einum virki ella parti av einum virki, tá ið umframt fasta ogn eisini verður gjørd avtala um, at t.d. hetta fylgir við í avhendingini:

- vørugoymsla, maskinur og onnur rakstrargøgn,
- good-will,
- seljararættindi,
- rættindi at framleiða og onnur immaterial aktív.

(Selur eitt virki regluliga vørugoymslu, maskinur og onnur rakstrargøgn, selur eitt landbúnaðarvirki t.d. dýr, og sølan fer fram sum natúrligur liður í samband við raksturin av virkinum, skal meirvirðisgjald roknast sambært vanliga galdandi reglum, samanber § 11, 4. stk.)

Vørur, ið eru seldar við gildugum ognarfyrivarni sambært lóg um kreditkeyp, og sum verða tiknar aftur av upprunaliga lataranum sambært gildugt ognarfyrivarni, verða ikki mettar at vera umfevndar av § 12, 5. stk. Samu er galdandi fyri afturtøku av vørum, ið eru latnar í umboðssølu ella søluumboði (kommissión ella konsignatión).

Verður meirvirðisgjald av misgáum roknað í samband við avhending av rakstrargøgnum v.m. sum liður í heilari ella lutvísari avhending av virki, skal seljarin (tann, sum stendur fyri rokningini) rætta mistakið yvir fyri keyparanum við at geva keyparanum kreditnotu fyri meirvirðisgjaldsupphæddina, samstundis sum hann afturrindar roknaðu meirvirðisgjaldsupphæddina.

Keyparin hevur í hesum førum ikki atgongd til at gera frádrátt í inngangandi meirvirðisgjaldi, javnber § 15, 3. stk.

Tá ið eitt virki meldar seg frá meirvirðisgjaldsskráseting, heftir virkið (búgvið) fyri meirvirðisgjaldi av møguligum vørum á goymslu, rakstrargognum og fastari ogn í samband við steðg/avhending av virkinum.

Í næstum er greitt frá reglum fyri útrokning av meirvirðisgjaldi av vørugoymslu, rakstrargøgnum og fastari ogn, ávikavist, í samband við steðg/avhending av einum virki.

Verður vørugoymslan seld sum liður í avhending (sølu ella uppsiting (bortforpagtning)) av einum virki, má meirvirðisgjald ikki roknast, um so er, at nýggi eigarin er ella verður meirvirðisgjaldsskrásettur.

Í øðrum førum skal meirvirðisgjald roknast av fulla søluprísinum.

Vil verandi handhavi framvegis hava vørugoymsluna sjálvur annaðhvørt til egna nýtslu ella til onnur ikki meirvirðisgjaldsskyldug endamál, skal meirvirðisgjald roknast. Meirvirðisgjald skal roknast av keyps- ella framleiðsluprísinum (ikki íroknaður meirvirðisgjald).

Tá ið meirvirðisgjald skal roknast av maskinum og øðrum rakstrargognum má skiljast ímillum:

1. Rakstrargogn, sum ikki hava givið virkinum rætt til at frádraga meirvirðisgjald frá keypsprísinum, t.d. persónakfør. Tílík rakstrargøgn skulu ikki rinda meirvirðisgjald, tá ið virkið steðgar v. m.

2. Rakstrargøgn, sum við útvegan kostaðu yvir 50.000 kr., ikki íroknað meirvirðisgjald, og sum eru undir virðisminkan. Fyri tílík rakstrargøgn, ið verða kallað íløgugøgn, galda serligar reglur, (samanber viðmerkingar til § 16, 2. stk.).

3. Onnur rakstrargøgn hjá virkinum, ið skulu rinda meirvirðisgjald sambært hesum reglum:

Verða rakstrargøgnini seld sum liður í avhending (sølu ella uppsiting (bortforpagtning) av virkinum, má meirvirðisgjald ikki roknast, um nýggi handhavin er ella verður meirvirðisgjaldsskrásettur.

Í øðrum førum skal meirvirðisgjald rindast av fulla søluprísinum.

Vil verandi handhavi framvegis hava vørugoymsluna sjálvur annaðhvørt til egna nýtslu ella til onnur ikki meirvirðisgjaldsskyldug endamál, skal meirvirðisgjald roknast.

Meirvirðisgjald skal eisini roknast, um brúksrætturin til rakstrargøgnini í samband við uppsiting (bortforpagtning) av virkinum er farin yvir til uppsitaran, uttan so at verandi handhavin (uppsetarin) er ella verður sjálvboðin meirvirðisgjaldsskrásettur.

Meirvirðisgjald skal roknast grundað á keypsprísin (ikki íroknaður meirvirðisgjald), lækkaður við 20% fyri hvørt heilár, ið er farið síðani keypt varð, javnber viðmerkingarnar til § 8, 1. stk.

Fyri vøruvognar, hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons, sum virkið við útvegan hevði frádráttarrætt fyri, skal meirvirðisgjald roknast grundað á keypsprísin (íroknaður skrásetingargjald, men ikki íroknaður meirvirðisgjald) lækkaður við 20% sum nevnt í viðmerkingum til § 8, 1. stk.

## V. UPPGERÐ AV AVGJALDSSKYLDUGARI SØLU.

**§ 13. Avgjaldsskyldug søla hjá einum virki í einum avgjaldstíðarskeiði verður uppgjørd sum samlaða avgjaldsskylduga virðið á teimum latingum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum eru farnar fram innan tíðarskeiðið.**
**2. stk. Fylgir fakturi fyri eina lating, er faktureringin at rokna sum lating, í tann mun fakturering fer fram innan ella skjótast aftaná, at latingin er endað.**
**3. stk. Fer gjaldingin heilt ella partvís fram, áðrenn latingin er endað, ella áðrenn fakturin verður givin út, skulu 83,33% av upphæddini roknast við í avgjaldsskyldluga sølu fyri tað avgjaldstíðarskeiðið, sum gjaldingin er farin fram í.**
**4. stk. Vørur, sum verða latnar í umboðssølu ella søluumboði, kunnu annaðhvørt verða roknaðar við í avgjaldsskylduga sølu í tí tíðarskeiði, tá ið útflýggjanin fer fram, ella sølu í tí tíðarskeiði, tá ið avrokningin við umboðssølumannin ella søluumboðsmannin fer fram. Í seinast nevnda føri má fakturi sambært § 17 ikki verða givin út, fyrr enn avrokning fer fram.**
**5. stk. Við uppgerð av avgjaldsskyldugari sølu kunnu verða frádrigin 83,33% av upphæddum, sum eru endurrindaðar viðskiftafólki fyri vørur, sum virki hevur fingið aftur.**
**6. stk. Við uppgerð av avgjaldsskyldugari sølu kunnu 83,33% verða frádrigin av staðfestum tapi av krøvum viðvíkjandi latnum vørum og avgjaldsskyldugum tænastum. Verða krøvini seinni heilt ella partvís goldin, skulu 83,33% av móttiknu upphæddunum roknast við í avgjaldsskyldugu søluna, uttan so at gjaldingin fæst sambært § 96 í konkurslógini.**
**7. stk. Við uppgerð av avgjaldsskyldugari sølu kunnu kassaavsláttur og annar avsláttur, sum er treytaður av krøvum, sum ikki eru lokin við latingina, verða drigin frá, um so er, at avslátturin seinni verður effektivur, og treytað av, at avslátturin er veittur einum skrásettum virki, sum kan rokna avgjaldið við fyri viðkomandi lating við uppgerð av sínum inngangandi avgjaldi, javnber § 15, 3. stk. Frádrátturin er treytaður av, at kreditnota verður útflýggjað fyri veittan avsláttur, har avgjaldið er tilskilað, javnber § 17, 1. og 2. stk.**
**8. stk. Vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið verða nýttar av handhavanum á virkinum, verða roknaðar við í avgjaldsskylduga sølu í tí avgjaldstíðarskeiðinum, tá tær eru tiknar í nýtslu. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, sum verða nýttar til endamál, sum ikki viðvíkja sølu hjá virkinum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, ella til endamál, sum nevnt í § 16, 3. stk.**

**Til § 13, 1. og 2. stk.**
Í prinsippinum er uppgerðin av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni fyri eitt meirvirðisgjaldstíðarskeið knýtt at teimum latingum av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, sum eru farnar fram í tíðarskeiðinum.

Nær ið latið verður er avgerandi fyri, nær ið latingin skal roknast við til avgjaldsskyldugu søluna mótsett gjaldingini.

Verður fakturi útflýggjaður yvir eina lating, verður dagurin tá ið fakturerað verður mettur sum dagurin tá ið latið verður, um so er at faktureringin fer fram, áðrenn ella skjótast

aftaná at latingin er endað.

Sama er galdandi, um móttakarin útflýggjar avrokningarskjal í samband við latingina, og avrokningarskjalið verður útflýggjað, áðrenn ella skjótast aftaná at latingin er endað.

Reglan um, at dagurin tá ið fakturi verður útflýggjaður, kann metast sum dagurin tá ið lating fer fram, er við, tí í praksis er tað í mongum førum torfart at siga, akkurát nær latið varð.

Orðingin "skjótast aftaná at latingin er endað" er ikki nærri lýst í lógini, men útflýggjan av faktura og avrokningarskjali má ikki fara fram seinni enn tað, sum vanligt er innan viðkomandi vinnugrein.

Steðgar eitt skrásett virki sínum gjaldingum, og búgvið verður skrásett fyri at halda fram ella avtikið, skulu latingar fram til dagin, tá ið virkið steðgaði gjaldingini, bókast í meirvirðisgjaldsroknskapin hjá virkinum.

Upphæddir, ið verða kravdar frá keyparanum, skal seljarin rokna við í avgjaldsskyldugu søluna, uttan mun til um spurningurin um gjalding endar sum rættarsak millum seljara og keypara.

Virki, sum í einum senda út fleiri giroinngjaldingarkort at gjalda í pørtum, sum í útsjónd og innihaldi eru fakturar, skulu rokna alla ta upphædd, sum er uppkravd í hesum tíðarskeiði, við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu í tí tíðarskeiði, tá ið giroinngjaldingarkortini verða send út.

Sama er galdandi fyri virki, sum á henda hátt regluliga senda út uppkrevjingar møguliga saman við einari serstakari uppgerð.

Um so er, at tann parturin á girooyðiblaðnum, sum er kvittan, ella uppgerðin, ið send er, innihalda upplýsingar um, at meirvirðisgjald av hvørjum einstøkum gjaldi ikki kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá móttakaranum, fyrr enn rokningin fellur til gjaldingar, seinasta gjaldingardag ella aðra ásetta tíð, kann virkið kortini fáa loyvi til at bíða til henda ásetta dag við at rokna gjaldið við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu, í staðin fyri tá ið uppgerðin ella giroinngjaldingarkortini verða send móttakaranum.

**Til § 13, 3. stk.**
Verður goldið fult út ella partvíst, áðrenn lating ella fakturi verða útflýggjað, skulu gjøld (ikki íroknað meirvirðisgjald) roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu í tí tíðarskeiðinum, tá tey eru móttikin.

Tá ið goldið verður fult út ella partvíst fyri vørur og tænastur
- áðrenn vøra/tænasta er latin,
- áðrenn latingin er endað, ella áðrenn fakturi er útflýggjaður,

skulu gjøldini sostatt altíð roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, tá ið vørurnar verða móttiknar. Hetta er eisini galdandi fyri akonto gjaldingar, ið fara fram, áðrenn

latingin endaliga er farin fram.

Smásølur, sum avrokna við viðskiftafólkið hvørja viku, kunnu kortini rokna latingarnar við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, tá ið goldið verður.

Verður akonto áheitan, sum í útsjónd og innihaldi líkist faktura, útflýggjað, áðrenn goldið er, verður dagfestingin á akonto áheitanini mett sum dagurin, tá ið latið verður.

Reglurnar um gjalding framman undan v.m. hava sum endamál at sleppa undan, at fakturering verður seinkað/drigin út.

Um ein keypari góðtekur ein veksil uppá gjalding framman undan ella akonto gjalding, verður gjaldingin mett at fara fram, tá ið keyparin kontant innloysir veksilin.

"Diskonteraðir" vekslar verða vanliga innloystir, tá teir falla til gjaldingar, um so er at seljarin ikki áðrenn 6 dagar eftir hetta hevur fingið fráboðan frá veksilhandhavanum (bankanum) um, at veksilin er mótmæltur.

**Til 13, 4. stk.**
Vørur, sum verða latnar í søluumboði ella umboðssølu, verða tiknar við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum, sum vørurnar verða latnar í, ella í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum, tá ið avroknað verður við móttakaran (kommissionerin ella konsignatarin).

Í seinni nevnda dømi má fakturi ikki útflýggjast, fyrr enn avroknað verður. Verður fylgiblað ella annað fylgiskjal útflýggjað, tá ið vørurnar verða latnar, skal tað gerast greitt, at fylgiskjalið ikki er ein fakturi.

Sostatt kunnu virki innan kommissións- og konsignatiónshandil velja, nær ið tey skulu rokna vørurnar til avgjaldsskyldugu søluna.

Vørur, ið verða latnar í úrval ella til royndar, kunnu roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna sambært somu reglum sum eru ásettar fyri kommissións- og konsignatiónsvørur.

Søla v. m. av vørum, sum eitt virki hevur fingið í kommissión ella konsignatión, verða roknað við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna sambært vanliga galdandi reglum.

**Til § 13, 5. stk.**
Tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla skal gerast upp, kunnu returvørur dragast frá søluni eftir nærri ásettum treytum.

Orsøkin til hesar reglur er, at meirvirðisgjaldsskylduga sølan verður uppgjørd eftir prinsippinum fyri latingar.

Regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu skal, tá ið talan er um returvørur, fara fram

við samsýnta peninginum (ikki íroknaður meirvirðisgjald).

Fyri at rokna hesa upphædd má ein vita, nær latingin er farin fram fyri at fáa ásett/sligið fast, hvønn meirvirðisgjaldssats ið virkið hevur nýtt, við tað at reguleringin altíð skal fara fram grundað á meirvirðisgjaldssatsin sum var galdandi, tá ið latið varð.

Um meirvirðisgjald av returvørum verður roknað við 20%, kann tann peningurin, ið skal nýtast at regulera meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, roknast sum 83,33 % av tí upphæddini sum verður endurgoldin viðskiftafólkinum.

Reglan viðvíkur vørum, ið verða tiknar aftur av upprunaliga seljaranum undir sovorðnum umstøðum, at handilin er ella verður annulleraður, tað er, ið teimum førum har viðskiftafólkið fær fullan søluprís afturfyri vøruna.

Reglan skal eisini geva møguleika fyri meirvirðisgjaldsregulering, um lutvís samsýning fæst fyri vørur, sum verða sendar aftur, innan garantifreist ella verða sendar/keyptar aftur innan 1 ár eftir, at handilin er farin fram.

Harumframt er eisini møguleiki fyri meirvirðisgjaldsregulering av vørum, sum eru seldar til avgjaldingar við ognarfyrivarni ella við serligum keypssáttmála (uttan ognarfyrivarni), og sum verða tiknar aftur, av tí at keyparin ikki hevur lokið treytirnar (misrøkt av keypssáttmála).

Reglan um returvørur eigur at verða brúkt, soleiðis at fyrivarni verður tikið við handilsbrúki innan vinnulívið, fyrisiting og eftirlit.

Keypir t.d. keyparin eina nýggja vøru fyri ein lægri prís enn annars, orsaka av at gamla vøran verður latin seljaranum, kann reglan í 5. stk. ikki brúkast.

Prísavsláttur, sum verður veittur viðskiftafólki fyri vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, ið meirvirðisgjald áður er goldið fyri, kann dragast frá í avgjaldsskyldugu søluni við samsýningini (ikki íroknað meirvirðisgjald).

Prísavsláttur skal dragast frá í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiði, tá ið grundarlagið fyri regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu verður staðfest.

Meirvirðisgjaldsskyldug avgjaldingarískoyti, fíggjarískoyti, rentuískoyti o.t., ið verður roknað tá ið avgjaldingarsáttmálar verða gjørdir, kann dragast frá (ikki íroknað meirvirðisgjald) í tann mun, tað verður samsýnt keyparanum. Hetta er t.d. galdandi, um ein avgjaldingarsáttmáli verður innloystur, fyrr enn ásett var, tá ið hann var gjørdur.

**Til § 13, 6. stk.**
Tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla verður uppgjørd, verður tað møguligt sambært niðanfyri standandi reglum, at gera frádrátt í meirvirðisgjaldsskyldugu søluni fyri staðfest tap uppá skuldarar viðvíkjandi latnum vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

1. Eitt tap kann sigast at vera staðfest í hesum førum:

a. Tá ið trotabúgv, virki í avtøku (likvidatiónsbúgv) ella deyðsbúgv verður endaliga uppgjørt, og tað verður skjalprógvað, at full rindan ikki er fingin fyri fráboðað krøv.

b. Tá ið talan er um neyðskuldarsemju, tvingsils- og avtøkusemju (likvidatiónsakkord), og áogn/útistandandi ogn verður niðurskrivað í virði við einum ávísum parti av kravinum.

Tílíkar skuldsemjur eru nærri lýstar í konkurslógini § 137, pkt, 1 og 2.

Henda regla fevnir harafturímóti ikki um § 157, pkt. 3 í konkurslógini, ið viðvíkur gjaldsútseting (skuldargrið).

c. Tá ið kreditorar taka undir við einari sjálvbodnari skuldsemju, ið førir við sær ein niðurskurð av krøvum frá kreditorum móti skuldara, og orsøkin til at kreditorarnir taka undir við skuldsemjuni hevur sum endamál, at meginparturin av krøvunum verður rindaður.

Tá ið mett verður um hetta, eigur dentur at verða lagdur á:

at uppskot til skuldsemju er sett fram av advokati/vinnugreinsfelagi,

at framlagda roknskapartilfarið - aktuell statusuppgerð v.m. - er gjørt av statsautoriseraðum ella skrásettum grannskoðara,

at í minsta lagi helvtin av kreditorunum (peningaliga roknað) hava tikið undir við skuldsemjuni,

at býtispeningurin á skuldsemjuni í minsta lagi er líka stórur, sum roknaði býtispeningurin hevði verið, um talan varð um konkurs,

at skuldsemjan samanumtikið tømir ogn (+ peningaogn) skuldarans, og at kreditor ikki stendur skuldaranum nær, javnber § 2 í konkurslógini.

Rímiliga góð prógv skulu kunna vísast fyri omanfyri nevndu krøvum, og býtispeningur á skuldsemjuni skal t.d. kunna prógvast við serligari váttan frá advokati/ vinnugreinsfelagi.

Sjálvboðin skuldsemja (akkord) er ein avtala millum skuldara og kreditorar, sum ber við sær, at kreditorarnir geva ein part av áogn/útistandandi peninginum eftir.

Sjálvboðið fíggjartrot (likvidatión) er harafturímóti ikki ein sjálvboðin skuldsemja, við tað at skuldarin ikki sleppur undan tí partinum av skuldini, sum ikki verður rindaður við trotapeninginum. Tap, ið komast av sjálvbodnum fíggjartroti, eru umfevnd av reglunum í pkt. f.

Tá ið avgerast skal, um eitt tap kann metast at vera staðfest, má ein heildarmeting gerast at vita, um kreditor tekur undir við skuldsemjuni fyri at fáa mest møguligt av kravinum rindað.

Við hesa heildarmeting verður dentur lagdur á omanfyri lýstu umstøður (t.d. at uppskot til skuldsemju er sett fram av advokati/vinnugreinsfelagi), men tað verður ikki kravt, at sjálvbodna skuldsemjan samsvarar neyvt við tær í regluni nevndu umstøður.

Við heildarmeting kann dentur harumframt leggjast á, um skattavaldið hevur góðtikið, at tapið kann dragast frá í inntøkuuppgerðini.

d. Tá ið útskrift av fútaprotokollini vísir, at einki er komið burtur úr fútarættarviðgerð fyri viðkomandi krav, ella tá ið tað út frá fútaprotokollini kann prógvast, at ein annar kreditorur innan í mesta lagi 6 mánaðir hevur framt úttøku hjá viðkomandi debitori uttan at kunna fáa fult rind fyri sína áogn/útistandandi pening.

e. Tá ið føst ogn, tað er bæði bústaður og vinnuvirki hjá einum virki, ið verður rikið av einstaklingi, er seld á tvingsilssølu, uttan at kreditor av hesum fær rind fyri áogn/útistandandi pening. Tað er ein treyt, at kreditorurin við roknskapartilfari v. m. viðvíkjandi debitorinum kann prógva, at kravið er endaliga mist.

f. Annars tá ið metast kann, at nóg mikið er gjørt fyri at fáa krøvini rindað. Tá ið metast skal um hetta, má hugsast um støddina á kravinum. Tað er vanliga ein fyritreyt fyri at kunna gera frádrátt, at handilssambandið við viðkomandi debitor er steðgað í minsta lagi eitt ár, áðrenn frádráttur verður gjørdur.

Reglan er serstakliga ætlað smærri krøvum, sum hava útreiðslur í samband við møguliga innheinting, ið eru órímiliga stórar samanborið við virðið á kravinum.

Tala umstøðurnar fyri tí, kunnu frávik gerast frá regluni um, at góðkenning av frádrátti er treytað av, um handilssambandið við viðkomandi debitor er steðgað í minsta lagi 1 ár, áðrenn frádráttur verður gjørdur.

Reglan kann eisini nýtast í førum, har tað kemst av sjálvbodnari avtøku (likvidatión).

2. Tað er í øllum førum ein fyritreyt fyri at gera frádrátt, at tað sæst í roknskapartilfarinum v.m., hvussu er við útistandandi krøvum, og at roknskapurin annars verður førdur soleiðis, at tað verður tryggjað, at frádrigin peningur verður tikin við í avgjaldsskyldugu søluna.

3. Sum meginregla kann frádráttur ikki gerast fyri væntað tap av debitori.

Væntað tap av krøvum í trotabúgvi og deyðsbúgvi (skuldfrágongubúgvi) kann tó frádragast fyribils, áðrenn búgvið er endaliga viðgjørt. Tað er eín treyt, at virkið hevur eina váttan frá bústjóranum um, at býtispeningurin (dividendan) ikki kann væntast at fara upp um ein nærri ásettan prosentpart av kravinum.

Fyribils frádráttur fyri væntað tap kann eisini gerast, tá ið skuldarin hevur boðað frá gjaldssteðgi.

Tað er ein treyt, at váttan er fingin frá einum av skiftirættinum settum eftirliti, um at tað má væntast, at kreditorar við ongum framíhjárætti bert fáa rind fyri ein nærri ásettan prosentpart av tí teir hava til góðar við tí hollastu av teimum kreditskipanum, ið arbeitt verður við.

Tað er harumframt ein treyt, at rokning av "dekningsprosentinum" byggir á eina ajourførda statusuppgerð fyri skuldaran, ið eftir áheitan skal sendast tollvaldinum.

Frádráttur kann gerast við tí staðfesta tapinum, ikki íroknað avgjald. Um so er, at kravið seinni verður goldið fult ella partvíst, skal fingni peningurin (ikki íroknaður avgjald) roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna.

Fyri at rokna hesa upphædd má vitast, nær latið hevur verið, fyri at fáa sligið fast, hvønn meirvirðisgjaldssats virkið hevur nýtt.

Er meirvirðisgjald av returvørum roknað við 20%, kann tann upphædd, ið skal nýtast við regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu roknast sum 83,33 % av tí upphædd, sum verður samsýnd kundanum.

**Til § 13, 7. stk.**
Sambært § 13, 7. stk. kann frádráttur - tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla skal gerast upp undir ávísum treytum gerast fyri kassafrádrátt, bonus, býtispening o, t. , sum hava treytir, ið ikki eru loknar, tá ið latið (fakturerað) verður, men sum seinni verða effektivar.

Skrásett virki kunnu sambært hesum gera regulering av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu, um fylgjandi treytir eru loknar:

- treytaði avslátturin skal viðvíkja latingum til eitt skrásett virki, sum tá ið inngangandi meirvirðisgjald skal gerast upp, kann rokna meirvirðisgjald av viðkomandi lating við í inngangandi avgjald, javnber § 15, 3. stk.,

- kreditnota skal útflýggjast yvir veittan avsláttur við upplýsing um meirvirðisgjald, javnber § 17, 1. og 2. stk.

Tá ið selt verður til ikki-skrásett virki, herímillum einstakar brúkarar, kann tílíkur frádráttur ikki gerast við uppgerð av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni, hóast treytaði avslátturin seinni verður effektivur, javnber § 7, 2. stk. litra e.

**Til § 13, 8. stk.**
Vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, sum meirvirðisgjald skal gjaldast av, tá ið tær vera tiknar burturúr

- til nýtslu hjá handhava virkisins
- til endamál, ið ikki viðvíkja sølu virkisins av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ella
- til tey í § 16, 3. stk. umrøddu endamál (t. d. gávur, matur ella onnur naturalløn til starvsfólkið),

skulu roknast við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiðinum, tá tey eru tikin í nýtslu.

## VI. AVGJALDSSATSURIN

**§ 14. Avgjaldið er 20% av avgjaldsskyldugu søluni.**

**Til § 14.**
Miðað verður móti, at meirvirðisgjald og tey punktgjøld, sum skulu vera framyvir, skulu geva landskassanum somu inntøku, sum núgaldandi tollskipan.

Útgangspunktið fyri valinum av 20% er búskapartøl fyri árið 1990.

Kanningar eru gjørdar av gott 400 vinnuroknskapum umboðandi allar vinnur. Stakroyndin er roknað upp, so ein fær eina fullfíggjaða mynd av tí meirvirðisgjaldsskylduga grundarlagnum. Út frá hesum er tað meirvirðisgjaldsskylduga grundarlagið (tær vinnur, ið standa í §§ 3 og 12 eru undantiknar, tó eru útflutningsvinnurnar við) í 1990 13,1 mia. kr. Uppií hesum tali er tó útflutningurin, sum í 1990 hevði eitt tal upp á 2,314 mia. kr. Hetta talið skal dragast frá fyri at fáa meirvirðisgjaldsskyldugu bruttosøluna, ið sostatt verður 10,786 mia. kr.

Hetta gevur við 20% í meirvirðisgjaldi eina bruttoinntøku upp á 2,157 mia. kr.

Frá hesum skal dragast meirvirðisgjald av teimum vørum, sum tær meirvirðisgjaldsskyldugu fyritøkurnar nýta í sínum virksemi. Og aftrat skal leggjast meirvirðisgjald fyri innfluttar vørur og tænastur.

Í 1990 nýttu meirvirðisgjaldsskyldugu vinnurnar (útflutningsvinnur tó íroknaðar) meirvirðisgjaldsskyldugar vørur og tænastur fyri 10,0 mia. kr. Tað merkir, at vinnurnar kunnu draga 2,00 mia. kr. frá.

Eftir eru 157 mio. kr. í nettoinntøku hjá landskassanum.

Afturat skal so leggjast meirvirðisgjald av innfluttum vørum og tænastum. Vøruinnflutningurin (skip frároknað) í 1990 var 1, 88 mia kr. 20 % av hesum er 376 mió kr.

Tilsamans 533 mio. kr.

Landskassin hevði eina inntøku upp á umleið 155 mio. kr. í tolli, punktgjøldum og framleiðslugjøldum av tubbaki, spiritusi, víni og luktilsi. Roknað verður her við, at hesi gjøld verða varðveitt.

Um meirvirðisgjald upp á 20% og tey nevndu punktgjøldini høvdu verið í gildi í 1990, so hevði landskassin tá fingið 688 mio. Kr. í inntøku netto av hesum gjøldum.

Samlaða inntøka landskassans av tolli og framleiðslugjøldum var í 1990 675 mio. kr.

Óvissurnar eru sera stórar í ásetingini av meirvirðisgjaldssatsinum.

Væntast kann, at bæði vinnumynstur og eftirspurningsmynstur fara at verða nógv ávirkað av umleggingini. Tær vinnur, har avgjaldstrýstið økist, fáa helst minni virksemi, og eftirspuningurin eftir teimum vørum, ið fáa minni avgjald, økist. Harumframt broytast sjálvsagt tær búskaparligu umstøðurnar annars ár undan ár.

Ásetingin av meirvirðisgjaldssatsinum er eisini ávirkað av, hvussu nógv ein ætlar at taka inn sum punktgjøld. Nevnt hevur verið, at nýggja spirituslóggávan fer at gera alkoholiskar drykkjuvørur bíligari, um ein ikki hækkar punktgjaldið. Í tann mun punktgjaldið verður hækkað, verður kravið til meirvirðisgjaldsinntøkuna minni. Nevnast skal eisini, at í omanfyri nevndu útrokning er meirvirðisgjald av innfluttum tænastum ikki tikið við, tí eingin skráseting er av hesum tænastum. Ein varislig meting er, at meirvirðisgjaldsinntøkan haðani hevði verið gott 20-30 mió kr.

**Talva: Hevuðsupphæddir fyri meirvirðisgjald (20%)**

| | **Grundarlag mia kr.** | **Roknað meirvirðisgjald (20%)** |
|---|---|---|
| Samlaður bruttoumsetingur hjá mvg skyldugum virkjum | 13,100 | - |
| Útflutningur hjá mvg-skyldugum virkjum | - 2,314 | - |
| Mvg-skyldugur bruttoumsetningur | 10,786 | 2,157 |
| Mvg, ið kann dragast frá í vinnu | -10,000 | - 2,000 |
| Netto | 0,786 | 0,157 |
| Innflutningur, ið skal lata mvg | + 1,880 | + 0,376 |
| Tilsamans | 2,666 | 0,533 |
| Innfluttar tænastur, ið lata mvg | + 0,125 | + 0,025 |
| Tilsamans | 2,791 | 0,558 |

Tað er ikki ráðiligt at seta meirvirðisgjaldssatsin lægri enn 20%, tí sum skilst eru óvissurnar sera stórar. Eisini kann ein tað fyrsta árið rokna við, at skiftisskipanir fara at seta krøv til landskassagjaldførið.

Roknast má við, at longu tá ið ein ársfjórðingur er farin av 1993, so má ein gera støðuna upp og meta um gongdina í inntøkunum frá meirvirðisgjaldinum. Um neyðugt má ein broyta satsin. Neyðugt verður kanska at gera hetta fleiri ferðir í 1993.

## VII. AVGJALDIÐ

**§ 15. Skrásett virki skulu fyri hvørt avgjaldstíðarskeið gjalda landskassanum munin millum útgangandi og inngangandi avgjald, javnber § 20. Er inngangandi avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið størri enn útgangandi avgjaldið fyri sama tíðarskeið, fær virkið munin endurrindaðan sambært reglunum í § 24.**
**2. stk. Útgangandi avgjaldið í einum avgjaldstíðarskeiði er avgjaldið av avgjaldsskyldugari sølu í tíðarskeiðinum, javnber V. kapittul.**
**3. stk. Inngangandi avgjaldið er avgjaldið sambært hesi lóg av keypi v.m. hjá einum virki av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum til nýtslu hjá virkinum, javnber tó § 16. 4. stk. Inngangandi avgjaldið í einum avgjaldstíðarskeiði er tað avgjaldið, sum í tíðarskeiðinum er fakturerað til eitt virki av latarunum, og tað avgjaldið, sum sambært § 27 er álagt teimum vørum, sum virkið í tíðarskeiðinum hevur innflutt úr útlondum.**

**Til § 15**
Avgjaldstilsvarið er munurin millum inngangandi og útgangandi meirvirðisgjald hjá einum virki í einum avgjaldstíðarskeiði (§ 15, 1. stk., samanber § 20). Er avgjaldstilsvarið negativt, fær virkið peningin útgoldnan.

Reglan um meirvirðisgjaldstilsvarið rúmar meginregluni í meirvirðisgjaldslógini. Hon avmarkar meirvirðisgjaldstilsvarið til avgjald av tí meirvirðinum, sum er komið aftrat í virkinum.

Útgangandi meirvirðisgjald í einum tíðarskeiði er avgjald av meirvirðisgjaldsskyldugari sølu hjá einum virki í einum tíðarskeiði (§ 15, 2. stk.).

Útgangandi meirvirðisgjald er sostatt 20% av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni (§ 14), sum virkið ger upp fyri hvørt tíðarskeið, í samsvari við viðmerkingarnar til §§ 11, 12 og 13.

Inngangandi meirvirðisgjald í einum avgjaldstíðarskeiði er meirvirðisgjald av keypi v.m. av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, sum virki hevur keypt, og sum verða brúktar av skrásetta virkinum (§ 15, 3. stk.).

Inngangandi meirvirðisgjald í einum avgjaldstíðarskeiði er tað meirvirðisgjald, sum í

tíðarskeiðinum er fakturerað til virkið av latarunum. Harumframt kann meirvirðisgjald av innflutningi roknast við í inngangandi meirvirðisgjald, javnber § 15, 4. stk. og § 27. Í hesum sambandi er uttan týdning, um virkið hevur kredit uppá meirvirðisgjald av innflutningi.

Í § 16 eru ásettar nærri reglur um, í hvønn mun meirvirðisgjald av keypi kann roknast við til inngangandi meirvirðisgjald, og víst verður tí í hesum sambandi til viðmerkingarnar til nevndu grein.

**§ 16. Við í inngangandi avgjaldið verður bert roknað avgjald av innkeypi v.m., ið burturav viðvíkur sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.**
**2. stk. Landsstýrið kann áseta reglur, soleiðis at nærri ásettir partar av inngangandi avgjaldi kunnu roknast av keypum v.m., ið ikki burturav viðvíkja sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum. Landsstýrið kann harumframt áseta reglur um regulering av frádrátti fyri inngangandi avgjald, tá íløgugøgn, herímillum føst ogn, gerast nýtsla, sum ber eina broyting við sær í rættinum til frádrátt. Regulering kann fara fram upp til 5 ár, fyri fasta ogn upp til 10 ár, eftir at íløgugøgnið er útvegað.**
**3. stk. Við í inngangandi avgjald kann ikki roknast avgjald av keypi v.m., sum viðvíkur:**
**a. Mati til handhava og starvsfólk á virkinum.**
**b. Útvegan og rakstur av íbúð fyri handhava og starvsfólk á virkinum.**
**c. Naturaliusamsýning til starvsfólkið á virkinum.**
**d. Útvegan og rakstri av vøggustovu, barnagarði, frítíðarheimi, feriuheimi, summarhúsi o.t. fyri starvsfólkið á virkinum.**
**e. Umboðan og gávum.**
**f. Útvegan og rakstri av persónakførum.**
**4. stk. Ríkis-, lands- og kommunalir stovnar av tí slagnum, sum eru nevndir í § 3, 1. stk. punkt d, kunnu einans rokna keyp v.m., sum viðvíkur tí partinum av sølu, sum er avgjaldsskyldugur, við í inngangandi avgjaldið. Hevur stovnurin sølu til útlond v.m., javnber § 12, 1-4 stk., kann avgjaldið av keypi viðvíkjandi hesum parti av solu eisini roknast við í inngangandi avgjaldið.**
**5. stk. Verða vørur v.m., sum verða nýttar av handhavanum á virkinum, roknaðar við í avgjaldsskylduga sølu hjá virkinum sambært § 11, 1. stk., kann avgjaldið av keypunum raknast við í inngangandi avgjaldið. Sama er galdandi fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur, ið verða nýttar til endamál, sum ikki viðvíkja sølu hjá virkinum av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, ella til endamál sum nevnt í 3. stk.**
**6. stk. Virki, ið selja ella útleiga motorakfør ella reka koyriskúla, kunnu uttan mun til regluna í 3. stk., punkt f, rokna avgjaldið av innkeypi v.m. til hesi endamál við í inngangandi avgjaldið.**

**Til § 161. stk.**
Sambært § 16, 1. stk. er tað bert meirvirðisgjald av keypi v, m. , ið burturav viðvíkur sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, ið skal roknast við í inngangandi meirvirðisgjald.

Inngangandi avgjaldið ella frádráttarrætturin fevnir ikki bert um avgjald á tilfari, ið verður keypi til framleiðing av vørum, og vørur, ið verða keyptar til at selja víðari, men eisini avgjald á aðrari nýútvegan, ið virkið fær útreiðslur av. Dømi um hetta eru lastbilar, skrivstovuinnbúgv og egið byggjarí og umvælingar, trygdarútgerð til virkið, herímillum eldsløkkingarútgerð. Blómur at dekorera matstovur og hárfríðkanarstovur. Vikubløð og tíðarrit, sum liggja frammi á hárfríðkanarstovum. Fakbløð og fakbøkur innan økið hjá virkinum.
Keyp, ið gevur rætt til frádrátt, kann t.d. setast upp soleiðis:

a) søluvørur
- vørur, keyptar at selja víðari ella at leiga út
- tilfar (rávørur og hálvfabrikata) at framleiða vørur
- vørur, ið verða nýttar at framleiða meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, t.d. eykalutir til umvælingar

b) innballing og flutningur
- innballing, t.d. pappír, plastposar, sekkir og kassar
- vøruflutningur, t. d. farmur og pakkaporto

c) rakstrargagn
- bygging, umvæling og viðlíkahald av bygningum og aðrari fastari ogn, ið bert er til virkið at nýta (verksmiðjur, sølubúðir v.m.)
- rakstrargøgn, t. d. maskinur, amboð, útgerð til laboratorium og goymslur, innbúgv til verksmiðju, goymslu, sølubúð og skrivstovu og umvæling og viðlíkahald av hesum
- flutningsfør (fyri keyp og rakstur av bilum galda serligar reglur)
- útgerð til fiskifør

d) útreiðslur
- brennievni, ravmagn, gass og vatn til virki
- telefon, (telefax,) telex o.t.
- prentlutir og skrivstovulutir
- reingerð
- arbeiðsklæði og búnar, ið hoyra til virkið, og sum verða nýtt meðan arbeitt verður fyri virkið
- lýsingar
- sýnislutir og reklamulutir, t.d. bóklingar, uppritsbøkur, álmanakkar, kúlupennar, øskubikar o.t. ið er hevur navn virkisins, vørumerki ella tílíkt, og sum verður latið fyri einki.

Í 3. stk. eru ásettar reglur um at nøkur ávís avgjøld ongantíð kunnu roknast við í inngangandi avgjaldið.

**Til § 16, 2, stk.**
Sambært 2. stk. ásetir landsstýrið reglur soleiðis at ávísir partar av inngangandi avgjaldi kunnu roknast av keypum v.m., ið ikki burturav viðvíkja sølu av vørum og avgjalds-

skyldugum tænastum.

Orsøkin til at neyðugt verður at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi er, at nøkur virki fara at hava bæði meirvirðisgjaldsskylduga og meirvirðisgjaldsfría sølu, og tí fara hesi virki at gera keyp, ið bæði fara at verða brúkt í meirvirðisgjaldsskylduga og meirvirðisgjaldsfría partinum av virkinum.

Sum dømi um sovorðin virki kunnu nevnast:

- advokatar (meirvirðisgjaldsskyldugar advokattænastur og meirvirðisgjaldsfrí ognarumsiting)

- ognarmeklarar (meirvirðisgjaldsskyldugt ognarmeklaravirksemi og meirvirðisgjaldsfríur ognarhandil)

- koyriskúlar (meirvirðisgjald-skyldug undirvísing viðvíkjandi vanligum koyrikorti og meirvirðisgjaldsfrí undirvísing viðvíkjandi vinnuligum koyrikorti)

- leasing virksemi (meirvirðisgjaldsskyldug útleiga og meirvirðisgjaldsfrítt fíggjarvirksemi)

- vognmenn (meirvirðisgjaldsskyldugur vøruflutningur og meirvirðisgjaldsfríur fólkaflutningur)

- skeiðvirksemi (meirvirðisgjaldsskyldugt ráðgevandi virksemi og meirvirðisgjaldsfrí undirvísing)

Neyðugt verður tí í kunngerð at áseta reglur um, at sovorðin virki bert hava lutfalsligan frádráttarrætt fyri keyp, sum bæði viðvíkur meirvirðisgjaldsskyldugum og meirvirðisgjaldsfríum aktivitetum. Hetta er ofta skrivstovuinnbúgv, edv-tól, telefonútreiðslur, streymur og hiti, høli og samsýningar til advokat og grannskoðara.

Lutfalsligi frádráttarrætturin fyri felagskeypini verður uppgjørdur eftir lutfallinum millum sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum (ikki íroknað meirvirðisgjald) og samlaða sølu (ikki íroknað meirvirðisgjald) hjá virkinum.

Søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum fevnir um ta sølu, ið meirvirðisgjald verður rindað fyri, og ta sølu, sum kann haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu (útflutning, sølu av tíðindabløðum og sølu, útleigu og umvæling av ávísum skipum og flogførum).

Samlað søla skal roknast sum søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum sum omanfyri frágreitt "íroknað" (aðra) sølu, herímillum søla av tænastum, ið eru frítiknar frá meirvirðisgjaldsskylduni.

Dømi:

| | |
|---|---|
| a. Meirvirðisgjaldsskyldug søla | 900.000 kr. |
| b. Útflutningur | 300.000 kr. |
| c. Søla av meirvirðisgjaldsfríum tænastum | 400.000 kr. |
| Samlað søla | 1.600.000 kr. |

Frádráttarrætturin er $\frac{1.200.000\ (a+b)}{1.600.000\ (a+b+c)} \times 100 = 75\%$

Summar inntøkur kunnu í ávísum førum haldast uttan fyri samlaðu søluna, tá ið lutfalsligi frádráttarrætturin verður gjørdur upp. Mest umráðandi eru rentur og tílíkar fíggjarligar inntøkur, inntøkur frá sølu av størri rakstrargøgnum, fastari ogn og tilskoti.

Virki, ið umframt meirvirðisgjaldsskyldugar aktivitetir reka (meirvirðisgjaldsfrítt) fíggjarvirksemi ella annars selja meirvirðisgjaldsfríar tænastur, skulu viðgera rentuinntøkur og tílíkar fíggjarligar inntøkur sambært fylgjandi reglum:

1. Rentuinntøkur frá fluttum (fremmandum) krøvum verða mest at stava frá fíggjarvirksemi og skulu tí altíð roknast við í samlaðu søluna, tá ið frádráttarprosentið verður gjørt upp, og ávirka tí frádráttarrættin negativt.

   Fremmand krøv eru krøv viðvíkjandi sáttmálum, sum virkið ikki sjálvt hever gjørt við viðskiftafólk. Hetta er galdandi uttan mun til um kravið er flutt til ognar, til trygdar ella til ognar við avtalu um regres (aftursókn).

2. Rentuinntøkur frá keypssáttmálum og avdráttarsáttmálum, sum eru gjørdir í samband við sølu og útleigu hjá virkinum av egnum vørum, verða mettar at stava frá meirvirðisgjaldsskyldugum aktivitetum og kunnu haldast uttan fyri samlaðu søluna.

   Ein bilasøla, ið fíggjar egna bilasølu, fær sostatt ikki avmarkaðan frádráttarrætt orsakað av rentuinntøkunum frá hesi sølu.

3. Rentuinntøkur og kursvinningur frá skuldarbrøvum, partabrøvum, peningi í peningastovni og tílíkum kann haldalt uttan fyri samlaðu søluna, um hetta í mesta lagi er 10% av søluni av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum. Fer hetta upp um 10%, skal tað fult út roknast við í samlaðu søluna.

Virki, ið ikki reka fíggjarvirksemi umframt meirvirðisgjaldsskyldugar aktivitetir, skulu ikki rokna rentur, kursvinning ella aðrar inntøkur av peningaflutningi við, tá ið hesar inntøkur eru av minni týdningi ella beinleiðis eru avleiðingar av meirvirðisgjaldsskyldugum aktiviteti.

Fylgjan av hesum er, at meginparturin av virkjum, sum hava inntøkur av omanfyri

nevnda slagi, ikki fáa avmarkaðan frádráttarrætt orsakað av rentuinntøkum v. m.

Inntøkur frá sølu av maskinum og innbúgvi v. m. til keypsprís, ikki íroknaður meirvirðisgjald, sum er 50.000 kr. ella meiri og inntøkur frá sølu av fastari ogn, ið hevur verið nýtt til meirvirðisgjaldsskyldugan aktivitet, skulu ikki roknast við í søluupphæddirnar, tá ið lutfalsligi frádráttarrætturin verður gjørdur upp - hvørki í teljara ella nevnara.

Sama er galdandi fyri fasta ogn, tá ið ánarin sjálvboðin hevur verið skrásettur fyri útleigu.

Inntøkur frá sølu av fastari ogn, ið ikki hevur verið nýtt til meirvirðisgjaldsskyldugan aktivitet, skulu ikki roknast við í samlaðu søluna, tá ið frádráttarrætturin verður avgjørdur, um so er, at talan er um einstaka sølu av fastari ogn.

Ískoyti, sum meirvirðisgjald skal rindast fyri, skal roknast við í søluna.

Ískoyti, sum meirvirðisgjald ikki skal rindast fyri - meirvirðisgald skal bert rindast, tá ið móttakarin beinleiðis ella óbeinleiðis ger nakað afturfyri - skulu ikki roknast við í samlaðu søluna.

Frádráttarprosentið verður gjørt upp við endan á roknskaparárinum. Meirvirðisgjald av keypi, ið fer fram gjøgnum árið, kann roknast við í meirvirðisgjald av keypi grundað á frádráttarprosentið fyri undanfarna roknskaparárið (ella undanfarna ársfjórðingin, um talan er um eitt nýstovnað virki). Endalig regulering skal fara fram eftir endan á roknskaparárinum.

Frádráttarrætturin fyri keyp, ið umframt at viðvíkja meirvirðisgjaldsskyldugum aktivitetum eisini verður brúkt privat t.d. telefon, streymur, hiti, brenniolja osfr. verður gjørdur upp eftir einari meting.

Tá ið tollvaldið metir, um meirvirðisgjald er javnt býtt á virkið og á egna nýtslu, verður grundarlagið vanliga tann meting, sum er góðkend av líkningarráðnum.

Í kunngerð, ið verður gjørd við heimild í hesari grein í lógini, verða ásettar serligar reglur um frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald viðvíkjandi fastari ogn. Munur veður gjørdur á:

- bygging
- umvæling og viðlíkahaldi av bygningum
- hølum, ið verða nýtt blandað
- aðrari fastari ogn enn bygningum

Eingin frádráttarrættur er fyri meirvirðisgjald av útreiðslum til høli, ið verða nýtt sum íbúð hjá handhava ella hjá starvsfólki á einum virki. Hetta er galdandi uttan mun til um hølini samstundis eisini verða nýtt í arbeiðinum hjá viðkomandi. Tað er sostatt eingin frádráttarrættur fyri meirvirðisgjald viðvíkjandi bygging, rakstri og viðlíkahaldi av hølum, ið kunnu metast at vera ein partur av sjálvari íbúðini, herímillum onnur vanlig høli at búgva í. Hetta er t.d. galdandi fyri fýrrúm, pultikamar, skrivstovu, teknistovu og tílíkt og

vanligar garasjur, sum eru bygd saman við íbúðini.

Tílík høli kunnu ikki metast burturav at vera bygd til nýtslu hjá virkinum, tá ið hølini eftir innrættingini at døma og alt eftir hvar tey liggja í mun til egnu íbúð handhavans og alt eftir ítøkiligum umstøðum annars í hvør um einstøkum føri (herímillum t.d. hvussu stór vinnuhølini eru og hvar tey liggja) kunnu metast at vera ein partur av hølum virkisins.

Tá ið avgerast skal, um frádráttarrættur kann fáast viðvíkjandi hølum í egnari íbúð hjá handhava, verður dentur lagdur á, at hølini eru skild frá ibúðini og liggja soleiðis fyri, at hølini ikki kunnu metast at vera ein integreraður partur av íbúðini. Um hølini liggja soleiðis fyri, at neyðugt er at fara ígjøgnum tey fyri at fáa atgongd til egna íbúð, verða hølini sum meginregla mett at vera ein integreraður partur av íbúðini, og hervið hava tey ongan møguleika fyri frádrátti av meirvirðisgjaldi av keypi.

Meirvirðisgjald viðvíkjandi bygging, herímillum at byggja uppí, sum umframt høli til skrásett virki eisini innihalda onnur høli, verður roknað við í meirvirðisgjald av keypi eftir einari meting, ið er grundað á lutfallið millum byggiútreiðslurnar av hølunum hjá virkinum og samlaðu byggiútreiðslurnar.

Hava tey ymsu hølini sama standard, hvat bygging viðvíkur, kann tann parturin av meirvirðisgjaldi, sum hevur frádráttarrætt, roknast út eftir lutfallinum millum arealið á teimum hølunum, ið hava frádráttarrætt, og samlaða arealið á bygninginum.

Meirvirðisgjald av arbeiði við umbygging, umvæling og viðlíkahaldi av bygningum, ið bæði innihalda høli við frádráttarrætti og høli við ongum frádráttarrætti, kann roknast við í meirvirðisgjald av keypi í tann mun arbeiðið beinleiðis kann vísast aftur til høli við frádráttarrætti (t.d, máling av einari damuhárfríðkanarstovu í einum sethúsum). Tað er ein treyt, at latarin býtir prísin fyri arbeiðið á fakturanum.

Kann meirvirðisgjald ikki vísast beinleiðis til tey einstøku hølini í bygninginum, t.d. útvortis viðlíkahald, umvæling og skifting av hitaverki ella aðrari felags installatión, verður tann parturin, sum hevur frádráttarrætt roknaður eftir lutfallinum millum høli við frádráttarrætti og samlaða arealið á bygninginum.

Meirvirðisgjald av keypi viðvíkjandi hølum hjá einum virki, ið bæði verða nýtt í samband við sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum og í samband við sølu av meirvirðisgjaldsfríum tænastum, verður gjørdur upp eftir einari meting. Hetta er t.d. galdandi fyri viðlíkahald av høli hjá ognarmeklara, ið frá sama høli rekur bæði meirvirðisgjaldsskyldugt ognarmeklaravirksemi og meirvirðisgjaldsfrían ognarhandil.

Tá ið meirvirðisgjald fyri høli til blandaða nýtslu verður býtt eftir einari meting verður hetta vanliga gjørt grundað á sølubýti, t.e. søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í men til samlaðu søluna.

Neyðugt verður at áseta serligar reglur fyri hoteli o.t., sum leiga út høli (salir) til fundir, og onnur tiltøk, og fyri ítróttarhallir, ið av og á verða nýttar til meirvirðisgjaldsskyldug

tiltøk sum t.d. konsertir.

Meirvirðisgjald viðvíkjandi anleggi, umvæling og viðlíkahaldi av aðrari fastari ogn, enn bygging (grundir, havnir v.m.) kann – alt eftir nýtslu - roknast við í meirvirðisgjald av keypi eftir meginreglunum viðvíkjandi keypi til blandaða nýtslu ella viðvíkjandi keypi til lutfalsliga egna nýtslu.

Viðvíkjandi last- og vøruvognum hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons verða ásettar serligar reglur.

Serligar reglur verða ásettar, orsakað av at eitt munandi tal av virkjum, ið sum eyðkenni brúka akførini bæði til meirvirðisgjaldsskyldug og meirvirðisgjaldsfrí endamál, nevniliga egna koyring.

Reglurnar merkja,

at tað er bert frádráttarrættur fyri meirvirðisgjald av keypi, tá ið akfarið burturav verður nýtt í samband við sølu hjá virkinum av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, og

at meirvirðisgjald av rakstri av hesum akførum (brennievni, vasking, umvæling og viðlíkahald) fult út kann roknast við í meirvirðisgjald av keypi, hóast akfarið bert lutfalsliga verður nýtt av virkinum.

Tá ið, sum so er avgerandi, er, nær ið akførini burturav verða nýtt til meirvirðisgjaldsskyldugar aktivitetir, so virkið hevur frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av keypi.

Tá ið metast skal, um frádráttarrættur er fyri meirvirðisgjald av keypi, verður støða tikin til:

- um akfarið verður nýtt til veruligan flutning millum handilin hjá virkinum og egna íbúð
- um akfarið verður nýtt at koyra millum íbúð og skiftandi arbeiðspláss
- um avtala er gjørd millum virkið og brúkaran um nýtsluna
- um akfarið hevur amboð ella tílíkt (montørvognar), ella um goymsla er stovnað í íbúð hjá starvsfólki við tí fyri eyga at hava kallitænastu til umvæling ella tílíkt
- um virkið hevur fulla avskriving, hvat skatti viðvíkur, uppá akfarið, og –
- um skattur verður álagdur brúkaranum fyri nýtsluna.

Koyring millum heim og arbeiðspláss verður vanliga ikki rokna at vera koyring, ið viðvíkur virkinum. Tó verður koyring millum íbúð og skiftandi arbeiðspláss, herímillum av og á til fast handilsstað mett at vera koyring fyri virkið.

Fyri at skipanin um fullan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av rakstrarútreiðslum ikki skal verða misnýtt, verður ásett, at bert virki, hvørs árliga søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í minsta lagi er 10.000 kr., kunnu rokna meirvirðisgjald í samband við rakstur av vøruvogni við í meirvirðisgjald av keypi.

Fyri leigaðar last- og vøruvognar hvørs totalvekt ikki fer upp um 4 tons, sum ikki burturav verða nýttir av virkinum, kann - umframt meirvirðisgjald viðvíkjandi rakstri - 1/3 av meirvirðisgjald av leiguni roknast við í meirvirðisgjald av keypi.

Lutfalsligur frádráttarrættur fyri last- og vøruvognar, hvørs totalvekt er yvir 4 tons fylgir vanligu reglunum viðvíkjandi lutfalsligum frádráttarrætti.

Fyri at virki ikki skulu kunna spekulera uppá landskassans rokning, verður eisini neyðugt at áseta nærri reglur í kunngerð við heimild í § 16, 2. stk. um regulering av meirvirðisgjaldi í førum, tá ið fløgugøgn verða brúkt til onnur endamál, sum hava við sær broyting í frádráttarrættinum.

Skylda at regulera hevur til endamáls at javna meirvirðisgjald av keypi av størri keypum yvir eitt tíðarskeið, sum er 5 ár fyri rakstrargøgn og 10 ár fyri fasta ogn, soleiðis at frádráttarrætturin ikki bert er treytaður av frádráttarrættinum hjá virkinum fyri tað árið, sum gøgnini vóru keypt í, men lagar seg eftir (størri) árligum broytingum í frádráttarprosentinum.

Íløgugøgn fevnir um

- Maskinur, innbúgv og onnur rakstrargøgn, hvørs keypsprísur, ikki íroknaður meirvirðisgjald, fer upp um 50.000 kr., og sum er undir virðisminkan.

  Hetta merkir, at meirvirðisgjaldsskylduga virðið skal fara upp um 50.000 kr. Meirvirðisgjaldsskylduga virðið fyri nýggjar bilar er virðið, ikki íroknað meirvirðisgjald og skrásetingargjald.

  Málningar, standmyndir, aðrir listaligir lutir og ektað teppi verða mett - í tann mun frádráttarrættur er fyri tey, tá ið tey verða keypt - sum rakstrargøgn, ið ikki eru undir virðisminkan.

- Fasta ogn.

- Arbeiði av at byggja uppí og umbygging ella av at gera nútíðarhóskandi og umvæla og viðlíkahalda fasta ogn fyri eitt samlað meirvirðisgjaldsskyldugt virði, ið er meiri enn 50.000 kr.

Regulering av meirvirðisgjaldi av keypi av íløgugøgnum verður bert gjørd, um broytingar eru í frádráttarrættinum innan reguleringstíðarskeiðið.

Fyri fasta ogn og fyri arbeiði av uppí- og umbygging v. m. av fastari ogn er reguleringstíðarskeiðið tey fyrstu 10 roknskaparárini eftir keypið, íroknað tað roknskaparárið, sum íløgugøgnini eru keypt í. Tá ið føst ogn verður bygd, er tann dagurin, tá ið bygningurin kann takast í nýtslu, keypsdagurin.

Fyri onnur íløgugøgn (maskinur, innbúgv v. m.) er reguleringstíðarskeiðið fyrstu 5 árini eftir keypsdagin.

Regulering skal gerast í hesum førum:

1. Tá ið tey íløgugøgn, sum virkið við keyp hevur havt fullan ella lutfalsligan frádráttarrætt fyri, fara yvir til aðra nýtslu, sum virkið ikki hevur frádráttarrætt fyri.

   Hetta er t.d. galdandi fyri uppítøku av hølum hjá virkinum ella einum parti av hesum til íbúð hjá handhava ella starvsfólki.

   Tá ið sjálvstøðugt skrásett virki verða samanløgd (fusionerað), kann ikki sleppast undan uppgerð av møguligari reguleringsskyldu.

2. Tá ið íløgugøgn, sum virkið tá ið keypt varð, hevði fullan frádráttarrætt fyrr, fara yvir til aðra nýtslu, sum virkið hevur lutfalsligan frádráttarrætt fyri, t. d. teorihøli í einum koyriskúla, ið burturav hava verið nýtt til meirvirðisgjaldsskylduga undirvísing, sum byrjar við meirvirðisgjaldsfríari koyriundirvísing.

3. Tá ið grundarlagið fyri lutfalsligan frádráttarrætt verður broytt, so virkið fær minni lutfalsligan frádráttarrætt.

Fær eitt virki størri rætt til frádrátt enn, tá ið keypt varð, kann regulering fara fram. Hevði virkið ikki frádráttarrætt, tá ið keypt varð, kann regulering ikki fara fram, hóast virkið seinni nýtir íløgugøgnini til endamál, ið hevur frádráttarrætt.

Regulering skal ikki gerast í hesum førum:

1. Tá ið maskinur og onnur rakstrargøgn hjá virkinum verða seld, um so er, at meirvirðisgjald verður roknað við sølu, ella um vørurnar verða útfluttar.

   Meirvirðisgjaldsfrí avhending av rakstrargøgnum í samband við heila ella lutfalsliga avhending av virki sambært § 12, 5. stk., í meirvirðisgjaldslógini er harafturímóti umfevnd av reguleringsskylduni, ið kortini kann flytast til nýggja virkið, sjá niðanfyri.

2. Tvingsilssøla av fastari ogn ella rakstrargognum hjá virki.

3. Smærri broytingar í frádráttarprosentinum. Regulering skal ikki fara fram, um broytingin í frádráttarprosentinum er minni enn 10 í mun til frádráttarprosentið, tá ið keypt var. Lækkar frádráttarprosentið frá 75, tá ið keypt var, til 66 innan reguleringstíðarskeiðið, skal sostatt ikki regulerast.

Tá ið føst ogn verður seld, og tá ið maskinur og onnur rakstrargøgn verða avhendað sambært § 12, 5. stk. í meirvirðisgjaldslógini, hevur seljarin skyldu at regulera.

Tó verður møguleiki fyri, at ein tílík reguleringsskylda heilt ella lutfalsliga kann flytast til keyparan, treytað av at keyparin váttar, at hann vil átaka sær reguleringsskylduna fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum.

Hevur keyparin í minsta lagi sama frádráttarrætt fyri íløgugøgnini, sum seljarin hevði, tá ið keypt varð, kann keyparin taka yvir alla reguleringsskylduna fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum.

Hevur keyparin minni frádráttarrætt enn seljarin, kann keyparin taka yvir tann partin av reguleringsskylduni hjá seljaranum, ið svarar til frádráttarrættin hjá keyparanum fyri íløgugøgnini. Restin av reguleringsskylduni skal tá eftirregulerast av seljaranum.

Tá ið føst ogn verður seld og framvegis nýtt til endamál við frádráttarrætti, kann tollvaldið, tá ið keyparin játtar at taka yvir reguleringsskylduna fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum, loyva, at trygd verður sett fyri reguleringsskylduni.

Regulering í teimum einstøku roknskaparárunum verður fyri fasta ogn og fyri uppí- og umbyggingararbeiði v.m. av fastari ogn gjørd við 1/10 og fyri onnur íløgugøgn við 115 av somu meirvirðisgjaldsupphædd, sum varð goldin, tá ið umrøddu íløgugøgnini vóru keypt.

Reguleringin skal fara fram grundað á tær broytingar í frádráttarrættinum, sum henda innan tað einstaka roknskaparárið í mun til frádráttarrættin í tí roknskaparárinum, tá ið umrøddu íløgugøgnini eru keypt.

Fara íløgugøgn frá fullum ella lutfalsligum frádráttarrætti yvir til at verða nýtt til endamál, ið ikki hevur frádráttarrætt, skal regulerast fyri restina av reguleringstíðarskeiðinum.

Fylgjandi dømi lýsa reglurnar um uppgerð av reguleringsupphæddum.

Í dømunum er tað ein fyritreyt, at virkini nýta álmanakkaárið sum roknskaparár.

Dømi 1

Virkið A keypti í mai mánað 1985 eina maskinu. Í samband við keypið roknaði virkið 30.000 kr. við í meirvirðisgjald av keypi. Tá ið virkið í juli mánað 1988 steðgar meirvirðisgjaldsskrásetingini fer maskinan yvir til nýtslu, ið ikki hevur frádráttarrætt.

Í hesum føri skulu 12.000 kr. regulerast. Hetta verður funnið soleiðis:

| | |
|---|---|
| Frádráttur, tá ið keypt var | 30.000 kr. |

Lækking við 1/5 av frádráttinum fyri hvørt roknskaparár,

ið er farið (endað) síðani keypt varð

| | | |
|---|---|---|
| 1985 .......... | 6.000 kr. | |
| 1986 .......... | 6.000 kr. | |
| 1987 .......... | 6.000 kr. | 18.000 kr. |

Reguleringsupphædd .......... 12.000 kr.

Dømi 2

Virkið B, ið vanliga hevur bæði meirvirðisgjaldsskyldugan og meirvirðisgjaldsfrían aktivitet, keypti í 1985 eina edv-skipan. Meirvirðisgjald av keypsprísinum var 500.000 kr., sum svaraði til ein árligan part uppá 100.000 kr. (1/5). Virkið hevði í 1985 80% av frádrátti og roknaði tí 400.000 kr. við í meirvirðisgjald av keypi.

Í 1986 minkaði virkið sínar meirvirðisgjaldsfríu aktivitetir, soleiðis at frádráttarprosentið fyri 1986 hækkaði til 89. Henda broyting í frádráttarprosentinum førdi tó onga regulering við sær, við tað at broytingin er minni enn 10 í mun til dagin, tá ið keypt varð (80%).

Í 1987 hevði virkið ongar meirvirðisgjaldsfríar aktivitetir - tað merkir fullan frádráttarrætt. Sostatt fekk virkið rætt til at kompensera fyri økta frádráttarrættin í mun til dagin, tá ið keypt varð. Reguleringsupphæddin verður roknað grundað á ársins "part" av goldnum meirvirðisgjaldi (100.000 kr.) og á broytingina í frádráttarrættinum (20%), tað merkir: 20% av 100.000 kr. = 20.000 kr.

Í 1988 tók virkið meirvirðisgjaldsfríu aktivetetirnar uppaftur, so at ársins frádráttarrættur gjørdist 65. Parturin uppá 80.000 kr. tann dagin, tá ið keypt var, hevur sostatt verið ov stórur, og virkið skal minka meirvirðisgjald av keypi við 15 % av 100.000 kr. = 15.000 kr.

Í 1986 gerst frádráttarprosentið 75. Henda broyting førir onga regulering við sær, við tað at hon er minni enn 10.

Síðani er reguleringstíðarskeiðið liðið, og broytingar í frádráttarrættinum í 1990 og seinni føra onga regulering við sær - heldur ikki um so er, at frádráttarprosentið í einum ella fleiri av hesum roknskaparárum verður null. Verður anleggið selt, skal meirvirðisgjald rindast av søluprísinum sambært vanligu reglunum í meirvirðisgjaldslógini.

Reguleringin kann setast upp á henda hátt:

Keypsár: 1985

Meirvirðisgjaldsupphædd: 500.000 kr.

Frádráttur, tá ió keypt varð: 80% (400.000 kr.)

| Roknskaparár | Frádráttarprosent | Reguleringsupphædd |
|---|---|---|
| 1985 | 80 | |
| 1986 | 89 | |
| 1987 | 100 | + 20.000 kr. |
| 1988 | 65 | - 15.000 kr. |
| 1989 | 75 | |

**Til § 16, 3. stk.**
Í § 16, 3. stk. eru nevnd ymisk keyp, sum virki ikki hava frádrátt fyri. Í hesum sambandi ger tað ongan mun, um keypini viðvíkja sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Niðanfyri eru gjørdar nakrar viðmerkingar til tey einstøku undantøkini:

**Til § 16, 3. stk. a**
Tá ið inngangandi avgjald hjá einum virki verður uppgjørt, kann avgjald av hotelluppihaldi og mati hjá montøri og øðrum starvsfólki, meðan tey hava arbeitt uttanbíggja, ikki roknast við. Avgjald á útreiðslum til flutning av tilfari og amboðum v.m. kann roknast við í inngangandi avgjald hjá virkinum, meðan avgjald á ferða- og uppihaldsútreiðslum og mati til starvsfólkið ikki kann roknast við í inngangandi avgjaldið.

**Til § 16, 3. stk. b**
Sambært hesi reglu er ikki frádráttarrættur fyri avgjald av bygging, rakstri og viðlíkahaldi av hølum, ið kunnu roknast at vera ein partur av privatu íbúð handhavans v.fl. uttan mun til, um hølini eisini verða nýtt í arbeiðinum hjá umrødda. Tað kann bert vera frádráttarrættur fyri hølir við tilknýti til privata íbúð, um hølini kunnu metast at vera partur av hølum virkisins. Avgerandi fyri hetta er, hvussu hølini eru innrættað, og hvussu tey liggja í mun til privatu íbúðina hjá handhava.

**Til § 16, 3. stk. e**
Avgjald á útreiðslum í samband við veitslur fyri starvsfólkið kann ikki roknast við í inngangandi avgjald.

**Til § 16, 3. stk. e**
Sambært hesi reglu er eingin frádráttarrættur fyri keyp til umboð og gávur. Reglan fevnir harafturímóti ikki um keyp til reklamu og sýnislutir, og sostatt verður frádráttarrættur fyri avgjald av keypi til reklamulutir. Neyðugt verður tí, at taka støðu til, nær talan er um gávur og nær talan er um reklamur. Viðvíkjandi reklamulutum er meginreglan, at hesir verða gjørdir í stórum tali og hava eitt lítið virði.

Hetta kann t.d. vera tendrarar ella lyklaringar, ella tílíkt við áprentaðum búmerki, ið verður gjørt í einum so stórum tali, at tað virkar sølufremjandi. Tað sum sermerkir eina gávu er harafturímóti, at hon umboðar eitt virði, og at hon ikki hevur sølufremjandi endamál sum so.

T. d. verða vanligar vørur sum kikarar, vínfløskur, barometur og ur o.a., roknað sum gávur. Keypir eitt virki 500 ur við áprentaðum búmerki fyri 30 kr. stykkið við tí endamáli at geva viðskiftafólkinum hesi, tá ið tey keypa vørur, hever virkið frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald á keypinum, tí at hetta má metast at vera reklamulutir.

**Til § 16, 3. stk. f**
Sum dømi um hess reglu kunnu útreiðslur til handilsmáltíðir ikki roknast við til inngangandi avgjaldið.

**Til § 16, 4. stk.**
Ríkis- lands- og kommunalir stovnar kunnu bert rokna meirvirðisgjald av keypi, sum viðvíkur meirvirðisgjaldsskyldugari sølu, og avgjald av keypi viðvíkjandi møguligari útflutningssølu, við í inngangandi meirvirðisgjald (§ 16, 4, stk.).

Fyri at sleppa undan tvíavgjaldi er ásett í § 16, 5. og 6. stk., at virki, ið skulu gjalda avgjald sambært § 11, 1. stk., og virki, ið útleiga motorakfør, ella koyriskúlar, kunnu rokna avgjald av keypum til hesi endamál við í inngangandi avgjald.

Niðanfyri eru gjørdar nakrar viðmerkingar til, hvat ið annars kann roknast við í inngangandi avgjald sambært § 16.

**1) Skaðar**
Tá ið skaði er hendur á goymslu ella rakstrargøgn hjá skrásettum virki, herímillum bygningar, kann virkið rokna avgjald á keypi, umvæling v. m. til umbót av skaðanum við í inngangandi avgjald í sama mun, sum virkið sambært vanligu reglunum í §§ 15 og 16 í lógini kann rokna avgjald á keypi v.m. av viðkomandi vørum og rakstrargøgnum við í inngangandi avgjald.

Hetta er galdandi, hóast virkið (tann, ið hevur verið fyri skaða) sjálvur má bera tapið av skaðanum, ella um tað kann fáa tapið rindað við endurgjaldi frá skaðavaldara ella tryggingarfelagi.

Tað tap, sum í seinasta føri skal endurrindast, verður sostatt virðið (endurkeypsprísurin, umvælingarprísurin) ikki íroknað avgjald.

Hevur tann, ið hevur verið fyri skaða bert lutfalsligan frádráttarrætt, verður tann parturin av avgjaldinum, sum tann skaddi ikki kann rokna við í inngangandi avgjaldið, lagdur aftrat tí tapi, ið skal endurrindast, virðinum (endurkeypsprísinum, umvælingarprísinum).

Um tann, ið hevur verið fyri skaða, er eitt skrásett virki og sjálvt bøtir um skaða á vørur ella rakstrargøgn, sum tað hevur frádráttarrætt fyri, skal virkið ikki rokna avgjald av útreiðslunum (tilfari, arbeiðsløn v.m.).

Um virki, ið hevur verið fyri skaða, hevur lutfalsligan frádráttarrætt, skal tað rinda avgjald, í tann mun tað ikki hevur frádráttarrætt.

Í teimum førum har tann, ið hevur verið fyri skaða, er einstaklingur ella eitt ikki skrásett virki, verður tað tap, ið møguliga skal endurrindast av skaðavaldara ella tryggingarfelagi virðið (endurkeypsprísurin, umvælingarprísurin) íroknað avgjald.

Sama er galdandi, tá ið skaðin rakar ogn hjá einum skrásettum virki, sum tað ikki hevur frádráttarrætt fyri.

Skrásettur skaðavaldari, ið skal endurgjalda skaða, íroknaðan avjgald, kann ikki rokna hetta avgjald við í inngangandi avgjaldið.

Ger eitt skrásett virki skaða á vørur, sum eru í varðveitslu ella til umvælingar hjá virkinum, kann hetta virkið tó mótrokna avgjaldið viðvíkjandi umvæling av tí skaða, sum virkið hevur gjørt, við í inngangandi avgjald, men tann, ið hevur verið fyri skaða, hevur í hesum føri ongan frádráttarrætt fyri avgjaldið.

Umbót av stormskaða á bygning í gerð verður mettur javnt við skaða á egnar vørur. Um ein byggiharri hevur teknað stormskaðatrygging, áðrenn farið verður undir at byggja, og um tað sambært byggisáttmálanum um arbeiði við at gera bygningin er byggiharrin, ið hevur ábyrgdina av at tekna brunatrygging, men entreprenørurin, ið hevur ábyrgdina av tí arbeiði, sum hann annars ger, til bygningurin er liðugur og verður tikin í nýtslu, so má entreprenørurin metast at vera tann, sum hevur verið fyri skaða, og tá ið hann sjálvur bøtir skaðan, kann hann tí lata vera at rokna avgjald av útreiðslunum av hesum. Meirvirðisgjald skal sostatt ikki setast á rokningina til tryggingarfelagið.

Tá ið talan er um flutningsskaða, har vørur verða mistar undir sending frá einum skrásettum virki, og seljarin hevur ábyrgdina av sendingini, skal seljarin ikki rinda avgjald av vørunum. Tað tap, ið møguliga skal endurgjaldast av flutningsmanninum, er sostatt vøruprísurin, ikki íroknaður avgjald.

Í teimum førum har vørur verða mistar í flutningi millum tvey skrásett virki, og keyparin hevur ábyrgdina av sendingini, kann keyparin rokna avgjald av vørunum við í inngangandi avgjaldið. Tað tap, ið møguliga skal endurgjaldast, er sostatt vøruprísurin, ikki íroknaður avgjald.

Verða vørur mistar undir sending frá einstaklingi ella ikki skrásettum virki, er tað tap, ið møguliga skal endurgjaldast, virðið á vørunum, íroknað avgjald.

Sama er galdandi, tá ið móttakarin hevur ábyrgdina av sendingin, um vørur verða mistar undir sending frá skrásettum virki til einstakling ella til ikki skrásett virki.

Fyri vørur, ið verða skaddar undir flutningi, eru somu reglur galdandi sum fyri vørur, ið verða mistar við flutning.

Tað avgjald, ið er roknað við í útgoldið endurgjald, kann ikki roknast við í inngangandi avgjaldið.

Avgjald av skeytis- og meklarasamsýningum í samband við handil við vinnuligari ogn, sum seljarin burturav hevur nýtt til rakstur av skrásetingarskyldugum virki, kunnu roknast við í inngangandi avgjaldið. Sambært kunngerð um lutfalsligan frádráttarrætt kann avgjaldið dragast frá lutfalsliga, um samsýningarnar viðvíkja ogn, ið bæði hevur verið nýtt til skrásetingarskyldugt virki og ikki skrásetingarskyldugt virki- ella til egin endamál.

Avgjald á keypi av lærubókum og øðrum undirvísingartilfari kann roknast við í inngangandi avgjaldið, í tann mun útreiðslurnar viðvíkja útbúgving av lærlingum ella aðrari fakligari útbúgving, ið verður kravd av og fult goldin av skrásettum virki. Avgjald á keypi til aðra útbúgving, kann harafturímóti ikki roknast við í inngangandi avgjaldið.

Tann, ið tekur ímóti endurgjaldi, skal ikki rinda meirvirðisgjald av peninginum, uttan so at hetta má metast at vera heilt ella lutfalsligt gjald fyri meirvirðisgjaldsskyldugar latingar.

Meginreglan er, at tað endurgjald, sum entreprenørar v.fl. skulu veita byggiharranum sum rind fyri uppgjørdan eykakostnað (íroknaður meirvirðisgjald), sum stendst av at arbeiðið er seinkað ella ikki gjørt, ikki kann geva umrøddu entreprenørum grundarlag fyri at rokna nakran part av endurgjaldinum við í inngangandi meirvirðisgjald. Talan skal vera um eitt reint endurgjald, við tað at eingin meirvirðisgjaldsskyldug tænasta er latin sum samsýning fyri endurgjaldið.

**2) Afturtøka**

Tá ið meirvirðisgjald verður gjørt upp í samband við afturtøku av rakstrargøgnum v.m., ið eru seld til avgjaldingar og við ognarfyrivarni, má skiljast ímillum, um rakstrargøgnini v.m. verða tikin fyri sambært galdandi ognarfyrivarni av upprunaliga seljaranum ella av øðrum virki t.d. einum fíggjarstovni.

Seljarin (latarin) kann gera regulering av meirvirðisgjaldsskyldugu søluni við tí upphædd (ikki íroknað meirvirðisgjald), ið verður samsýnd/góðskrivað keyparanum í samband við afturtøkuna sambært vanligu reglunum í lógini. Hetta er treytað av, at kreditnota verður útflýggjað.

Í førum tá ið vørur og rakstrargøgn v.m., sum eru keypt til avgjaldingar við ognarfyrivarni, og hvørs inngangandi meirvirðisgjald keyparin hevur frádráttarrætt fyri, verða afturtikin, skal inngangandi meirvirðisgjald (grundað á kreditnota, sum seljarin hevur útflýggjað) lækkast við meirvirðisgjaldi av tí virðinum, sum við afturtøkuna er góðskrivað fyri umrøddu rakstrargøgn v. m.

Við afturtøku av vørum og rakstrargøgnum v.m. hjá einum trotabúgvi ella tílíkum, verður gjørt á sama hátti, sum omanfyri nevnt.

Tollvaldið fráboðar meirvirðisgjald í búgvinum sum einfalt krav (simpel fordring). Í førum har trotabúgv velja at yvirtaka avtaluna, verður meirvirðisgjald viðvíkjandi afturtøk-

uni í búgvinum fráboðað sum hópkrav (massekrav). Meirvirðisgjald viðvíkjandi afturtøku (afturkeypi) av vørum v.m., ið er selt til avgjaldingar við ongum ognarfyrivarni, men við trygd í leysoyrapantibrævi, verður altíð fráboðað í búgvinum sum hópkrav.

**Afturtøka framd av fíggjarstovnum**
Ein fíggjarstovnur - ella eitthvørt annað virki enn upprunaligi seljarin - ið hevur tikið yvir ein sáttmála við ognarfyrivarni, má ikki í samband við yvirtøkuna útflýggja kreditnota við fráboðaðum meirvirðisgjaldi - heldur ikki um stovnurin er skrásettur fyri at hava selt umrøddu vørur, við tað at talan ikki er um returvørur.

Tað verður heldur ikki góðkent, at stovnurin í sovorðnum føri útflýggjar avrokningarskjal við tilskilaðum meirvirðisgjaldi, við tað at eingin vanligur handil er gjørdur.

Í relatión til keypara kann síggjast burtur frá regulering av tí meirvirðisgjaldi, ið er drigið frá við keypið - eisini um keyptu rakstrargøgnini v. m. eru umfevnd av reglum um íløgugøgn.

Í samband við yvirtøku av trotabúgvi (konkursbo) verður eingin regulering gjørd av meirvirðisgjaldi.

**3) Uppgerð av inngangandi meirvirðisgjald**

Inngangandi meirvirðisgjald í einum meirvirðisgjaldstíðarskeiði er tað meirvirðisgjald, sum latararnir hava fakturerað til virkið í tíðarskeiðinum, og sum virkið sambært galdandi reglum hevur frádráttarrætt fyri.

Tað er sostatt fakturadagfestingin, ið er avgerandi fyri í hvørjum tíðarskeiði, meirvirðisgjaldsupphæddin kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjaldið.

Harafturímóti er ikki neyðugt fyri at kunna gera frádrátt, at tilfaktureraða meirvirðisgjaldsupphæddin er goldin. Meirvirðisgjald viðvíkjandi t.d. einari maskinu, ið er keypt til avgjaldingar við ognarfyrivarni, kann sostatt roknast við í inngangandi meirvirðisgjaldið longu tann dagin, tá ið tað verður fakturerað (samanber viðmerkingar til § 13).

Sostatt fellur dagurin, tá ið latarin skal rokna faktureraðar vørur og tænastur við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna saman við degnum, tá ið keyparin kann rokna meirvirðisgjald av hesum við í inngangandi meirvirðisgjaldið.

Fyri at kunna fáa frádrátt fyri inngangandi meirvirðisgjald, er tað ein vanlig treyt, at fakturar, ið lúka ásett krøv, kunnu vísast sum skjalprógv. Keypssáttmálar - t.d. viðvíkjandi motorakførum - verða ikki mettir at lúka krøv til fakturar og kunnu ikki nýtast til prógv fyri inngangandi meirvirðisgjald.

Meirvirðisgjald av keypi til nýtslu hjá virkinum, ið er fakturerað til og goldið av virkinum, kann vanliga roknast við í inngangandi meirvirðisgjald, eisini um virkið seinni fær keypsprísin heilt ella lutfalsliga afturgoldnan frá triðjamanni (t.d. í førum, tá ið arbeiði

verður gjørt á fastari ogn, sum virkið nýtir, og tað eru aðrir - møguliga ikki skrásettir - sameigarar av ognini).

Keyp, ið heilt ella lutfalsliga viðvíkur meirvirðisgjaldsskyldugum aktivitetum hjá einum skrásettum íognarfelagi, kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald, hóast útreiðslan er fakturerað til ein ávísan íognara.

Meirvirðisgjald av fakturerøðum frammanundangjaldingum kann eisini roknast við í inngangandi meirvirðisgjald.

Um eitt virki, rindar frammanundan til latara av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, og verður fyri tapi av tí, sum er goldið frammanundan, orsakað av at latarin kemur í fíggjartrot (konkurs), kann keypandi virkið rokna meirvirðisgjaldsupphæddina av tí, sum er goldið frammanundan, við í inngangandi meirvirðisgjald. Seinni regulering av inngangandi meirvirðisgjaldi skal ikki gerast orsakað av tapinum.

Virki í gjaldssteðgi og trotabúgv kunnu rokna meirvirðisgjald av advokatsamsýningum við uppgerð av inngangandi meirvirðisgjaldi við í inngangandi meirvirðisgjald eftir fylgjandi reglum:

Um trotabúgvið burturav hevur rikið meirvirðisgjaldsskyldugt virki, og tað við avtøkuna av búgvinum bæði eru aktiv, ið hava verið nýtt í meirvirðisgjaldsskylduga virkinum, og privat aktiv, kann búgvið draga alt meirvirðisgjald av advokatútreiðslunum í samband við viðgerð av búgvinum frá sum inngangandi meirvirðisgjald.

Hevur trotabúgvið, áðrenn gjaldssteðgurin ella fíggjartrotið byrjaði, bæði rikið meirvirðisgjaldsskyldugt og ikki meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi - og sostatt hevur havt lutfalsligan frádráttarrætt - kann frádráttarrættur veitast fyri meirvirðisgjald av advokatútreiðslum undir viðgerð av búgvinum við einum lutfalsligum parti, sum verður roknaður soleiðis:

> Í búgvi í gjaldssteðgi verður tað frádráttarprosentið nýtt, sum hevur verið galdandi fyri virkið í tíðarskeiðinum beint áðrenn gjaldssteðgin.
>
> Í trotabúgvi verður frádráttarprosentið sum meginregla roknað grundað á munin millum sølu (ikki íroknað meirvirðisgjald) av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum og samlaðu søluna í fíggjartrotstíðarskeiðinum. Er eingin verulig søla av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í fíggjartrotatíðarskeiðinum, verður tað frádráttarprosentið nýtt, sum hevur verið galdandi fyri virkið beint áðrenn gjaldssteðgin/fíggjartrotið.

Sostatt skal frádráttarrætturin fyri advokatsamsýning ikki á nakran hátt avmarkast, hóast privat aktiv eru við í avtøku av búgvinum. Sambært hesum er dentur lagdur á, at hesi aktiv eisini hava verið kreditgrundarlag fyri virkið, og at virðið á hesum aktivum vanliga eru av lítlum og ongum týdningi fyri búgvið og arbeiðið við av-

tøkuni. Aftrat hesum kemur, at galdandi reglur um neyðsynjarætt (trangsbenificium) og ta praksis, ið verður nýtt í samband við avtøku av tílíkum búgvum, vanliga hava við sær, at privat aktiv, sum fallenturin eigur, ikki verða nortin av trotaviðgerðini.

Meirvirðisgjaldsskyldugt virki (persónur), sum uttan samband við fíggjartrot, gjaldssteðg ella tílíkt hevur útreiðslur til advokat í samband við avtøku av heilt privatum aktivum, ið ikki viðvíkja meirvirðisgjaldsskylduga virkinum, t.d. privat innbúgv ella privat føst ogn, hevur harafturímóti ongan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av advokatútreiðslum, hóast avtøkan fer fram grundað á fíggjarligar trupulleikar í virkinum. Sama er galdandi, um útreiðslurnar eru í samband við onnur endamál, ið ikki hava frádráttarrætt.

Reglurnar kunnu nýtast samsvarandi til keyp av grannskoðanartænastu.

Sum meginregla eigur samsýning fyri umrøddu tænastur at verða býtt samsvarandi tí arbeiði, sum viðkomandi advokatur/grannskoðari hevur gjørt áðrenn ella aftaná at fíggjartrotið er komið (trotaúrskurður verður avsagdur (konkursdekretets afsigelse)).

Meirvirðisgjald av samsýning fyri tað arbeiði, sum annaðhvørt áðrenn ella aftaná, at fíggjartrotið er byrjað, er gjørt, kann sambært hesum roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá virkinum, og tollvaldið kann gera mótrokning yvir fyri búgvinum sambært vanligum reglum. Meirvirðisgjald av tí arbeiði, sum er gjørt, aftaná at fíggjartrot er byrjað, kann - sum fyri aðrar latingar til búgvið - roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá búgvinum, og tollvaldið kann gera mótrokning við møguligum hópkravi í búgvinum.

Reglurnar um frádráttarrætt fyri advokatútreiðslur í samband við viðgerð av trotabúgvi og búgvi í gjaldssteðgi verða á sama hátt nýttar í deyðsbúgvi, ið er skuldfrágongubúgv. Hetta stendst av, at viðgerð í tílíkum búgvum - eins og viðvíkjandi trotabúgvi og búgvi í gjaldssteðgi - fyrst og fremst miðar ímóti avtøku av aktivum v.m. í búgvinum, við tí fyri eyga at kreditorar fáa fulnað sambært meginreglum, ið eru galdandi fyri viðgerð av trotabúgvi, t.e. í samsvari við trotabúðarrøðina v.m.

Eitt deyðsbúgvi, ið verður viðgjørt sum skuldviðtøkubúgv, og hvørs viðgerð tí fyrst og fremst miðar ímóti at býta tað, sum er eftir, millum arvingarnar, hevur frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av advokatútreiðslum sambært vanligum reglum í meirvirðisgjaldslógini.

Hvat vanligari advokatsamsýning fyri viðgerð av búgvi viðvíkur, kann búgvið rokna ein mettan part av meirvirðisgjaldi av advokatútreiðslunum við í inngangandi meirvirðisgjald, treytað av, at samsýningin fevnir um útreiðslur av tænastum í samband við avtøku av handilsaktivum, t.d. debitorar, rakstrarbygningar, maskinur, innbúgv v.m., og gjald av handilsskuld.

Viðvíkjandi serstakari advokatsamsýning fyri tænastur, ið fult út kunnu vísast til avtøku av tílíkum aktivum og passivum, kann búgvið fult út rokna meirvirðisgjald av hesum við í inngangandi meirvirðisgjald.

Avmeldað virki, herímillum trota- og deyðsbúgvi v.fl., kunnu sambært niðanfyri nevndu reglum fáa meirvirðisgjald av útreiðslum v.m. (t.d. advokat- ella grannskoðanartænastur), ið ikki áður er roknaður við í inngangandi meirvirðisgjald ella goldin aftaná avmeldingina, endurgoldnan.

Eitt búgvi verður ofta avmeldað frá skráseting sambært meirvirðisgjaldslógini, tá ið vørugoymsla og rakstrargøgnini eru seld og peningur fingin, meðan sjálv uppgerðin av búgvinum ofta kann draga út. Í øðrum førum kann talan vera um útreiðslur, sum annaðhvørt av misgáum ikki eru roknaðar við í inngangandi meirvirðisgjald í skrásetingartíðarskeiðinum, ella sum eru faktureraðar til viðkomandi virki aftaná at tað hevur avmeldað skrásetingina.

Hvat trotabúgvi v. m. viðvíkur er galdandi, at frádráttarrætturin fyri advokatsamsýningar v. m. ikki er avmarkaður til tænastur í samband við at selja og fáa pening (realisation) av aktivum í búgvinum (skrásetingartíðarskeiðið), men eisini fevnir um tænastur, ið eru knýttar at t.d. ósemjum viðvíkjandi gjørdum avtalum ella innkrevjing av krøvum viðvíkjandi latingum, ið meirvirðisgjald er goldið fyri - eisini hóast hesar tænastur verða gjørdar aftaná, at búgvið er avmeldað frá skráseting.

Hetta merkir, at avmeldað búgv kunnu fáa endurgjald fyri meirvirðisgjald grundað á tað endaligu uppgerðina av advokat- og grannskoðarasamsýningum v. m., ið er gjørd tá ið viðgerð av búgvinum er endað. Reglurnar eru eisini galdandi fyri búgv eftir skrásett virki, hóast búgvið ikki hevur verið skrásett - t. d. av tí at búgvið eingi aktiv hevði, hvørs søla (realisatión) hevði meirvirðisgjaldsskyldu við sær.

Onnur avmeldað virki kunnu eisini móti neyðugum roknskaparligum skjalprógvi fáa heilt ella lutfalsligt endurgjald fyri meirvirðisgjald av útreiðslum v.m., ið standast av roknskaparuppgerð/ sundurluting av virkinum, eisini um tænasturnar heilt ella lutfalsliga eru gjørdar aftaná, at virkið er avmeldað frá skráseting. Hetta er tó treytað av, at útreiðslurnar kunnu vísast til skrásetta partin av viðkomandi virki.

**Ognarmeklarasamsýning v.m.**
Meirvirðisgjald av skeytis- og meklarasamsýning í samband við handil við vinnuligari ogn, sum seljarin burturav hevur nýtt til rakstur av skrásetingarskyldugum virksemi, kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald.

Viðvíkja samsýningarnar vinnuligari ogn, ið bæði hevur verið nýtt til meirvirðisgjaldsskyldugt og ikki meirvirðisgjaldsskyldugt virksemi (blandað nýtsla), kann meirvirðisgjald av samsýningunum roknast við í inngangandi meirvirðisgjald við einum lutfalsligum parti, ið verður uppgjørdur sambært reglunum um lutfalsligan frádráttarrætt.

Viðvíkja skeytis- og meklarasamsýningarnar ognum, ið bæði hava verið nýttar til meirvirðisgjaldsskyldug og privat endamál, kann ein lutfalsligur partur av meirvirðisgjaldi av samsýningunum roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá seljaranum eftir einari meting. Um serstøk virðismeting av ognini er ásett fyri privata íbúð ella vinnuligu bygningar-

nar, kunnu ásettu virðismetingar vanliga leggjast til grundarlag við uppgerð av tí partinum av meirvirðisgjaldinum, sum verður mettur at viðkoma skrásetta virkinum.

Verða skeytis- og meklarasamsýningarnar heilt ella lutfalsliga goldnar av keyparanum, kann meirvirðisgjald av samsýningunum samsvarandi omanfyri nevnda roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá keypara í samband við eina óbroytta skrásetingarskylduga nýtslu av yvirtiknu ognini.

Meirvirðisgjald av stovningarútreiðslum v.m. av einum virki kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald í tann mun, útreiðslurnar viðvíkja sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, javnber § 16 í lógini.

Møguleiki er fyri frádrátti, hóast útreiðslurnar ikki beinleiðis standa í samband við sølu, tí roknast má við, at peningur altíð verður nýttur, tá ið eitt virki verður sett á stovn.

Bert í serligum førum, tá ið útreiðslurnar heilt ella lutfalsliga kunnu vísast til egin fíggjarlig mál/viðurskifti (privat fíggjarlig viðurskifti), ella tá ið einstaldingar gjalda ein part av útreiðslunum, kann frádráttarrætturin avmarkast.

Í hvør um einstøkum føri má støða takart til út frá eini ítøkiligari meting, um ein partur av útreiðslunum kann vísast til egin mál.

Frádráttarrætturin kann harumframt avmarkast sambært vanligu reglunum um lutfalsligan frádráttarrætt, um virkið hevur blandaða sølu frá meirvirðisgjaldsskyldugum/fríum aktivitetum.

**Innheintingarmál**

Frádráttarrættur fyri meirvirðisgjald av innheintingarsamsýning (inkassosalær) í innheintingarmálum kemur bara kreditorinum til góðar, við tað at advokaturin einans kann venda sínum kravi um samsýning (salærkrav) móti kreditorinum (klientinum), sum tænastan varð gjørd fyri.

Er kreditorurin eitt skrásett virki, og kravið burturav viðvíkur latingum hjá virkinum av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum, hevur virkið fullan frádráttarrætt. Í hesum førum skal útreiðslan viðvíkjandi innheintingarsamsýning, sum advokaturin vegna kreditor setir fram ímóti debitori í einum innheintingarbrævi, gerast upp uttan meirvirðisgjald. Um so er, at debitor skuldi samsýna kreditori innheintingarsamsýning, íroknað meirvirðisgjald við frádráttarrætti, tá fær kreditor hesa meirvirðisgjaldsupphædd.

Um kreditor ikki hevur frádráttarrætt, t.d. eitt ikki skrásett virki, kann meirvirðisgjald roknast við í útreiðslukravið móti debitori. Debitor hevur tó ikki frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald. Tað er loyvt advokati í omanfyri nevndu førum at tilskila tað meirvirðisgjald av innheintingarsamsýningum, sum er íroknað í útreiðslukravinum. Hetta er tó treytað av, at tað í viðmerking í brævinum stendur, at meirvirðisgjaldsupphæddin sambært tollvaldinum ikki kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald hjá debitori.

Advokatar skulu í innheintingarmálum rokna meirvirðisgjald við eina og hvørja endaliga ella akonto debitering av innheintingarsamsýning hjá kreditori (klientinum), og við avrokning yvir fyri kreditori skal advokaturin fakturera innheintingartænastuna í samsvari við faktureringsreglurnar.

Meirvirðisgjald viðvíkjandi keypi av aðalgimsteinum og aðalsteinum kann roknast við í inngangandi meirvirðisgjald,

- um so er at keyptu vørurnar skulu nýtast í samband við framleiðslu virkisins, ella
- um so er at keyptu vørurnar eru ætlaðar at selja víðari. Hetta er tó treytað av, at virkið rekur veruliga vinnuligt virksemi við regluligum keypi og sølu av tílíkum vørum. Tá ið hetta skal avgerast, verður dentur m.a. lagdur á, hvat slag virki er og onnur viðurskifti, herímillum eisini um roynt verður at selja viðkomandi vørur uttan mun til marknaðarprís, t.d. við at gera sølutiltøk (lýsingar v.m.).

Í øðrum førum kann frádráttarrættur ikki játtast, við tað at keypið ikki kann metast at viðvíkja meirvirðisgjaldsskyldugum virki, men má metast at vera gjørt við íløgu (investering) fyri eyga. Hetta er galdandi uttan mun til at aðalmetal v.m. verður keypi av og á. Meirvirðisgjald skal ikki gjaldast við sølu av aðalmetali v.m., sum frádráttarrættur ikki var fyri, tá ið tað varð keypt.

Í ávísum førum kann frádráttur játtast skrásettum virkjum fyri inngangandi meirvirðisgjald í samband við keyp av ektaðum teppum at nýta í hølunum á virkinum.

Frádráttarrætturin er vanliga treytaður av, at hølini á virkinum ikki standa í samband við egna íbúð. Høli, ið eru partur av íbúðini, kunnu ikki metast at verða høli virkisins. Hetta er galdandi, hóast hølini eisini verða nýtt til arbeiði hjá viðkomandi.

Tá ið metast skal, um frádráttarrættur kann játtast fyri keyp av ektaðum teppum, ella um keypið má metast at vera farið fram við investering fyri eyga, verður dentur lagdur á onnur viðurskifti hjá virkinum (vinnugrein, søla v. m.), herímillum um líkningarráðið hevur góðkent avskriving.

## VIII. ROKNSKAPARREGLUR

**§ 17. Fyri eina og hvørja lating av vørum ella avgjaldsskyldugum tænastum frá einum skrásettum virki skal fakturi útflýggjast móttakaranum. Verður kravt at ein partur av einari samlaðari lating verður goldin, áðrenn latingin er endað, skal serstakur fakturi útflýggjast fyri henda partin. Fakturin skal innihalda útflýggingardagfesting og upplýsing um navn og bústað hjá lataranum og hjá á móttakaranum og slag, rúmd og prís á latingini. Harumframt skal støddin á avgjaldsupphæddini vera tilskilað á fakturanum, ella tað skal vera skilligt, at avgjaldið er 16,67% av samlaða gjaldinum fyri avgjalds-skyldugu latingina. Latarin skal tilskila støddina á avgjaldsupphæddini á fakturanum, um so er, at móttakarin er eitt skrásett virki, ið biður um hetta. Latarin skal umframt hetta eftir áheitan frá einum tílíkum móttakara tilskila prísin, ikki íroknað avgjald, fyri teir einstøku postarnar á fakturanum.**

**2. stk. Fer aftursending av vørum fram, aftaná at fakturin er útflýggjaður, skal kreditnota útflýggjast. Sama er galdandi, um latarin, aftaná at fakturin er útflýggjaður, veitir frádrátt í prísinum á latingini, og avslátturin ikki er avsláttur sambært § 7, 2. stk., punkt e. Fer eftirgjalding fram, skal ein eftirgjaldsfakturi útflýggjast.**
**3. stk. Skylda at útflýggja faktura verður mett sum lokin, tá móttakarin av avgjaldsskyldugu latingini gevur lataranum avrokningarskjal, sum lýkur tær treytir, ið eru ásettar í 1. stk. um fakturar.**
**4. stk. Tá eitt skrásett virki letur vørur ella avgjaldsskyldugar tænastur til eitt annað skrásett virki móti heilari ella partvís gjalding við vørum ella avgjaldsskyldugum tænastum (býtishandil), er tað nóg mikið, um annar av pørtunum útflýggjar faktura, um so er, at hann eisini inniheldur upplýsing um slag, rúmd og prís fyri tað, sum er móttikið í býtinum. Kunnu báðir partar til fulnar rokna avgjaldið av tí, teir hava móttikið, við í inngangandi avgjald, kann avgjaldið roknast grundað á munin millum gjøldini.**
**5. stk. Tvítøk av fakturum og kreditnotum og móttikin avrokningarskjøl skulu goymast av lataranum.**
**6. stk. Fevnir ein fakturi (avrokningarskjal) bæði um avgjaldsskyldugar og avgjaldsfríar latingar, skal tað vera skilligt á fakturanum, hvørjar latingar eru avgjaldsskyldugar. Tílíkar latingar skulu tilskilast hvør sær við serstakari samanteljing.**
**7. stk. Sambært nærri reglum ásettar av landsstýrinum, kunnu frávik gerast í reglunum í 1. stk. um innihald á faktura viðvíkjandi flutningstænastu og sølu frá marknaðarsølu o.t.**
**8. stk. Við sølu til privatar brúkarar er ikki neyðugt at útflýggja faktura sambært reglunum í 1. stk. Smásølur og onnur virki, hvørs søla einans fer fram til privatar brúkarar, kunnu eisini lata vera við at útflýggja faktura fyri aðra sølu, undantikið tá móttakarin er eitt skrásett virki, ið biður um faktura.**
**9. stk. Virki, ið ikki eru skrásett, mugu ikki tilskila avgjaldsupphæddina á faktura ella á annan hátt tilskila, at avgjald er roknað við í upphæddina á fakturanum. Móttekur eitt ikki skrásett virki eitt avrokningarskjal, har avgjaldsupphædd er tilskilað, ella har tað á annan hátt er tilskilað, at avrokningin er íroknað avgjald, skal virkið boða tí, sum hevur útflýggjað avrokningarskjalið, frá hesum og afturrinda møguliga móttikna avgjaldið.**
**10. stk. Virki, sum móti 9. stk., 1. punktum, tilskila avgjaldsupphædd á einum faktura ella á annan hátt tilskila, at avgjald er roknað við í upphæddina á fakturanum, skulu gjalda avgjaldsupphæddina til landskassan. Sama er galdandi, um eitt skrásett virki á einum faktura tilskilar avgjald við ov stórari upphædd ella á einum faktura fyri latingar, sum ikki eru avgjaldsskyldugar, tilskilar avgjaldsupphædd ella á annan hátt tilskilar, at avgjald er roknað við í upphæddina á fakturanum. Verður mistakið rættað yvir fyri keyparanum, er inngjalding tó ikki neyðug.**
**11. stk. Við prístilskilan fyri vørur og avgjaldsskyldugar tænastur skal týðiliga gerast vart við, um avgjald sambært hesi lóg ikki er roknað við í prísin.**

**Til § 17, 1. stk.**

Fakturi er bæði grundarlag undir uppgerð og eftirliti av útgangandi meirvirðisgjaldi hjá

latara og skjalprógv fyri inngangandi meirvirðisgjald hjá móttakara.

Sambært roknskaparreglum, ið eru ásettar í §§ 17, 18 og 19, skal eitt og hvørt meirvirðisgjaldsskrásett virki føra roknskap yvir keyp og sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Roknskapurin er fyrst og fremst grundarlag fyri uppgerð av meirvirðisgjaldi hjá virkjum. Harumframt skal hann tryggja, at virkið kann lúka sína fráboðanarskyldu sambært § 29. At enda skal roknskapurin geva tollvaldinum møguleika at hava eftirlit við, at meirvirðisgjald verður rætt uppkravt og inngoldið.

Tá ið meirvirðisgjaldsskrásett virki lata vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur, skulu tey altíð útflýggja móttakaranum faktura.

Ein fakturi sambært hesum reglum er at skilja sum eitt skjal, ið av lataranum og móttakaranum verður mett sum ein áheitan um at gjalda.

Kvittanir, ið posthúsið útflýggjar fyri pakkaflutning, kunnu tó góðtakast sum prógv fyri inngangandi meirvirðisgjald, tá ið tær innihalda upplýsingar um portoupphæddina.

Fakturi skal eisini útflýggjast, tá ið vørur/tænastur verða latnar, sum sambært meirvirðisgjaldslógini § 12 kunnu haldast uttan fyri meirvirðisgjaldsskylduga sølu (útflutningssøla v.m.).

Verður kravt at ein partur av einari samlaðari lating skal gjaldast, áðrenn alt er latið, skal serstakur fakturi útflýggjast fyri henda partin.

Tá ið vørur seinni verða aftursendar, ella tá ið prísavsláttur seinni verður givin, skal kreditnota útflýggjast, og við seinni eftirgjalding skal eftirgjaldsfakturi útflýggjast.

Sum meginregla skal fakturi altíð útflýggjast. Av praktiskum orsøkum viðvíkjandi smásølu kunnu frávik tó gerast, javnber § 17, 8. stk.

Tað er latarin, sum hevur skyldu at útflýggja faktura, men móttakarin kann lúka hesa skyldu við at geva lataranum avrokningarskjal.

Fakturar og avrokningarskjøl skulu útflýggjast, tá ið vøra/tænasta er latin ella skjótast aftaná hetta. Fakturering skal sostatt ikki fara fram seinni, enn vanliga innan vinnugreinina (t, d. fleiri vikur ella mánaðir).

Keypssáttmálar og keypsseðlar kunnu ikki góðtakast sum fakturar, uttan so at hesir lúka krøvini til fakturar sambært hesi 1óg.

Fakturi skal útflýggjast í minsta lagi í 2 eintøkum og skal í minsta lagi innihalda upplýsingar um fylgjandi:

- dagfesting,
- navn og bústaður latarans,
- navn og bústaður móttakarans,
- slag og nøgd (mongd) á tí, ið latið verður, prísur fyri tað, ið latið verður,
- áseting/fráboðan um meirvirðisgjald.

Á báðum eintøkunum av fakturanum skal framhaldandi nummar standa, Tað er ikki kravt, at nummarið skal vera forprentað á oyðibløðunum. Sostatt er nóg mikið, um nummarið verður ásett, tá ið útflýggjað verður.

Dagfestingin skal vera tann dagurin, tá ið fakturin er skrivaður út. Tað er t. d. ikki loyvt, at "afturdagfesta" fakturan til tann dagin, tá ið latið varð.

Meirvirðisgjald kann á fakturanum annaðhvørt tilskilast við støddini á meirvirðisgjalds-upphæddini ella við satsinum 16,67% av samlaðu upphæddini fyri latingina.

Tó skal latarin, tá ið meirvirðisgjaldsskrásettur móttakari biður um tað, tilskila støddina meirvirðisgjaldsupphæddini á fakturanum.

Latarin skal somuleiðis eftir áheitan frá skrásettum móttakara tilskila prísin, ikki íroknað, meirvirðisgjald, fyri tær einstaku vørurnar ("postarnar") á fakturanum.

Verður goldið partvíst ella fult fyri eina lating, áðrenn latið verður, áðrenn alt er latið, ella áðrenn fakturi er útflýggjaður, skal hesir peningur roknast við í meirvirðisgjaldsskylduga sølu fyri tað tíðarskeiðið, tá ið peningurin varð móttikin.

Verður áheitan um útgjalding av ratupeningi, akontopeningi ella tílíkum gjørd sum ein fakturi, skal meirvirðisgjald roknast av peninginum, tá ið fakturin verður útflýggjaður. Ein akontoáheitan má sostatt ikki innihalda upplýsing um meirvirðisgjaldsrokning v.m., um so er, at virkið ikki ætlar at rokna upphæddini við í meirvirðisgjaldsskyldugu søluna, fyrr enn peningurin er móttikin.

Verður áheitan um gjalding av ratupeningi ella tílíkum ikki gjørd sum ein fakturi, skal útflýggjast serstakur fakturi, aftaná at peningurin er fingin, um móttakarin ikki er ein privatur brúkari.

**Til § 17, 2. stk.**
Tá ið vørur verða sendar aftur, ella avsláttur verður givin í prísinum, aftaná at fakturi er útflýggjaður, skal kreditnota útflýggjast. Sama er galdandi, um avsláttur verður veittur, sum kann dragast frá, tá ið meirvirðisgjaldsskyldug søla verður uppgjørd.

Í førum har eftirgjalding fer fram orsakað av hækking í prísinum ella sum liður í serligari latingaravtalu, aftaná at fakturi er útflýggjaður, skal eftirgjaldsfakturi útflýggjast.

Kreditnotur og eftirgjalds fakturar skulu innihalda somu upplýsingar sum fakturar annars.

**Til § 17, 3. stk.**
Ikki er neyðugt at útflýggja faktura, um móttakarin útflýggjar avrokningarskjal, sum lýkur somu krøv, sum eru galdandi fyri fakturar.

Avrokningarskjalið skal sostatt vera útflýggjað í minsta lagi í 2 eintøkum, hava framhaldandi nummar og innihalda tær upplýsingar, ið eru kravdar viðvíkjandi fakturum.

Annars eru reglur viðvíkjandi útflýggjan og innihaldi v.m, tær somu fyri avrokningarskjøl sum fyri fakturar. Avrokningarskjal við meirvirðisgjald má bert útflýggjast, um seljarin er eitt skrásett virki. Tá ið meirvirðisgjald verður útgoldið eigur keyparin at tryggja sær, at seljarin er meirvirðisgjaldsskrásettur, og at krevja kvittan fyri, at hann hevur fingið peningin.

Ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki kunnu eisini útflýggja avrokningarskjøl.

Tað er latarin, sum hevur ábyrgdina fyri, at fakturi verður útflýggjaður, og sostatt er hann bert frítikin fyri at útflýggja faktura, um so er, at móttakarin útflýggjar eitt rætt avrokningarskjal.

**Til § 17, 4. stk.**
Býtishandil er, tá ið gjald fyri latnar vørur og tænastur annaðhvørt fyri ein part ella fult út eru aðrar vørur ella tænastur.

Eru báðir partar í einum býtishandli meirvirðisgjaldsskrásett virki, er nóg mikið, um annar parturin útflýggjar faktura, um fakturin inniheldur upplýsing um slag, nøgd, mongd og prís fyri tað, ið er fingið í býti. Fakturin virkar her sostatt bæði sum fakturi og sum avrokningarskjal.

Hava báðir partar fullan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald av móttiknum vørum ella tænastum, kann meirvirðisgjald roknast grundað á munin. Sostatt er nóg mikið, um tað sæst á fakturanum, at meirvirðisgjaldið er 16,67% av muninum.

Um býtishandil annars verður víst til viðmerkingarnar til § 8, 2. stk.

**Til § 17, 5. stk.**
Avrit av fakturum og kreditnotum og móttikin avrokningarskjøl skulu goymast av lataranum.

Á virkjum, sum nýta edv-skipan, kunnu samlað yvirlit við upplýsingum um innihaldið á hvørjum einstøkum faktura góðtakast í staðin fyri avrit av faktura.

Tollvaldið kann góðkenna, at skrásett virki goyma avrit av fakturum sum mikrofilm, um

so er, at arkivskipanin hjá viðkomandi virki annars er soleiðis tilrættiløgd, at tollvaldið fær gjørt eftirlit.

**Til § 17, 6. stk.**
Fevnir ein fakturi bæði um meirvirðisgjaldsskyldugar og meirvirðisgjaldsfríar latingar, skal kunna síggjast á fakturanum, hvørjar latingar eru meirvirðisgjaldsskyldugar. Latingarnar skulu tilskilast hvør sær við serstakari samanteljing.

Harafturímóti er einki krav um, at fakturi viðvíkjandi latingum, ið bæði fevna um tikfar og arbeiðstænastur, serstakt skal tilskila upphædd fyri tilfar og arbeiðsløn, tá ið fakturin annars inniheldur neyðugar upplýsingar um slag og nøgd á lating.

**Til § 17, 7. stk.**
Sambært nærri reglum, ið verða ásettar av landsstyrinum, kunnu frávik gerast í reglum um innihald á faktura fyri flutningstænastu og fyri sølu frá sjálvtøkugoymslu, marknaðarsølu o.t.

**Til § 17, 8. stk.**
Tá ið selt verður til privatar brúkarar, er ikki neyðugt at útflýggja faktura. Henda regla er galdandi fyri øll virki.

Smásølur og onnur virki, sum selja meginpartin til privatar brúkarar, kunnu eisini lata vera at útflýggja faktum fyri sølu til onnur enn privatar brúkarar. Av tí at inngangandi avgjald sambært § 15, 4. stk. Er tað avgjaldið, sum í tíðarskeiðinum er fakturerað til eitt virki av lataranum, kunnu meirvirðisgjaldsskrásettir keyparar tó altíð krevja, at fakturi verður útflýggjaður.

Verður fakturi, nota ella tílíkt kortini útflýggjað, tá ið selt verður til privatar brúkarar v.fl., er ikki neyðugt at lúka krøv til fakturar í meirvirðisgjaldslógini.

**Til § 17, 9. og 10. stk.**
Virki, ið ikki eru meirvirðisgjaldsskrásett, mugu ikki tilskila meirvirðisgjaldsupphædd ella á annan hátt viðmerkja á faktura, at upphæddin á fakturanum er íroknað meirvirðisgjald.

Ætlanin við hesi reglu er at forða fyri, at tílík virki av órættum krevja meirvirðisgjald, sum ikki verður avroknað við tað almenna, og at skrásettir keyparar hjá tílíkum virkjum fáa grundarlag fyri frádrátti fyri inngangandi meirvirðisgjald, sum teir ongan rætt hava til.

Um meirvirðisgjald verður uppkravt, ella um eitt skrásett virki hevur uppkravt meirvirðisgjald við ov stórari upphædd ella tilskilað meirvirðisgjald á einum faktura yvir meirvirðisgjaldsfríar latingar, skal meirvirðisgjaldsupphæddin, ið av órættum er uppkravd, gjald-

ast landskassanum.

Tó slepst undan inngjalding, um mistakið verður rættað yvir fyri keyparanum á tann hátt, at upprunaligi fakturin verður tikin aftur og ein beinur fakturi sendur ístaðin, ella á tann hátt at kreditnota verður útflýggjað, sum rættar mistakið.

Tollvaldið kann sambært hesum reglum ikki áleggja einum latara at útflýggja kreditnotu viðvíkjandi meirvirðisgjaldi, ið er kravt av órættum. Reglurnar geva bert pørtunum møguleika fyri at avgera viðurskiftini sínámillum. Hendir hetta ikki, má latarin gjalda landskassanum peningin.

Reglurnar kunnu nýtast í førum, har bilsølur v.fl. í stríði við regluna í § 10, 3. stk. tilskila meirvirðisgjaldsupphædd ella á annan hátt tilskila eina upphædd, sum meirvirðisgjald kann roknast út eftir, á sølufaktura.

Reglurnar kunnu harafturímóti ikki nýtast í førum, har meirvirðisgjald í stríði við reglurnar í § 12, 5. stk. er roknað, tá ið vørugoymsla, maskinur og onnur rakstrargøgn hava verið avhend. Í tílíkum førum hevur keyparin ikki loyvi draga frá inngangandi meirvirðisgjald, og seljarin skal tí rætta mistakið yvir fyri keyparanum á tann hátt, at kreditnota verður útflýggjað keyparanum áljóðandi meirvirðisgjaldsupphæddina, samstundis sum roknaða meirvirðisgjaldsupphæddin verður afturgoldin.

Reglurnar kunnu harumframt bæði takast í nýtslu yvir fyri virkjum og yvir fyri einstaklingum, ið ikki eru skrásettir fyri sølu av vørum og meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum.

Fær eitt ikki skrásett virki avrokningarskjal, sum meirvirðisgjaldsupphædd er tilskilað á, ella tað á annan hátt er tilskilað, at avrokningin er íroknað meirvirðisgjald, skal virkið boða honum, sum hevur útflýggjað avrokningarskjalið, frá hesum og afturgjalda meirvirðisgjaldið.

Verður meirvirðisgjald goldið einum seljara, ið hevur upplýst, at hann er meirvirðisgjaldsskrásettur, og tað aftaná vísir seg, at hasin hvørki er skrásettur ella skrásetingarskyldugur, skal seljarin afturgjalda keyparanum ella gjalda tollvaldinum móttiknan meirvirðisgjaldspening.

Royndir frá øðrum londum vísa, at í summum førum, har rokning og útgjalding av meirvirðisgjaldi til ikki-skrásettar seljarar er framd, hava hesir seinni noktað at kenna nakað til viðkomandi latingar. Fyri ikki at koma í tílíka støðu eigur keyparin at krevja, at latarin kvittar á avrokningarskjalið, at hann hever fingið peningin.

**Til § 17, 11. stk.**
Tá ið prísur fyri vørur og meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur verður tilskilaður, skal tað viðmerkjast týðiliga, um prísurin ikki er íroknaður meirvirðisgjald. Hetta er galdandi fyri prísskelti, prístilboð, lýsingar, sáttmálar o.t. Reglan fevnir eisini um munnlig tilboð.

Reglan skal tryggja, at keyparin ikki kemur í ta støðu, at hann skal gjalda meirvirðisgjald, sum hann helt vera roknað við í prísinum.

**§ 18. Skrásett virki skulu føra roknskap yvir keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum kann vera grundarlag fyri uppgerð av avgjaldsskylduni fyri hvørt avgjaldstíðarskeið og fyri eftirlitið við rættari greiðslu av avgjaldinum.**
**2. stk. Roknskapurin skal innihalda serstøk konti, sum vísa støddina á inngangandi og útgangandi avgjaldinum. Avgjaldskontiini kunnu førast við tíðarposteringum, um avgjaldsupphæddirnar beinleiðis kunnu roknast grundað á roknskapskontiini yvir keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.**
**3. stk. Virki, ið ikki føra vanligar handilsbøkur, ella hvørt handilsbøkur ikki verða førdar samsvarandi 1. og 2. stk., skulu føra roknskap í einum serligum roknskaparhefti, sum verður útflýggjað av Toll- og Skattstova Føroya.**
**4. stk. Til skjals fyri inngangandi avgjaldið skulu skrásett virki kunna leggja fram fakturar (avrokningarskjøl), ið lúka tær treytir, ið eru nevndar í § 17, 1. stk. javnber 4. og 7. stk., ella fráboðanir frá Toll- og Skattstova Føroya um støddina á tí avgjaldi, ið sambært § 27 er álagt vørum, sum virki hevur innflutt úr útlondum. Fakturar, upp á hægst 200 kr., ið eru útgivnir av smásølum ella øðrum virkjum, hvørs søla einans fer fram til privatar brúkarar, kunnu leggjast fram sum skjalprógv, hóast fakturarnir ikki innihalda upplýsingar um navn og bústað hjá móttakaranum.**
**5. stk. Landsstýrið ásetir nærri reglur viðvíkjandi roknskaparførslu hjá skrásettum virkjum.**

**Til § 18**
Landsstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk, sum í løtuni arbeiðir við at gera nýggjar roknskaparreglur.

Hetta arbeiði verður væntandi liðugt á sumri í ár og eigur at vera tikið við, tá ið krøv skulu setast viðvíkjandi roknskapi hjá meirvirðisgjaldsskrásettum virkjum.

Hetta kann t.d. gerast í kunngerð, ið verður gjørd við heimild í § 18, 5. stk. Krøvini til roknskap verða tó í minsta lagi sum ásett í § 18.

Sambært § 18 skulu skrásett virki føra roknskap yvir keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum kann vera grundarlag fyri uppgerðini av avgjaldstilsvarinum fyri hvørt avgjaldstíðarskeið og fyri eftirlitinum við, at avgjaldið verður rætt goldið.

Roknskapurin skal innihalda serlig konti, ið vísa støddina á inngangandi og útgangandi avgjaldi. Avgjaldskontiini kunnu tó førast við tíðarposteringum, um so er, at tað ber til beinleiðis at rokna avgjaldsupphæddirnar eftir bókingum av keypi og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum í roknskapinum (§ 18, 2. stk.).

Roknskapurin verður varliga skipaður sum ein partur av varliga handilsroknskapinum.

Kann handilsroknskapurin ikki vera grundarlag undir avgjaldsroknskapinum, ella bókar eitt virki ikki í vanligar handilsbøkur, skal avgjaldsroknskapurin verða førdur í eitt serligt roknskaparhefti, sum tollvaldið útflýggjar (§ 18, 3. stk.).

Um virki føra vanligan handilsroknskap, kunnu tey eisini vanliga nýta hann til at uppgera avgjaldið, og í flest førum kann hann eisini nýtast til avgjaldseftirlit.

Sambært § 18, S. stk. verða nærri reglur um roknskaparførslu v. m. í samsvari við meirvirðisgjaldslógina ásettar í kunngerð.

Virki, ið eru skrásett sambært meirvirðisgjaldslógini, skulu sambært nærri reglum, ið verða ásettar í kunngerð, bóka keyp og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, soleiðis at tær upphæddir, sum virkið við endan á hvørjum avgjaldstíðarskeiði skal geva upp í avgjaldsuppgerðini til tollvaldið, síggjast í roknskapinum.

Roknskapurin skal vera týðiligur og greiður og innihalda sundurliðingar, sum gera tað møguligt hjá tollvaldinum at kanna, um avgjaldið verður rætt goldið. Verða keyp og søla bókað sum ein samlað upphædd, skulu skjøl fylgja við (t.d. journalir, kladdur, kassastrimlar ella tilíkt), sum sundurliða samlaðu upphæddina í einstakar upphæddir.

Roknskapurin skal vera soleiðis skipaður, at tollvaldið kann samanbera bókingarnar í roknskapinum við keyps- og søluskjøl.

Roknskapurin skal eisini innihalda sovorðnar upplýsingar, at virkið kann lúka sína skyldu eftir áheitan at geva tollvaldinum upplýsingar um keyp av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum hjá teimum einstøku virkjunum (latarunum) og um latnar vørur og avgjaldsskyldugar tænastur til tey einstøku virkini (viðskiftafólkið).

Vanligur handilsroknskapur skal innihalda hesi serligu konti:

1. Konto fyri inngangandi avgjald (avgjald av keypi)
2. Konto fyri útgangandi avgjald (avgjald av sølu), og møguliga
3. Konto fyri útflutning v.m.

Á konto fyri inngangandi avgjald skal avgjald á keypi av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum bókast til virkið at nýta, í tann mun avgjald á keypi kann roknast við í inngangandi avgjald.

Á konto fyri útgangandi avgjald skal avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum virkið selur ella tekur út til nýtslu hjá handhava, starvsfólki, til umboðan v.m., bókast.

Konto fyri útflutning v.m. verður stovnað av virkjum, sum hava útflutning ella aðra sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sum avgjald ikki skal rindast fyri. Á hesa konto verður søluprísurin fyri latnar vørur/tænastur bókaður.

Tey einstøku skjølini yvir keyp og sølu skulu bókast í handilsroknskapinum (journalir, kladdur v.m.), og avgjaldskonti skulu sum meginregla førast við regluligum bókingum, soleiðis at roknskapurin vísir støddina á inngangandi og útgangandi avgjaldinum.

Avgjald, ið verður roknað av og inngoldið tollvaldinum við møguligan innflutning, sum virkið hevur av vørum, skal altíð bókast beinleiðis á konto fyri inngangandi avgjald.

Avgjaldskontiini skulu gerast upp við endan á hvør um avgjaldstíðarskeiði. Samlaða inngangandi avgjaldið (saldo á konto fyri inngangandi avgjald) verður flutt á konto fyri útgangandi avgjald, ið sostatt vísir ta avgjaldsupphædd, ið skal inngjaldast tollvaldinum (møguliga skal afturgjaldast av tollvaldinum). Við inngjalding til (útgjalding frá) tollvaldið, verður goldna (afturgoldna) upphæddin flutt á konto fyri útgangandi avgjald, ið sostatt er álíknað.

Í kunngerð um roknskap verða ásettar reglur fyri kassaroknskap hjá skrásettum virkjum, um edv-bókhald og um skyldu at goyma roknskapartilfarið.

At enda verður ásett í kunngerðini, at avgjaldsroknskapur fyri eitt avgjaldstíðarskeið skal vera førdur, innan avgjaldsuppgerðin verður latin tollvaldinum.

**§ 19. Skrásett virki og virki, ið sambært § 4, 1. stk. eru frítikin frá avgjaldsskyldu, skulu goyma roknskapartilfarið, herímillum fakturar, fakturatvítøk og kassastrimlar v.m., viðvíkjandi keypi og sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum 5 ár eftir endan á roknskaparárinum.**
**2. stk. Skrásett virki skulu eina ferð um árið grundað á eina uppteljing av vørugoymsluni hjá virkinum gera uppgerð yvir virðið á goymsluni. Uppgerðin skal goymast 5 ár eftir endan á roknskaparárinum.**

**Til § 19**
Meirvirðisgjaldsskrásett virki og virki, ið sambært meirvirðisgjaldslógini § 4, 1, stk. eru frítikin frá at gjalda meirvirðisgjald (virki við einari sølu, sum ikki fer upp um 20.000 kr. árliga), skulu goyma handilsroknskap (herímillum vørukeyps- og vørusølubøkur, sølukladdur, kontokort, journalir v.m.) og roknskaparskjøl og annað roknskapartilfar (herímillum bíleggingarbøkur), keypsfakturar, avrokningarskjøl, avrit av sølufakturum, kreditnotur, rokningar, notur, framleiðsluskjøl, kassastrimlar, yvirlit yvir goymsluuppteljing o.t.) 5 ár aftan á viðkomandi roknskaparárslok.

Skylda at goyma er galdandi, hóast virkið fer úr skráseting.

Sambært 2. stk, skulu skrásett virki eina ferð um árið gera eina uppteljing av vørugoymsluni. Virkini avgera sjálv, nær henda uppteljing fer fram.

## IX. AVROKNING AV AVGJALDINUM

**§ 20. Skrásett virki skulu seinast 25 dagar aftaná hvørt avgjaldstíðarskeið fráboða Toll- og Skattstova Føroya støddina á útgangandi og inngangandi avgjaldi í tíðarskeiðinum og støddina á sølu, sum sambært § 12, 1-4 stk., ikki skal roknast við í avgjaldsskylduga sølu. Upphæddirnar skulu tilskilast í heilum krónum, við tað at oyru ikki verða tald við. Uppgerðin, sum skal vera undirskrivað av ábyrgdarleiðsluni á virkinum, skal skrivast á eitt serligt oyðiblað, sum eisini verður nýtt, tá avgjaldið verður inngoldið.**
**2. stk. Avgjaldstíðarskeiðini eru 4 um árið: januar, februar og mars, apríl, mai og juni, juli, august og september og oktober, november og desember.**
**3. stk. Virkir, ið javnan hava negativa avgjaldsupphædd, kunnu fáa loyvi at avrokna eina ferð um vikuna. Avgjaldstíðarskeiðið kann bert broytast soleiðis, at hetta fer fram í byrjanini av avgjaldstíðarskeiðinum sambært 2. stk. Søkjast skal um hetta loyvi ein mánað frammanundan. Verður loyvið játtað virkjum sambært 3. stk., kunnu virkini ikki nýta avgjaldstíðarskeið sambært 2. stk. tey næstu 2 árini frá tí, at loyvið er játtað.**

**Til § 20**
Skrásett virki skulu avrokna avgjaldið fyri hvørt avgjaldstíðarskeið grundað á uppgerð, sum virkið hevur gjørt.

Í § 20, 1. stk. í lógini er ásett, at virki eftir lokið avgjaldstíðarskeið skulu boða tollvaldinum frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldi hjá virkinum í tíðarskeiðinum og støddini á tí sølu (§ 12, 1-3 stk.), ið ikki skal roknast við í avgjaldsskylduga sølu, t.e. útflutningur og søla av skipi/flogfari og tíðindabløðum.

Avgjaldstíðarskeiðini eru 6 um árið og fevna um januar - februar, mars - apríl, mai - juni, juli - august, september - oktober, og november - desember.

Fyri hvørt avgjaldstíðarskeið skulu virki lata inn uppgerð á oyðiblaði, sum tollvaldið sendir virkjunum.

Virki skulu eisini lata inn uppgerð fyri tíðarskeið, sjálvt um tey ikki hava hava inngangandi ella útgangandi avgjald.

Fyri virkini er uppgerðin eitt inngjaldingarkort, ið samstundis kann nýtast at gjalda avgjaldið.

Upplýsingarnar til uppgerðina verða givnar á baksíðuna á inngjaldingarkortinum. Er avgjaldið null ella negativt, skal oyðiblaðið kortini sendast sum uppgerð.

Uppgerðin skal vera tollvaldinum í hendi í seinasta lagi 25 dagar eftir endan á avgjaldstíðarskeiðinum, og skal vera undirskrivað av ábyrgdarhavandi leiðslu á virkinum.

**§ 21. Um uppgerð fyri eitt avgjaldstíðarskeið ikki verður innlatin til ásetta tíð, verður avgjaldið fyri viðkomandi avgjaldstíðarskeið hækkað við 1%, tó í minta lagi við 300 kr. og í hægsta lagi við 1.000 kr.**
**2. stk. Toll- og Skattstova Føroya kann fráboða frítøku fyri hækking av avgjaldi sambært 1. stk, tá tað av serligum orsøkum verður hildið at vera rímiligt.**
**3. stk. Hevur Toll- og Skattstova Føroya aftaná lokna innlatingarfreist ikki móttikið uppgerð fyri eitt avgjaldstíðarskeið, kann Toll- og Skattstova Føroya fyribils áseta avgjald hjá virkinum út frá einari meting.**

**Til § 21**
Er uppgerð fyri eitt avgjaldstíðarskeið ikki latin rættstundis inn, verður avgjaldið hjá virkinum fyri viðkomandi avgjaldstíðarskeið hækkað við 1 %, tó mint við 300 kr. og hægst við 400 kr. (§ 21, 1. stk.).

Henda regla hevur sum endamál at fáa virki at lata uppgerðina inn rættstundis. Hetta er av stórum týdningi fyri fyrisitingina við eini avgjaldslóg við so nógvum skrásettum virkjum.

Eitt serligt giroinngjaldingarkort verður sent virkjum til at gjalda inn avgjaldshækkingina. Eru serliga orsøkir til at uppgerðin ikki er latin inn rættstundis, kann frítøka fáast fyri at gjalda avgjaldshækkingina.

Hevur tollvaldið eftir loknað innlatingarfreist ikki fingið uppgerðina fyri eitt avgjalds-tíðarskeið, kann tollvaldið gera eina fyribils meting av avgjaldinum hjá virkinum fyri umrødda tíðarskeið til eina ásetta upphædd (§ 21, 3. stk.).

Henda regla hevur til endamáls at skunda undir innlating av uppgerðini og at fáa grundar-lag fyri innheinting (panting). Virkini kunnu bert sleppa sær undan fyribils meting við at lata inn uppgerðina.

Virki, ið ikki lata rættstundis inn, koma eisini undir sektarábyrgd.

**§ 22. Avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið fellur til gjaldingar og skal inngjaldast í seinasta lagi 25 dagar aftan á endan á avgjaldstíðarskeiðinum.**
**2. stk. Verður avgjaldið ikki goldið til tíðina, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaða mánað frá gjaldsdegnum at rokna, tó í minsta lagi 100 kr. fyri eitt avgjaldstíðarskeið. Renta verður ikki goldin av einari hækking sambært § 21, 1. stk. av avgjaldinum.**

**Til § 22**
Avgjaldið fyri eitt avgjaldstíðarskeið fellur til gjaldingar og skal verd goldið í seinasta lagi 25. í mánaðinum aftaná, at avgjaldstíðarskeiðið er endað.

Hevur eitt virki ikki goldið avgjaldið rættstundis, skal tað gjalda 1,5% í mánaðarligari

rentu fyri hvønn byrjaðan mánaða frá gjaldkomudegnum at rokna, tó mint 100 kr. fyri eitt avgjaldstíðarskeið (§ 22, 2. stk.).

Renta skal ikki gjaldast av avgjaldshækking, sum stendst av ov seint innlatnari uppgerð. Rentan verður uppkravd á tann hátt, at eitt serligt giroinngjaldingarkort verður sent virkinum. Eingin frítøka fæst fyri at gjalda rentu.

Føroya Gjaldstova kemur at umsita innkrevjingar av eftirstøðum sambært meirvirðisgjaldslógini.

**§ 23. Viðvíkjandi virkjum, sum bert skulu rekast í styttri tíð, kann Toll- og Skattstova Føroya áseta, at avgjaldstíðarskeiðið, er tað tíðarskeiðið, sum virkið skal rekast í. Toll- og Skattstova Føroya kann harumframt stytta freistirnar fyri at senda inn uppgerð og gjalda avgjald hjá tílíkum virkjum.**
**2. stk. Hevur eitt virki fleiri ferðir ikki inngoldið avgjald rættstundis, kann Toll- og Skattstova Føroya stytta avgjaldstíðarskeiðið hjá virkinum og freistina fyri at senda inn uppgerð og gjalding av avgjaldi. Sama er galdandi, um handhavin á einum virki við útinning er mettur ikki at vera førur fyri at gjalda skuldina, um handhavin hevur steðgað síni gjalding ella er undir sjálvbodnari skuldsemju ella í avtøku, ella um virkið er eitt partafelag, og hetta er í avtøku sambært reglunum um ógjaldfør vinnufeløg. Hetta er somuleiðis galdandi fyri virki, um búgv handhavans er undir fíggjartrotsviðgerð ella undir neyðskuldsemjusamráðingum, ella um deyðsbúgvi handhavans verður viðgjørt sambært kapittul III í lóg um skifti av deyðsbúgvi og felagsbúgvi.**

**Til § 23**
Fyri virki, ið bert verða rikin eitt stutt tíðarskeið, kann tollvaldið áseta, at avgjaldstíðarskeiðið er tað tíðarskeiðið, sum virkið verður rikið í. Harumframt kann tollvaldið stytta innlatingarfreist fyri uppgerð og gjaldsfreist fyri avgjald hjá tílíkum virkjum.

Hesar reglur eru millum annað at nýta til avgjaldsskyldug virki, ið bert verða rikin viðhvørt, t.d. konsertir, almennar veitslur ella servering í serligum førum (veitslur, fundir, marknaður, fyribils framsýningar o.t.), og í førum tá ið væntast kann, at avgjald, ið eigur at verða goldið, ikki verður goldið.

Eitt serligt oyðiblað verður gjørt til uppgerðina, og hon skal altíð latast inn áðrenn 25 dagar aftaná, at avgjaldsskylduga virkið er hildið uppat.

Hevur eitt virki fleiri ferðir ikki goldið avgjald rættstundis, kann tollvaldið stytta avgjaldstíðarskeiðið, innlatingarfreistina og gjaldsfreistina hjá virkinum, sambært 2. stk.

Sama er galdandi, um handhavi á einum virki við útinning (eksekutión) er mettur ikki at kunna gjalda sína skuld, um handhavi hevur steðgað gjaldingunum ella er undir sjálvbodnari skuldsemju (akkord) ella í avtøku (likvidatión), ella um virkið er eitt partafelag,

og hetta er í avtøku sambært reglum um feløg í gjaldtroti. Hetta er somuleiðis galdandi, um búgv handhavans er undir viðgerð fyri fíggjartrot (konkursbehandling) ella undir samráðingum um neyðskuldarsemju (tvangsakkordforhandling), ella um deyðsbúgvi handhavans verður viðgjørt sambært kap. III í lóg um skifti av deyðsbúgvi og felagsbúgvi.

Reglan er ætlað at avmarka kreditin hjá virkjum, sum fleiri ferðir ikki hava goldið avgjaldið, fyrr enn aftan á at tey hava fingið rykkjarar.

Krediturin verður avmarkaður á tann hátt, at avgjaldstíðarskeiðið verður stytt til 1 mánað, og innlatingarfreistin fyri uppgerðina og gjaldsfreistin fyri avgjaldið verða ásettar til 10 dagar. Um seinasti rætti inngjaldingardagur er leygardagur, sunnudagur ella halgidagur, er næsti komandi gerandisdagur roknaður at vera seinasti rætti inngjaldingardagur.

Goldið er rættstundis, um

- upphæddin verður goldin postverkinum seinasta rætta inngjaldingardag, ella

- áheitan um flyting frá postgirokonto virkisins er postgirostovuni í hendi áðrenn dagin eftir seinasta rætta inngjaldingardag, ella

- ein kekkur áljóðandi upphæddina kemur tollvaldinum í hendi við fyrstu postbering dagin eftir seinasta rætta inngjaldingardag.

**§ 24. Er inngangandi avgjaldið hjá einum virki fyri eitt avgjaldstíðarskeið størri enn útgangandi avgjaldið, verður avgjaldsyvirskotið útgoldið virkinum.**
**2, stk. Er uppgerðin rættstundis móttikin, fer útgjalding sambært 1. stk. fram, í seinasta lagi 3 vikur eftir at avgjaldsuppgerðin fyri viðkomandi tíðarskeið er móttikin. Kann Toll- og Skattstova Føroya vegna viðurskiftini hjá virkinum ikki hava eftirlit við uppgerðini, verður útgjaldingarfreistin avbrotin, til viðurskiftini hjá virkinum ikki longur forða eftirliti.**
**3, stk. Útgjalding fer bert fram, um avgjaldsuppgerð viðvíkjandi undanfarnum avgjaldstíðarskeiðum er móttikin. Krav um avgjald (og møguligar rentur) fyri hesi tíðarskeið verða mótroknað við útgjalding, hóast avgjaldskravið ikki er fallið til gjaldingar.**

**Til § 24**
Tá ið inngangandi avgjaldið hjá einum virki í einum avgjaldstíðarskeiði er størri enn útgangandi avgjaldið, t.d. orsakað av stórum íløgukeypi, verður munurin útgoldin virkinum.

Er uppgerðin rættstundis í hendi (og rætt fylt út), skal útgjalding fara fram í seinasta lagi 3 vikur aftaná, at avgjaldsuppgerðin fyri umrødda avgjaldstíðarskeið er í hendi. Um toll-

valdið orsakað av viðurskiftum á virkinum (t.d. feriu, burturferð v.m.) ikki hevur fingið kannað uppgerðina, verður steðgur í útgjaldingarfreistini, til viðurskiftini á virkinum ikki longur forða eftirliti.

Afturgjaldingin er tó treytað av, at avgjaldsuppgerðir viðvíkjandi undanfarnum avgjaldstíðarskeiðum eru tollvaldinum í hendi. Avgjøld og rentur fyri hesi tíðarskeið, ið ikki eru goldin, verða mótroknað við útgjaldingina.

Skyldar eitt virki landskassanum annan pening, t.d. toll, avgjald á framleiðslu og innflutningi ella skatt, kann tílík skuld eisini mótroknast í negativa avgjaldinum.

Viðmerkjast skal her, at víðka heimild er til mótrokning í hesum føri, av tí at mótroknast kann, hóast avgjaldskravið ikki er fallið til gjaldingar.

**§ 25. Fyri gjalding av avgjaldi sambært hesi lóg ábyrgdast tann, ið sum ánari, uppsitari ella tílíkt rekur virkið fyri egna rokning. Eru fleiri virki, ið ikki hava sama ánara, skrásett undir einum, sbr. § 5, 3. stk., bera viðkomandi samábyrgd fyri gjalding av avgjaldi viðvíkjandi teimum virkjum, ið eru umfevnd av felags skrásetingini. Er eitt útlendskt virki skrásett við einum umboði her á landi sambært § 5, 1. stk, 3. pkt., bera hesin og virkið samábyrgd fyri gjalding av avgjaldinum.**

**Til § 25**
Tann, ið sum eigari, uppsitari ella tílíkt rekur virki fyri egna rokning, ábyrgdast fyri, at avgjaldið verður goldið.

Eru fleiri virki, ið ikki hava sama eigara, skrásett undir einum (felagsskráseting), hava tey samábyrgd fyri at avgjald viðvíkjandi virkjunum, ið eru umfatað av felagsskrásetingini verður goldið.

Er útlendskt virki skrásett við umboðsmanni, ið er her á landi, hava hesin og virkið samábyrgd fyri, at avgjaldið verður goldið.

**§ 26. Meirvirðisavgjald, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting.**

**Til § 26**
Í § 26 eru ásettar reglur um at meirvirðisgjald, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting.

Við hesum slepst undan at fara til Føroya Rætt og fáa grundarag fyri úttøku hvørja ferða meirvirðisgjald, ið er fallið til gjaldingar, ikki verður goldið.

Í førum tá ið virki ikki senda inn meirvirðisgjaldsuppgerð kann tollvaldið sambært § 21, 3. stk. áseta meirvirðisgjaldstilsvarið.

Ásetingin verður hereftir grundadag fyri panting sambært § 26.

## X. AVGJALD AV INNFLUTNINGI ÚR ÚTLONDUM

**§ 27. Vørur, ið verða innfluttar úr útlondum, eru avgjaldsskyldugar í samband við innflutningin. Avgjaldið verður avroknað sambært reglunum í 7. kapitli í løgtingslóg um toll, ið er galdandi samsvarandi sambært hesi lóg.**
**2. stk. Avgjaldið er 20% av einum virði, ið er ásett samsvarandi reglunum um tollvirðið á virðistollskyldugum vørum, møguliga við tolli og øðrum avgjaldi løgdum aftrat, sum skulu gjaldast í samband við innflutning, undantikið avgjaldið smb. hesi lóg.**
**3. stk. Avgjaldsfrítøka kann játtast við innflutning av vørum í sama mun og undir somu treytum sum ásettar eru um frítøku sambært tolllógini §§ 6, 7 og 9. 4. stk. Flogfør og skip upp á 5 GT og meira, undantikið sportsflogfør og lystfør, kunnu innflytast avgjaldsfrítt.**
**5. stk. Tíðindabløð kunnu innflytast avgjaldsfrítt. Útlendsk tíðarrit, ið koma beinleiðis til haldaran, kunnu eisini innflytast avgjaldsfrítt.**
**6. stk. Listamenn kunnu avgjaldsfrítt innflyta egin listaverk av tí slagnum, ið hoyrir undir vøruflokk 9701-9703 í toll- og vøruskránni.**
**7. stk. Í samráð við nevndina, ið er umrødd í § 35, kann landsstýrið, undir heilt serligum umstøðum loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum í øðrum førum enn teimum, sum nevnd eru í 3-6 stk.**
**8. stk. Vørur, ið fyribils verða útfluttar við tí fyri eyga at endurinnflyta tær eftir tilevning, virking, innballing, umvæling ella reingerð, kunnu av Toll- og Skattstovu Føroya sambært nærri ásettum treytum loyvast at verða avgjaldsavgreiddar við 20% av útreiðslunum, í hesum eru sendingar- og tryggingarútreiðslur v.m., við tilevningina, sum er gjørd uttan fyri landið íroknað møguligan toll og aðrar útreiðslur sum nevnt í 2. stk.**

**Til § 27, 1. og 2. stk.**
Kjarnan í meirvirðisgjaldslógini er, at sama avgjald skal rindast fyri vørur og tænastur, ið verða innfluttar, sum fyri vørur og tænastur, ið sambært meirvirðisgjaldslógini eru avgjaldsskyldugar við innanlands sølu.

Er ein vøra sostatt avgjaldsfrí, er avgjaldsfrítøkan eisini galdandi við innflutning.

Reglurnar um meirvirðisgjald av innflutningi úr útlondum eru í § 27 í meirvirðisgjaldslógini, ið viðvíkur innflutningi av vørum, og í § 28 í lógini, sum gevur landsstýrinum heimild til at áseta reglur um, í hvønn mun meirvirðisgjald skal gjaldast við keyp av tænastum í útlondum.

Fyri vørur, ið verða innfluttar, verður meirvirðisgjald roknað av tollvirðinum, íroknað toll og onnur gjøld, ið skulu gjaldast í samband við innflutning. Í tollvirðinum eru m.a. sendingar- og tryggingarkostnaður, ið kemur aftrat, til vøran er komin til landið (tolløkið).

Er ein vøra, ið verður innflutt, tollfrí sambært tolllógini og avgjaldsfrí sambært lóg um

avgjald á framleiðslu og innflutningi, skal meirvirðisgjald rindast av tollvirðinum. Tó er tað virði sambært tolllógini § 11, ið tollur skal roknast av, um vørðn er tollskyldug.

Avgjaldið verður avroknað sambært reglunum í 7. kapitli í tolllógini. Tað merkir, at virki, ið hava tollkredit, eisini fáa kredit uppá meirvirðisgjald av innflutningi.

Ætlan landsstýrisins er, at skipanin viðvíkjandi tollkrediti, sum í dag fevnir um toll, innflutningsgjald og avgjald á framleiðslu og innflutningi, eisini verður galdandi fyri meirvirðisgjald av innflutningi, ið kemur í staðin fyri innflutningsgjaldið.

**Til § 27, 3. stk.**
Meirvirðisgjaldsfríur innflutningur av vørum kann fara fram í sama mun og undir somu treytum sum ásett fyri tollfrítøku sambært §§ 6, 7 og 9 í tolllógini.

Hesar greinar áseta, at ferðagóðs, flytigóðs, gávupakkar, vistir og vørur, ið verða innfluttar til góðskingar, kunnu flytast inn uttan at randa meirvirðisgjald.

Reglan ger tað neyðugt at gera ávísar broytingar í nevndu greinum í tolllógini.

**Til § 27, 4. stk.**
Flogfor og skip, ið eru 5 GT og meiri, kunnu innflytast meirvirðisgjaldsfrítt, javnber § 27, 4. stk. Hetta er tó ikki galdandi fyri stuttleikabátar, og sportsflogfør.

**Til § 27, 5. stk.**
Tíðindabløð kunnu innflytast meirvirðisgjaldsfrítt javnber § 27, 5. stk. Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um tíðindabløð, ið verða innflutt sum mikrofilmur.

Harumframt kunnu útlendsk tíðarrit, ið koma beinleiðis til haldaran, innflytast meirvirðisgjaldsfrítt, javnber § 27, 5. stk. Samlaðar sendingar, ið innihalda liðugt adresserað tíðarrit til serstaka postumbering koma eisini undir tílíkan innflutning.

Meirvirðisgjaldsfrítøkan fevnir eisini um hald av útlendskum tíðarritum, ið verða innflutt sum mikrofilmur. Í hesum sambandi verða eisini magnetbond, ið innihalda greinar til tíðarrit ella yvirlit yvir tílíkar greinar mett sum tíðarrit.

**Til § 27, 6. stk.**
Listaverk, ið listamaðurin sjálvur eigur av tí slagnum, ið hoyrir undir vøruflokk 9701-9703 í toll- og vøruskránni, kunnu innflytast meirvirðisgjaldsfrítt, javnber § 27, 6. stk. Meirvirðisgjaldsfrí innflutningurin er treytaður av, at listaverkini verða tollavgreidd av viðkomandi listamanna sjálvum (í hansara navni). Meirvirðisgjaldsfrítøkan er tó ikki treytað av, at listamaðurin er til staðar við tollingina, ella at hann er her á landi.

Upprunaligar standmyndir (skulpturar) undir vøruflokki 9703 verða í ávísum førum framleiddar við stoyping ella tílíkum uttanlands grundað á eina fyrimynd ella upprunaavstoyping (ofta í minni stødd), sum listamaðurin hevur til hetta endamál. Tílíkar upprunaligar standmyndir - herímillum eisini fyrimyndin, upprunaavstoypingin - kunnu innflytast

meirvirðisgjaldsfrítt av listamanninum sjálvum.

Verða listaverk innflutt av listaframsýningum, listaverkssolum o, t. , skal meirvirðisgjald rindast sambært vanligu reglunum í lógini.

**Til § 27, 7. stk.**
Landsstýrið kann sambært § 27, 7. stk. í lógini í samráð við meirvirðisgjaldsnevndina, tá ið heilt serligar umstøður tala fyri hesum, loyva meirvirðisgjaldsfríum innflutningi av vørum í oðrum førum enn teimum í § 27, 3-6 stk. nevndu.

Hesar reglur viðvíkja kappingarneutralitetinum.

Sum vanligt dømi um undir hvørjum umstøðum meirvirðisgjaldsfrítøka kann vera játtað, kann nevnast innflutningur hjá sjúkrahúsi av útgerð í førum, har útgerðin er givin sjúkrahúsinum sum gáva frá einum vælgerandi stovni ella felagsskapi. Meirvirðisgjalds-frítøkan er gjørd treytað av, at samsvarandi útgerð ikki verður framleidd her á landi.

**Til § 27, 8. stk.**
Sambært hesi reglu kann meirvirðisgjald av vørum, ið verða endurinnfluttar aftaná viðgerð, tilevning, pakking, umvæling ella reingerð í útlandi, roknast av útreiðslunum av gjørdari viðgerð v.m. íroknað toll og møgulig gjøld, ið skulu rindast við innflutning.

Meirvirðisgjald av innflutningi verður avroknað sambært reglunum í kap. 7 í tolllógini.

**§ 28. Landsstýrið kann áseta reglur um, at tann, sum í útlondum keypir avgjaldsskyldugar tænastur til at nýta her á landi, skal rinda 20% av samsýningini fyri viðkomandi tænastur.**

**Til § 28**
Sambært § 28 kann landsstyrið áseta reglur um, at tann, sum í útlandi keypir meirvirðisgjaldsskyldugar tænastur at nýta her á landi, skal gjalda meirvirðisgjald fyri umrøddu tænastur.

Tilíkar reglur verða ásettar í kunngerð um meirvirðisgjald av ávísum tænastum, ið verða seldar til útland ella keyptar í útlandi. Hetta er sama kunngerð, sum er umrødd undir viðmerkingum til § 12, 2. stk.

Reglurnar hava sum endamál at fastleggja latingarstaðið fyri fleiri ítøkiligar tænastur, soleiðis at tað verður tryggjað at meirvirðisgjald í øllum førum verður goldið við lating av tænastum yvir um landamørk.

Við keyp av meirvirðisgjaldsskyldugum tænastum í útlandi skal keyparin í ávísum førum gjalda meirvirðisgjald til landskassan. Hvørjar tænastur hetta er galdandi fyri verður nevnt í kunngerð.

**§ 1 í kunngerðini kemur at fevna um hesar tænastur:**

a. Heil ella lutfalslig avhending av upphavsrætti, patentrættindum, licensrættindum, rætti til vørumerki, felagsmerki og mynstur og av øðrum tílíkum rættindum.

b. Tænastur viðvíkjandi reklamu.

c. Tænastur frá ráðgevandi virksemi, verkfrøðingum, prosjekteringsvirksemi, advokatum og grannskoðarum og aðrar tílíkar tænastur; dátuviðgerð og upplýsing.

d. Tænastur frá vikarstovum.

e. Skylda til heilt ella lutfalsliga at lata vera við at reka vinnuligt virksemi ella at nýta eitt av teimum rættindum, ið eru nevnd í hesi grein.

f. Tænastur, ið verða gjørdar av millummonnum, sum handla í navni hjá øðrum og fyri rokning hjá øðrum, um so er at teirra virksemi viðvíkur lating av tílíkum tænastum, sum eru umrøddar í hesi grein.

g. útleiga av leysoyrafæ, undantikið flutningsfør av øllum sløgum.

**§ 2 í kunngerðini kemur at fevna um hesar tænastur**

a. Tænastuveitingar viðvíkjandi fastari ogn, ið er her á landi, herímillum tænastur frá ognarmeklara, ognarhandlara v.fl., og prosjekterings- og ráðgevandi tænastur.

b. Tiltøk v.m. innan ítrótt, undirhald, undirvísing, vísind v.m., um so er, at tiltøkini eru umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni, og tænastan veruliga verður gjørd her á landi.

c. Arbeiði gjørt á leysoyrafæ her á landi.

d. Serkøn virðismeting av leysoyrafæ her á landi, um so er, at virðismetingin er umfevnd av meirvirðisgjaldsskylduni.

Eitt útlendsk virki, ið her á landi selur tær tænastur, sum eru nevndar í kunngerðini § 2, skulu meirvirðisgjaldsskrásetast og rinda meirvirðisgjald, um sølan fer upp um 20.000 kr. árliga.

Tá ið metast skal, um keyparin skal rinda landskassanum meirvirðisgjald, verður munur gjørdur á, um keyparin er meirvirðisgjaldsskrásett virki ella ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki ella einstaklingur.

Við keyp av tænastum, ið eru nevndar í § § 1 og 2 í kunngerðini, skal skrásett virki ikki rinda meirvirðisgjald til landskassan, um virkið fult út kann rokna meirvirðisgjald av

samsvarandi keypi her á landi við í meirvirðisgjald av keypi.

Um virkið hevur lutfalsligan ella als ongan frádráttarrætt fyri tílík keyp, er virkið umfevnt av teimum reglum, ið eru galdandi fyri ikki meirvirðisgjaldsskrásett virki og einstaklingar.

Um virkið hevur lutfalsligan frádrattarrætt, kann tann parturin av meirvirðisgjaldi á keyptum tænastum, sum frádráttarrættur er fyri, roknast við í meirvirðisgjald av keypi í tí meirvirðisgjaldstíðarskeiði, tá ið meirvirðisgjald av keypinun skal fráboðast tollvaldinum.

Ikki skrásett virki og einstaklingar skulu rinda meirvirðisgjald av teimum í kunngerðini § 1 nevndu tænastum, ið verða keyptar frá virkjum uttan fyri Føroyar.

Keypir ikki skrásett virki ella einstaklingur tænastur av tí slagrum, ið er nevnt í kunngerðini § 2, skal meirvirðisgjald altíð rindast landskassanum.

Er útlendski seljarin eitt meirvirðisgjaldsskrásett virki her á landi, verður meirvirðisgjald goldið seljaranum í samband við keypið.

Meirvirðisgjald skal tó ikki gjaldast, um tænastan burturav verður nýtt uttan fyri Føroyar.

Tann, sum sambært reglunum, ið verða ásettar í kunngerð, skal gjalda meirvirðisgjald, skal gera hetta grundað á søluprísin fyri keyptu tænasturnar. Uppí samsýningina skulu roknast tær útreiðslur v.m., sum keyparin skal rinda seljaranum fyri at fáa tænasturnar latnar.

Viðvíkjandi edv-tænastum á disklum, ið verða innfluttir á teldu skal meirvirðisgjald rindast av allari samsýningini, tvs. bæði fyri diskil og tað, ið tað hevur kostað at gera skipanina.

Rindar keyparin við øðrum enn peningi (býtishandil), skal meirvirðisgjald rindast av einum virði, sum samsvarar við varliga søluprísin hjá útlendska seljaranum.

Eru felags áhugamál millum keypara og seljara, soleiðis, at báðir partar hava árín á virksemi hjá hvørjum øðrum, skal meirvirðið samsvara við tað virði, sum hevði verið galdandi, um eingi felags áhugamál vóru.

Tann, sum í útlondum keypir tænastu, ið meirvirðisgjald skal rindast av, skal áðrenn 8 dagar aftaná, at avtala er gjørd við lataran, boða tollvaldinum frá hesum.

Meirvirðisgjald verður goldið í samsvari við reglurnar í § 22. Tvs. tað skal vera goldið í seinasta lagi 25 dagar aftaná, at tænastan er innflutt.

## XI. EFTIRLITSREGLUR

**§ 29. Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild til at kanna høli, ið verða nýtt í samband við raksturin av skrásetingarskyldugum virkjum, og til at kanna vøru á goymslu, handilsbøkur og annað roknskapartilfar og brævaskifti v.m. hjá virkjunum.**
**2. stk. Handhavin og starvsfólkið á virkinum skulu veita Toll- og Skattstova Føroya neyðuga vegleiðing og hjálp, tá kanningar sum nevndar í 1. stk. verða gjørdar.**
**3. stk. Tilfarið, ið er nevnt í 1. stk., skal eftir áheitan frá Toll- og Skattstova Føroya latast ella sendast Toll- og Skattstova Føroya.**

**Til § 29**
Tollvaldið hevur rætt at gera eftirlit í hølum, ið verða nýtt í samband við rakstur av skrásetingarskyldugum virksemi, t.d. handils-, framleiðslu-, skrivstovu- og goymsluhøli.

Tollvaldið hevur harumframt loyvi at kanna vørugoymslu, handilsbøkur, annað roknskapartilfar og brævaskifti v.m. hjá virkjum.

Roknskapartilfar og brævaskifti v.m. hjá virkjum, skal, tá ið tollvaldið biður um tað, útflýggjast ella sendast tollvaldinum.

Rættur til eftirlit fevnir um alt roknskapartilfar, so sum ársroknskap, roknskaparbøkur, journalir, leysblaðabøkur við tilhoyrandi fylgiskjølum, kontokort og annað tílíkt. Harumframt fevnir hetta um kladdubøkur og aðrar hjálpibøkur, t.d. ordrabøkur, avtalubøkur, bíleggingarbøkur, goymslubøkur, arbeiðsseðlar, vikuseðlar og goymslueftirlitskort.

Ordrabøkur o.t. eru umfevndar av rætti til eftirlit, hóast tær ikki innihalda viðmerkingar um innkomnan pening.

Um virkið nýtir grannskoðanarprotokol, er hendan eisini umfevnd av rætti til eftirlit.

Í virkjum, ið nýta edv at føra roknskap, fevnir rættur til eftirlit eisini um skriv, ið lýsa skipanimar v. m. og magnetbond og aðrar dátuberar.

Orðingin "brævaskifti v.m." fevnir um einhvønn hátt av handilsbrævaskifti, so sum móttikin brøv og avrit av sendum brøvum og sáttmálar og aðrar skrivligar avtalur.

Eftirlit kann bert gerast í privatum íbúðum, tá loyvi er fingið frá handhavanum, ella tá ið rættarúrskurður er gjørdur hesum viðvíkjandi.

Handhavin á virkinum og teir persónar, ið arbeiða á virkinum, skulu veita tollvaldinum neyðuga vegleiðing og hjálp, tá ið eftirlit er.

Viðkomandi hava sostatt skyldu at geva frágreiðing um keypsviðurskifti, framleiðsluviðurskifti og søluviðurskifti og at geva upplýsing um, hvussu roknskapurin er lagdur til

rættis, hvørjar bøkur ið verða førdar, hvørjar innanhýsis eftirlitsskipanir eru osfr. Skylda er eisini at upplýsa, hvør ið er grannskoðari hjá virkinum.

Virkið hevur harumframt skyldu til, tá ið tollvaldið biður um tað, at gera upp vørugoymslu og kassapening.

Roknskapartilfar og brævaskifti v.m. hjá virkinum skal eftir áheitan frá tollvaldinum útflýggjast ella sendast tollvaldinum.

Skylda at útflýggja ella senda fevnir um alt roknskapartilfar v.m., sum er umfevnt av rætti til eftirlit, herímillum grannskoðanarprotokollin.

Skylda at útflýggja fevnir eisini um roknskapartilfar v.m., ið er hjá triðjamanni (t.d. grannskoðara ella roknskaparráðgeva). Hetta er galdandi, eisini um viðkomandi triðimaður hevur afturhaldsrætt yvir tilfari, t.d. orsakað av óuppgjørdum fíggjarligum viðurskiftum.

Skylda at útflýggja er bert galdandi fyri roknskapartilfar v.m. hjá virkinum. Tilfar, sum er gjørt ella fingið til vega av grannskoðara, og sum ikki hevur verið í ognarhaldi hjá virkinum, hevur virkið ikki skyldu at útflýggja.

Verður roknskapartilfari móttikið frá triðjamanni, fær hann tað aftur aftaná nýtslu.

**§ 30. Latarar til skrásetingarskyldug virki skulu eftir áheitan geva Toll- og Skattstova Føroya upplýsingar um teirra latingar av vørum og tænastum til hesi virki.**
**2. stk. Vinnurekandi skulu eftir áheitan geva Toll- og Skattstova Føroya upplýsingar um teirra keyp av vørum og tænastum til virkið.**
**3. stk. Peningastovnar, herímillum postgiroskrivstovan og advokatar og onnur, ið taka ímóti miðlum til umsiting ella sum vinnuliga læna út pening, skulu eftir áheitan geva Toll- og Skattstova Føroya eina og hvørja upplýsing um teirra búskaparligu viðurskifti við navnfest skrásetingarskyldug virki.**
**4. stk. Toll- og Skattstova Føroya hevur heimild til at kanna vøru á goymslu v.m. hjá virkjum, ið eru nevnd í 1. og 2. stk. og til at skoða sáttmálar v.m. hjá virkjum, ið fíggja skrásett virki.**

**Til § 30**
Tey, ið lata til skrásetingarskyldug virki, skulu eftir áheitan geva tollvaldinum upplýsing um latingar av vørum og tænastum til hesi virki.

Tollvaldið hevur rætt at gera eftirlit á viðkomandi virkjum, hóast hesi ikki eru skrásett.

Vinnurekandi skulu eftir áheitan geva tollvaldinum upplýsingar um keyp av vørum og tænastum til virkið.

Tollvaldið hevur rætt at gera eftirlit á viðkomandi virkjum.

Peningastovnar, herímillum postgirostovan, og advokatar og onnur, ið móttaka ognir, pening, o.a. til umsiting, ella sum vinnuliga lána út pening, skulu eftir áheitan geva tollvaldinum eina og hvørja upplýsing um teirra fíggjarligu viðurskifti við navnfest skrásetingarskyldug virki.

Upplýsingarskyldan fevnir um t.d. upplýsingar um broytingar í innskots- og lánikonti, um drignar og innsettar kekkar, um diskonteraðar vekslar og um støddina á lánum.

Tollvaldið hevur somuleiðis rætt at skoða sáttmálar v.m. hjá virkjum, ið fíggja skrásett virki.

**§ 31. Almennir myndugleikar skulu eftir áheitan geva Toll- og Sktattstovu Føroya eina og hvørja upplýsing til brúk fyri skráseting av virkjum og til eftirlits við gjalding ella afturgjalding av avgjaldinum.**
**2. stk. Løgreglan veitir Toll- og Skattstova Føroya hjálp sambært reglum, ið verða ásettar eftir samráðing millum landsstýrið og landfútan.**

**Til § 31**
Almennir myndugleikar hava skyldu til eftir áheitan at geva tollvaldinum eina og hvørja upplýsing at nýta við skráseting av virkjum og eftirliti við gjalding ella afturgjalding av meirvirðisgjaldi.

Líkningarráðið skal geva upplýsingar um viðurskifti av týdningi fyri eftirlit við meirvirðisgjaldi, sum teir verða varir við undir eftirlitið.

Henda regla gevur heimild at útbyggja eitt samarbeiði, ið eigur at vera millum tollvaldið og líkningarráðið.

Víst verður til § 38, 2. stk. har líkningarráðið somuleiðis kann fáa upplýsingar frá tollvaldinum.

Neyðugt verður í hesum sambandi at broyta § 151 í skattalógini og at orða hana á sama hátt sum § 38, 2. stk., soleiðis at tollvaldið ikki verður mett sum óviðkomandi.

Tollvaldið skal vitja og leiðbeina nýskrásett meirvirðisgjaldsskyldugt virki, um tollvaldið metir, at tørvur er á leiðbeining, ella um virkið biður um leiðbeining.

Leiðbeining til eitt virki fevnir um eina gjøgnumgongd av teimum meirvirðisgjaldsreglum, ið eru viðkomandi fyri virkið, og krøvumum ið standast av hesum til at leggja fram roknskap.

Roknskapareftirlit verður gjørt fyri at taka støðu til samlaðu framløguna av roknskapi og meirvirðisgjaldsavrokning hjá virkinum fyri eitt langt tíðarskeið.

Eftirlitið verður gjørt við at vitja virkið, og vanliga eigur ársroknskapurin at vera gjøgnumgingin fyri seinastu 4 árini, og roknskaparframløgan verður grannskoða fyri ein styttri ella longri part av hesum tíðarskeiði.

Eftirlitið kann eisini gerast á tann hátt, at virkið verður biðið um at senda inn ársroknskapirnar fyri 4 seinastu árini og fylgiskjøl fyri eitt av hesum árum til gjøgnumgongd hjá tollvaldinum.

Útgjaldingareftirlit verður gjøgnumført fyri at taka støðu til, um ein ítøkilig upphædd kann útgjaldast virkinum. Tílíkt eftirlit fer fram, tá ið virkið gevur upp eitt negativt avgjald. Útgjaldingareftirlit verður vanliga gjørt við at vitja virkið, áðrenn útgjalding fer fram.

Sovorðið eftirlit kannar bert ítøkilig viðurskifti, sum hava gjørt, at avgjaldið í einum tíðarskeiði er negativt.

Roknast má tí við, at hesi eftirlit verða tey, ið koma at krevja mest arbeiðsorku.

Sostatt kannar útgjaldingareftirlitið ikki, um vanliga meirvirðisgjaldsavrokningin hjá virkinum annars er røtt. Eitt seinni roknskapareftirlit fevnir tí møguliga eisini um tíðarskeiðið viðvíkjandi negativu meirvirðisgjaldsfráboðanini og undanfarin tíðarskeið, ið roknskapareftirlit er gjørt við.

**§ 32. Verður staðfest, at eitt virki hevur givið skeiva fráboðan sambært § 20, 1. stk., soleiðis at virki hevur goldið ov lítið avgjald ella fingið útgoldið ov nógv í endurrindan, verður skylduga upphæddin kravd frá virkinum til gjaldingar í seinasta lagi 14 dagar eftir kravið. Sama er galdandi, tá eitt virki ikki hevur latið uppgerðina inn, og tá fyribils ásetta avgjaldsskyldan sambært § 21, 3. stk., hevur verið ov lítil.**
**2. stk. Kann støddin á avgjaldsupphæddini, sum virkið skyldar, ikki gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum, kann Toll- og Skattstova Føroya gera eina metta áseting av avgjaldinum. Sama er galdandi, um eitt virki hevur fingið ov nógv í avgjaldsendurrindi og støddin av tí upphædd, sum virkið tí skal afturgjalda, ikki kann gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum. Avgerðin skal innihalda upplýsingar um møguleika at klaga sum nevnt í 3, stk.**
**3. stk. Ein avgerð sambært 2. stk. kann av einum virki leggjast fyri nevndina, sum er umrødd í § 35. Áheitan um at leggja fyri nevndina skal vera fráboðað Toll- og Skattstova Føroya í seinasta lagi 4 vikur aftan á, at virkið er kunnað um ásetingina.**
**4. stk. Verður avgjaldið ikki goldið rættstundis, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá 1. í tí mánaði, sum virkið skal gjalda upphæddina í, tó í minssta lagi 100 kr.**

**Til § 32**
Um eitt virki hevur givið órætta meirvirðisgjaldsfráboðan, soleiðis at virkið hevur goldið ov lítið meirvirðisgjald ella fingið ov nógv útgoldið í endurgjaldi, verður skylduga upphæddin uppkravd frá virkinum til gjaldingar í seinasta tagi 14 dagar aftaná, at kravt er.

Sama er galdandi, tá ið eitt virki ikki hevur sent inn meirvirðisgjaldsfráboðan, og tað meirvirðisgjald, sum tollvaldið sambært § 21, 3. stk. í meirvirðisgjaldslógini fyribils hevur ásett, hevur verið ov lágt.

Rætt meirvirðisgjald verður gjørt upp grundað á roknskapin hjá virkinum, í tann men hesin kann góðtakast sum uppgerðargrundarlag.

Kann roknskapurin hjá virkinum ikki metast at vera nóg gott grundadag fyri eini neyvari uppgerð av meirvirðisgjaldi, kann hetta ásetast út frá einari meting.

Um skylduga meirvirðisgjaldsupphæddin ikki verður goldin til tíðina, skal 1,5% gjaldast í mánaðarligari rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá 1. í tí mánaði, sum upphæddin skal gjaldast virkinum í, tó í minsta lagi kr. 100.

Sambært lóg nr. 274 frá 22. desember 1908 um fyrning av ávísum krøvum er ein 5 ára fyrningarfreist vanliga galdandi fyri skatta- og avgjaldskrøv.

Fyrningarfreistin fyri meirvirðisgjaldskrøv verður sum meginregla roknað frá tí degi, tá ið upphæddin kundi havt verið kravd goldin, um rætt hevði verið fráboðað, tvs. frá seinasta rætta gjaldingardegi.

Lóg nr. 274 frá 22 desember 1908 um fyrning av ávísum krøvum inniheldur í § 3 eina reglu um fyribils fráseting (suspensión) av fyrningini.

Henda regla kann nýtast í málum, har tollvaldið sambært einari ítøkiligari meting ikki hevur kunnað verið vitandi um kravið. Fyrningarfreistin verður í tílíkum førum ikki roknað, fyrr enn frá tí løtu tá viðurskiftið er staðfest, og kravið er gjørt upp.

Um tollvaldið er farið undir ella hevur ætlað at fara undir roknskapareftirlit, áðrenn fyrning hendi, men málið hevur varað langa tíð, orsakað av at virkið hevur seinkað málið (t.d. við ikki at vilja útflýggja roknskapartilfar ella hjálpa við eftirlit í virkinum), verður fyrningarfreistin longd við tí tíð, sum virkið hevur seinkað málið við.

Í førum har meirvirðisgjaldsundandráttur, sum er fyrnaður, er staðfestur, verða fyrnaðu upphæddirnar sundurgreinaðar.

Viðvíkjandi upphæddum, sum eru fyrnaðar, fellur eisini kravið um rentur burtur.

Í málum, sum viðvíkja meirvirðisgjaldsundandrátti, ið lutfalsliga er fyrnaður, ella um fyrning fer at gera seg galdandi meðan málið verður viðgjørt, skal tollvaldið syrgja fyri, at fyrningin verður avbrotin.

Fyrning kann m.a. avbrótast á tann hátt, at virkið letur inn eina eftiruppgerð, ella at panting verður framd av Føroya Gjaldstovu.

Setir eitt virki seg upp ímóti avgerð hjá tollvaldinum um støddina á meirvirðisgjaldi ella

um meirvirðisgjaldsskylduga virðið v.m. og vil hava avgerð inn fyri hægri fyrisitingarligt rættarstig, er kæran vanliga ikki útsetandi, hvat uppgerð hjá tollvaldinun og krevjing av undandrignum meirvirðisgjaldsupphæddum viðvíkur.

Í summum málum verður tað kortini ikki mett at vera rímiligt at fremja úttøku, fyrr enn nevndin sambært § 35 hevur tikið avgerð. Tað at skjóta málið inn til avgerð í nevndini, avbrýtir tó ikki fyrningarfreistina. Í tílíkum málum, tá ið virkið ikki vil geva eftiruppgerð, og tá ið tað má væntast frammanundan, at meirvirðisgjaldskravið heilt ella lutfalsliga verður fyrnað, áðrenn nevndin hevur tikið avgerð, kann virkið sleppa undan at fremja úttøku við skrivliga at siga frá sær møguleikan at kunna gera fyrningarmótmæli galdandi (avbrótingaráheitanin).

Tað at skjóta eina metta áseting inn fyri meirvirðisgjaldsnevndina, útsetir heldur ikki fyrnigarfreistina. Í tílíkum málum kann virkið eisini sleppa undan at gera úttøku við skrivliga at siga frá sær møguleikan at kanna gera fyrningarmótmæli galdandi.

Avbrótingaráheitan er bindandi fyri 1 ár frá tí degi, hon verður skrivað undir.

Kann støddin á meirvirðisgjaldi, sum eitt virki skal gjalda, ikki gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum, kann tollvaldið sambært § 32, 2. stk. gera eina metta áseting av meirvirðisgjaldinum. Sama er galdandi, um eitt virki hevur fingið ov nógv meirvirðisgjald endurrindað, og støddin á tí upphædd, sum virkið tí skal gjalda aftur, ikki kann gerast upp grundað á roknskapin hjá virkinum.

Tollvaldið hevur við hesum myndugleika til at gera mettar ásetingar.

Mettar ásetingar fevna um alt meirvirðisgjald hjá einum virki fyri viðkomandi tíðarskeið og ikki bert fyri tann partin av meirvirðisgjaldi, sum restaði í, tá ið fráboðað varð.

Virkið eigur at verða kallað til fundar hjá tollvaldinum um mettu ásetingina. Tó eigur áseting at vera gjørd, hóast virkið ikki kemur til fundar.

Virkið kann skjóta mettu ásetingina fyri meirvirðisgjaldsnevndina. Áheitan um hetta skal vera latin tollvaldinum í seinasta lagi 4 vikur aftaná, at virkið er kunnað um ásetingina.

Virkið kann fáa atgongd til munnliga at bera málið fram fyri meirvirðisgjaldsnevndina.

## XII. REVSIREGLUR

**§ 33. Við bót verður tann revsaður, ið við vilja ella av grovum ósketni:**
**a. Gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella ikki gevur upplýsingar at nýta til avgjaldseftirlitið ella eftirlit við útgjaldingum sambært § 24.**
**b. Brýtur § 5, 1. stk., 2 stk., 1. punktum, ella 5. stk., § 10, 3. stk., § 12, 6. stk., 2. punktum, § 13, 4. stk., 2. punktum, § 17, 1., 2., 5., 6., 9. ella 11., stk., § 18, 3. stk., § 19, § 20, 1. stk., § 29, 2. ella 3. stk, § 30, 1., 2. ella 3. stk.**

**c. Letur vera við at gera sum ásett í § 3, 2. stk., ella § 9, 1. stk.**
**d. Setir til viks treytir, sum eru ásettar sambært § 2, 4. og 5. stk., § 4, 2. stk. og § 12, 2. stk.**
**2. stk. Í fyriskipanum sambært hesi lóg kann revsing við bót áleggjast tí, sum við vilja ella av grovum ósketni brýtur reglurnar í fyriskipanunum.**
**3. stk. Tann, sum fremur eitt av nevndu brotum við vilja fyri at fáa avgjald útgoldið úr landskassanum sambært § 24, verður revsaður við bót, hefti ella fongsul upp til 2 ár.**
**4. stk. Fyri lógarbrot, sum verða framd av partafeløgum, lutafeløgum ella tílíkum, kann sektarábyrgd verða áløgd felagnum sum so.**

**Til § 33**
Tað er revsivert tilætlað ella av grovum ósketni at bróta reglur í meirvirðisgjaldslógini og teimum kunngerðum, ið verða settar í samband við meirvirðisgjaldslógina.

Tann ið brýtur lógina ella kunngerð við heimild í lógini kann revsast við sekt. Er lógarbrotið tilætlað fyri at sleppa undan at gjalda meirvirðisgjald til landskassan, kann revsingin hækka til hefti ella fongsul upp til 2 ár.

Verður lógarbrotið framt av partafelagi, lutafelagi ella tílíkum, kann sektarábyrgd áleggjast felagnum.

Tá ið tollvaldið tekur støðu til spurningin um skuld, verða vanligu reglurnar um tilætlan og ósketni nýttar.

Evnisligu revsireglurnar í meirvirðisgjaldslógini eru orðaðar sum ein vanlig revsiregla í § 33, 1, stk. punkt a, ið verður nýtt í førum, har tað innan lógarinnar øki eru givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella upplýsingar eru duldar. Undir hesa reglu koma m.a. meirvirðisgjaldsundandráttir orsakað av skeivum meirvirðisgjaldsfráboðanum.

Revsireglurnar eru harumframt í § 33, 1, stk. litra b, c, og d, í lógini orðaðar soleiðis, at tað nágreiniliga er tilskilað, hvørji onnur lógarbrot ið eru revsiverd.

**§ 5, 1. stk.:**
Skylda at boða frá virki til skrásetingar hjá tollvaldinum.

**§ 5, 2, stk. pkt. 1:**
Skylda at skráseta fleiri virki við sama løgfrøðiliga ella likamliga persóni sum eigara undir einum, um serstakur roknskapur ikki verður førdur fyri hvørt einstakt virki.

**§ 5, 5. stk.:**
Skylda at geva skrásetingarfráboðan í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn farið verður undir virksemi. Skylda at boða frá ognarskifti, leiðsluskifti ella flyting í seinasta lagi 8 dagar áðrenn broyting.

**§ 10, 3. stk.:**
Forboð móti at tilskila meirvirðisgjaldsupphædd ella tílíkt við sølu av brúktum bilum, ið gjalda meirvirðisgjald sambært § 10, 1. stk. ella § 10, 2. stk.

**§ 12, 5. stk. pkt. 2:**
Skylda at boða tollvaldinum frá sølu av vørugoymslu, maskinum og øðrum rakstrargøgnum, tá ið avhendingin fer fram sum liður í einari avhending av virkinum ella einum parti av hesum, í seinasta lagi 8 dagar aftaná avhendingina.

**§ 13, 4. stk. pkt. 2:**
Skylda at útflýggja faktura við lating av vørum í søluumboði ella umboðssølu (kommissión ella konsignatión).

**§ 17, 1.stk.:**
Krav til útsjónd og innihald á faktum við sølu av vørum og tænastum.

**§ 17, 2. stk.:**
Skylda at útflýggja kreditnotu m.a. við aftursending av vørum.

**§ 17, 5. stk.:**
Skylda hjá latara at goyma fakturaavrit v.m.

**§ 17, 6. stk.:**
Skylda at býta sundur faktura, ið fevnir um meirvirðisgjaldsskyldugar og ikki meirvirðisgjaldsskyldugar vørur og tænastur.

**§ 17, 9. stk.:**
Forboð móti at ikki skrásett virki tilskila meirvirðisgjaldsupphædd á faktura og skylda at afturgjalda meirvirðisgjald, ið er móttikið av órættum.

**§ 17, 11. stk.:**
Skylda til við prísáseting at geva til kennar, um prísurin ikki inniheldur meirvirðisgjald. §

**18, 3. stk.:**
Skylda at føra meirvirðisgjaldsroknskap í roknskaparhefti frá tollvaldinum, um vanligur handilsroknskapur ikki verður førdur.

**§ 19:**
Skylda at goyma roknskapartilfar í 5 ár eftir endan á roknskaparárinum og skylda til árliga at gera goymsluuppgerð.

**§ 20, 1. stk.:**
Skylda at boða frá inn- og útgangandi meirvirðisgjaldi í seinasta lagi 25 dagar aftaná endan á hvørjum meirvirðisgjaldstíðarskeiði.

**§ 29, 2. stk.:**

Skylda at veita tollvaldinum neyðuga hjálp og leiðbeining við eftirlit ella kanning.

**§ 29, 3. stk.:**
Skylda at lata ella senda tollvaldinum roknskapartilfar v.m.

**§ 30, 1. stk.:**
Skylda at geva upplýsingar um latingar til skrásetingarskyldug virki.

**§ 30, 2. stk.:**
Skylda at upplýsa um keyp av vørum og tænastum til virkið.

**§ 30, 3. stk.:**
Skylda hjá peningastovnum, advokatum og øðrum, ið reka lánivirksemi ella ognarmekling, til at geva upplýsingar um fíggjarlig viðurskifti við navnfest skrásetingarskyldug virki.

**Til § 33, 1. stk. e.**
Fylgjur av ikki at halda fyriskipanir sambært § 3, 2. stk. um meirvirðisgjaldsskyldu fyri vørur og tænastur, sum verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum.

Fylgjur av ikki at halda fyriskipanir sambært § 9, 1. stk. um áseting av meirvirðisgjaldsskyldugum virði við handil millum virki, ið hava felags áhugamál.

**Til § 33, 1. stk. d.**
Brot á fyriskipanir sambært § 2, 4. og 5. stk. um undantøk av meirvirðisgjaldsskyldu og brot á fyriskipanir fyri loyvi til meirvirðisgjaldsfrítøku í samband við vælgerandi og almannagagnlig tiltøk.

Brot á fyriskipanir viðvíkjandi meirvirðisgjaldsfrítøku sambært § 4, 2, stk. og brot á fyriskipanir viðvíkjandi meirvirðisgjaldsfrítøku sambært § 12, 2. stk. fyri tænastur, ið verða gjørdar fyri útlendska rokning.

**Til § 33, 2. stk.**
Sambært § 33, verða fleiri kunngerðir settar, við heimild í lógini, ið áseta revsing við sekt fyri tilætlað brot ella brot av grovum ósketni á kunngerðirnar.

Um eitt av nevndu lógarbrotum er gjørt fyri tilætlað at sleppa undan at gjalda landskassanum meirvirðisgjald, er sambært § 33, 3. stk. møguleiki fyri at revsa við fongsulsrevsing.

Tá ið talan er um serliga grov brot á meirvirðisgjaldslógina kann ákæra eisini verða reist sambært § 279 í revsilógini (fíggjarsvik).

Í førum har brot verður gjørt av partafeløgum, lutafelogum ella tílíkum, er í § 33, 4, stk. í lógini, heimild at áleggja felagnum sum so sektarábyrgd.

**§ 34. Verður lógarbrot mett ikki at føra strangari revsing við sær enn bót, kann Toll- og Skattstova Føroya kunna viðkomandi um, at sakin kann verða avgjørd uttan rættarsókn, um hann viðgongur seg sekan í lógarbrotinum og váttar seg til reiðar innan fyri eina nærri ásetta freist at gjalda eina bót.**
**2. stk. Viðvíkjandi kunningini, sum er nevnd í 1. stk., koma reglurnar í rættargangslógini um innihald av ákæruriti í løgreglumálum í nýtslu samsvarandi.**
**3. stk. Verður bótin goldin rættstundis, ella verður hon sambært avgerð innheintað ella avsitin, fellur víðari rættarsókn burtur.**
**4. stk. Tá sakarmál um lógarbrot nevnd í § 33 verða løgd fyri rættin, verða tey viðgjørd sum løgreglumál. Rættarráðini í rættargangslógini kapittul 72 og 73 kunnu nýtast í sama mun sum í ríkisadvokatmálum.**

**Til § 34**
Sambært § 34 í meirvirðisgjaldslógini kann tollvaldið, tá ið eitt lógarbrot ikki verður mett at fara við sær strangari revsing enn sekt, kunna viðkomandi um, at málið kann verða avgjørt uttan rættarsókn, um hann játtar seg sekan í lógarbrotinum og játtar at gjalda eina í fráboðanini ásetta bót innan eina nærri ásetta freist.

Fráboðanin verður nevnd sektaruppskot og verður givin viðkomandi skrivliga.

Verður bótin goldin innan ásettu freistina, ella játtar viðkomandi skrivliga innan somu freist yvir fyri tollvaldinum at vilja gjalda bótina, fellur víðari rættarsókn burtur.

Verður bótin ikki goldin ella viðtikin, verður málið sent til avgerðar í rættinum. Sama hendir, tá ið tollvaldið metir, at viðkomandi, hvat støddini á og umstøðunum í málinum viðvíkur, eigur at verða fongsulsrevsaður, ella at málið annars eigur at verða avgjørt í rættinum.

Flest øll brot á meirvirðisgjaldslógina verða í øðrum londum avgjørd fyrisitingarliga við sektaruppskoti. Fyritreytin fyri, at eitt mál kann avgerast fyrisitingarliga, eigur at vera, at tað ikki verður mett, at lógarbrotið, um tað verður skotið fyri dómstólin, kemur at føra við sær fongsulsrevsing.

Áseting av sektarstøddini er fyri ein part latin upp í hendumar á tollvaldinum, sum tann myndugleiki, ið umsitir meirvirðisgjaldslógini, og fyri ein part upp til rættin. Tá ið avgerast skal í lógarbrotsmálum er sum meginregla neyðugt at áseta sektirnar í samsvari við reglurnar í kap. 10 í revsilógini um revsiáseting.

Sambært § 80 í revsilógini skal revsiáseting gerast við atliti til, hvussu grovt lógarbrotið er, og við atliti til upplýsingar um brotsgerðarmannin, herímillum um harsara vanligu persónligu og samfelagsligu viðurskifti, harsara viðurskifti áðrenn og aftaná brotsgerðina og orsøk harsara til at gera hetta.

Áseting av, hvussu stór sektin skal vera, skal harumframt, innan tey mark, sum atliti til lógarbrotið og tær í § 80 nevndu umstøður annars áseta, gerast við serligum atliti til

gjaldsføri hjá viðkomandi, javnber § 51, 3. stk. í revsilógini.

Tann sektarvenja (praksis), ið verður nýtt í málum um brot á meirvirðisgjaldslógina, verður tó, í stóran mun uppbygd sum vanlig sektarskipan, m.a. við atliti til, hvussu nógv mál eru, og hvussu nógv avgerðirnar líkjast. Hetta merkir, at viðvíkjandi brotum, sum koma ofta fyri, verður sekt áløgd eftir støddini á tí upphædd, sum viðkomandi hevur sloppið sær undan.

Tá ið avgerast skal, um talan er um grovt ósketni ella tilætlan, eru m.a. hesar umstøður av týdningi:

- Serligur misjavni millum tað, ið er givið upp, og veruligu meirvirðisgjaldsupphæddina.
- Vantandi skráseting av sølu v. m.
- Tað at sleppa sær undan at føra meirvirðisgjaldsroknskap. Grovt óskil í roknskapinum annars.
- Vantandi vilji at laga seg eftir reglum og ávísingum.

Eru linnandi umstøður í einum ítøkiligum máli, kann frávik verða gjørt frá vanligu sektini, soleiðis at sektin verður lækkað, alt eftir hvussu serligu umstøðurnar eru háttaðar.

Vanliga sektin verður t.d. lækkað, um talan er um lógarbrot á serliga fløkjasligum økjum í lógini.

Boðar tann, sum hevur sloppið sær undan at gjalda meirvirðisgjald, sjálvur frá hesum, eigur málið sum meginregla at veta avgjørt uttan sekt.

Hetta fevnir um tilburðir, tá ið eitt virki sjálvt ella advokatur/grannskoðari vegna virkið vendir sær til tollvaldið við áheitan um at rætta eitt mistak.

Henda sjálvfráboðan fevnir eisini um tilburðir, tá ið virkið sjálvt hevur rættað mistakið og tekur upphæddina við í einari seinni avgjaldsuppgerð, ella tá ið tað verður staðfest, at virkið, áðrenn farið verður undir eftirlit, sjálvboðið er farið í holt við grannskoðan av roknskapinum við tí fyri eyga at rætta mistak í roknskapinum. Í seinast nevnda føri er tað tó samstundis ein treyt, at tað verður mett, at líkt var til, at virkið sjálvt, tá ið grannskoðanin varð liðug, fór at boða tollvaldinum frá staðfestum mistøkum ella fór at rætta upphæddirnar í einari seinni avgjaldsuppgerð.

## XIII. AÐRAR REGLUR

**§ 35. Landsstýrið setir eina nevnd við 3 limum, ið hava fjølbroyttan kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti.**
**2. stk. Í minsta lagi ein av limunum í nevndin skal vera løgfrøðingur og ikki hava sítt dagliga yrki hjá tí almenna, og verður hesin, ella eru teir fleiri, ein av hesum, formaður í nevndin.**

**3. stk. Við viðgerð av málum, ið sambært nevndarinnar metan krevja serligan starvsgreinaligan, tøknifrøðiligan ella handilsligan kunnleika, kann nevndin boðsenda kønum ráðgevum.**
**4. stk. Nevndin hevur endaliga fyrisitingarliga avgerð um:**
**a. Spurningar um vavið á avgjaldsskylduni.**
**b. Spurningar um avgjaldsskylduga virðið.**
**c. Spurningar um vavið á frítøkuni, sum er nevnd í § 12, 1. stk., punkt f og h, og § 27, 4. og 5. stk.**
**d. Spurningar sambært § 15, 3. stk. og § 16, 3. stk. viðvíkjandi inngangandi avgjaldi.**
**e. Spurningar um, hvat ið er alment veitingarvirki sambært § 3, 1. stk., punkt c.**
**f. Klagur um tær ásetingar, ið sambært § 32, 2. stk. verða gjørdar eftir meting av Toll- og Skattstova Føroya.**
**5. stk. Tann, sum hevur biðið nevndina um eina avgerð, kann eftir áheitan fáa atgongd til munnliga at framleggja málið fyri nevndina. Í sovorðnum førum skal umboð fyri Toll- og Skattstova Føroya eisini hava henda møguleika.**
**6. stk. Starvsskipanin hjá nevndin og reglur um kunngerð av avgerðum, ið nevndin tekur, verða ásettar av landsstýrinum.**

**Til § 35.**
Royndir frá grannalondum vísa, at ein ávís fyrisiting stendst av at viðgera kærur, ið fyrisitingin hevur tikið í samband við fyrisitingina av meirvirðisgjaldinum. Fleiri undantøk ið verða gjørd frá meirvirðisgjaldsskylduni, størri verður fyrisitingin.

Neyðugt verður tí at seta eina nevnd, sum skal viðgera avgerðimar hjá tollvaldinum sambært meirvirðisgjaldslógini.

Fyri at spara umsiting, og tí at meirvirðisgjaldsskipanin er ein partur av toll- og avgjaldsskipanini, ið má síggjast sum ein heild, ið setir ávís krøv til detailkunnleika, samfelagsviðurskifti og fyrisiting annars, er uppskot landsstýrisins, at nevndin verður tann sama sum tann, ið skal viðgera kærur sambært tolllógini.

Skotið verður harnæst upp, at nevndin í førum, tá ið neyðugt er við sakkønari hjálp, kann boðsenda kønum ráðgevum. Hesir hava tó ongan avgerðarrætt.

Nevndin hevur endaligan avgerðarrætt innan fyrisitingina í málum, ið eru nevnd lógini § 35, 4. stk.

Nærri reglur um starvsskipanina hjá nevndini og reglur um kunngerð av avgerðum, ið nevndin tekur, verða ásettar í kunngerð.

**§ 36. Landsstýrið ásetir reglur um endurrindan av avgjaldi, sum útlendsk virki hava goldið við keyp, tilevning v.m., goymslu ella við flutning av vørum, ið verða útfluttar til útlond.**

**Til § 36**
Reglurnar um at søla til útflutnings kann haldast uttanfyri avgjaldsskyldugu søluna kann ikki nýtast, tá ið eitt útlendskt virki keypir og fær vøruna her í landinum og útflytir hana sjálvt.

Fyri ikki at gera mun á hesum, í mun til tá ið eitt virki selur beinleiðis til eitt útlendskt virki, verða reglur ásettar í kunngerð um, at útlendsk virki, ið vinnuligt keypa vørur her á landi og útflyta tær sjálvi, kunnu fáa endurrindað tað faktureraða avgjaldið.

Ferðagáðsreglurnar og reglurnar um útflutning av tænastum eru umrøddar undir viðmerkingunum til § 12, 2. stk.

**§ 37. Avgjald sambært hesi lóg fer í landskassan.**

**Til § 37**
Til hesa grein er at viðmerkja, at seinastu tíðina hevur nógv verið skrivað um tap landskassans orsakað av tollkrediti, og spurningurin hevur verið: Hvussu kann landskassin tryggja sær at sleppa undan ella at avmarka tapið?

Tað seinasta landsstýrið gjørdi í hesum sambandi var at broyta tollkreditkunngerðina í juni mánaði í 1991, soleiðis at vørumóttakarar skulu seta trygd, ið ongantíð má vera minni enn 100.000 kr. Hetta hevur gjørt, at í dag eru bert umleið 100 viðskiftafólk skrásett í tollkreditinum.

Av tí at meirvirðisgjaldið kemur í staðin fyri innflutningsgjaldið, verður neyðugt at hava eina kreditskipan við innflutning. Ætlan landsstýrisins er tí, at kreditskipanin við innflutning sum ásett í kunngerðini um tollkredit verður galdandi í meirvirðisgjaldinum.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 27, 1. stk.

Eitt av teimum málum, ið eru umrødd í samband við meirvirðisgjald, er royndirnar frá øðrum londum, ið vísa, at ríkiskassarnir í samband við meirvirðisgjaldið, hava havi stór tap av virkjum, ið ikki avrokna meirvirðisgjald til statskassan. Spurningurin er, hvussu man kann loysa henda trupulleika.

Tað hevur ikki verið vanligt, at tað almenna á sama hátt sum privatar fyritøkur avsetir móti tapi, men royndirnar bæði her á landi og í øðrum londum prógva, at núgaldandi eftirstøðupolitikkur ikki megnar at loysa trupulleikan við at eftirstøðumar hjá tí almenna verða alt størri ár eftir ári. Í Danmørk t.d. eru eftirstøðumar hjá tí almenna 24 mia kr.

Landsstýrið hevur kannað ymiskar møguleikar fyri at loysa henda trupulleika og kann

upplýsa, at í Íslandi verða virki, ið ikki avrokna meirvirðisgjald til ríkiskassan, stongd, til meirvirðisgjaldið er goldið, ella til virkið er "avviklað". Í Danmørk verður roynt at innkrevja meirvirðisgjald á vanligan hátt, tvs. verður ikki goldið, skal revsirenta gjaldast, og málið verður gjørt til eitt eftirstøðumál, úttøka verður gjørd grundað á avgerðirnar hjá tollvaldinum.

Felags fyri hesar báðar skipanir, ta donsku og ta íslendsku, er, at tær ikki virka fyribyrgjandi. Tað verður ikki farið til verka, fyrr enn skaðin er hendur, og tá er tað næstan altíð ómøguligt at fáa peningin inn.

Ein loysn, ið hevur verið havd á lofti undir viðgerðini av uppskotinum, er ein akontoskipan, ið virkar soleiðis, at øll virki, ið eru skrásett, gjalda eitt ávíst akontogjald hvønn mánað. Hetta akontogjald verður roknað út sambært lønarútreiðslunum hjá virkinum og kann afturhaldast sambært skattaskipanini. Tá ið so virkið ger upp meirvirðisgjaldsskyldugu søluna fyri eitt avgjaldstíðarskeið, verður ein uppgerð fram av akonto inngjaldingini gjørd. Fyrimunurin við hesari skipan er, at hon virkar fyribyrgjandi. Virkini hava áhuga í at koma og avrokna meirvirðisgjald við landskassan, av tí at tey longu hava goldið akonto gjald og hava bundnan pening í landskassanum.

Vansin við hesari skipan er, at virki, sum hava stórar lønarútreiðslur, binda stórar upphæddir í landskassanum. Hetta gongur út yvir likviditetin og kappingarføri hjá virkinum. Spurningurin er eisini, um tílík skipan, um hon hevur verið sett í gildi, bert skuldi verið galdandi fyri meirvirðisgjald, ella um ein totalloysn skuldi verið vald, ið eisini skuldi verið galdandi fyri partafelagsskattin. Eisini hetta gongur út yvir likviditetin hjá virkinum.

Ein annar vansi er, at tað krevur eina stóra fyrisiting at hava eftirlit við akonto gjaldinum og at avrokna tað, hvørja ferð tá ið meirvirðisgjaldið skal gerast upp.

Ein annar møguleiki er tann, ið eisini var umhugsaður, tá ið tolllógin varð gjørd, og sum Danmørk hevur royndir frá viðvíkjandi innflutningstollkreditinum. Skipanin er tann, at tey virki, ið eru skrásett í skránni, og sum eru meirvirðisgjaldsskyldug, skulu gjalda eina ávísa upphædd av hvørjum gjaldi í ein grunn. Hesin grunnurin verður solidariskur, skilt á tann hátt at hevur landskassin eitt staðfest tap av einum av teimum virkjunum, kann landskassin fara í henda grunn og fáa upphæddirnar goldnar.

Kravið er sjálvsagt, at alt er gjørt, ið gerast kann, áðrenn farið verður í grunnin. Neyðugt verður tí at gera eina lóg um at seta á stovn tílíkan grunn og í hesari lóg nágreiniliga at áseta reglur um, nær landskassin kann fáa hesi tap rindað.

Eitt gjald í henda grunn gongur sjálvsagt eisini út yvir likviditetin hjá virkinum, men í og við at gjaldið verður treytað av meirvirðisgjaldsavrokningini, kemur tað ikki at ganga út yvir kappingarføri hjá virkjum, ið útflyta, av tí at meirvirðisgjald ikki verður rindað av útflutningi.

Grunnurin er eisini lættur at umsita, av tí at inngjalding í grunnin verður gjørd saman við

meirvirðisgjaldinum.

Sambært búskaparligu viðmerkingunum verður inntøka landskassans av meirvirðisgjaldi í 1993 umleið 558 mio. kr.

Verður gjaldið sett til ½ % koma sostatt kr. 2,79 mió. í grunn í 1993.

Vísir tað seg eftir eina tíð, at upphæddir er ov stór, eigur at bera til at seta upphæddina niður.

**§ 40. Virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, og sum hava uppgjørt goymsluna pr. 31. december 1992, og sum hava sent inn uppgerðina áðrenn 1. februar 1993, fáa 100% av innflutningsgjaldinum sambært løgtingslóg nr. 119 frá 23. desember 1991 um innflutningsgjald, ið er goldið fyri vørur, ið eru innfluttar til víðari sølu, og sum ikki eru seldar áðrenn 1, januar 1993, endurgoldið í 1993.**
**2. stk. Innflutningsgjaldið sambært hesi grein verður endurgoldið í mun til bókførda skattliga virðið á vørugoymsluni og verður útgoldið í 3 pørtum í samsvari við avrokningartíðarskeiðið sambært § 20, fyrstu ferð í samband við annað avrokningartíðarskeið í 1993.**
**3. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um krøv, ið skulu lúkast, áðrenn afturrindan sambært hesi grein verður framd.**
**4. stk. Í kunngerð sett sambært 3, stk. kann landsstýrið áseta, at vørugoymslan skal gerast upp sambært skattligu reglunum um uppgerð av vørugoymslu, og at uppgerðin skal váttast av løggildum ella skrásettum grannskoðara.**

**Til § 40**
Í samband við at lóg um meirvirðisgjald verður sett í gildi 1. januar 1993, koma nøkur virki, ið skulu rinda meirvirðisgjald, at hava eina goymslu, ið innflutningsgjald er rindað fyri, orsakað av at vørurnar eru innfluttar áðrenn 1. januar 1993.

Fyri at hesi virki ikki skulu koma at rinda meirvirðisgjald av innflutningsgjaldinum, er ásett ein regla í § 40 um, at virki, ið eru skrásetingarskyldug sambært hesi lóg, og sum hava uppgjørt goymsluna pr. 31. desember áðrenn 1. februar 1993, kunnu fáa 80% av innflutningsgjaldinum sambært løgtingslóg nr. 119 frá 23. desember 1991 endurgoldið í 5 pørtum í 1993, fyrstu ferð í samband við annað avrokningartiðarskeið í 1993, tað er aftaná 15. mai 1993.

Endurgjaldið fylgir avrokningartíðarskeiðinum sambært § 20 og er treytað av at:

1) Virkið hevur goldið innflutningsgjaldið í 1992.
2) Vøran er innflutt til víðari sølu.
3) Vøran ikki er seld í 1992.

Íløgu- og rakstrargøgn koma ikki undir hess reglu.

Viðvíkjandi rakstri og íløgugøgnum kann vísast til reglurnar, ið vórðu gjørdar í tollskip-

anini, sum kom í gildi 1. februar 1992, har landsstýrið í samráð við ídnaðarfelagið fann fram til, at ávísar vørur, sum fara at kunna dragast frá í meirvirðisgjaldsskipanini í 1993, skuldu fáa lægri toll sambært tollskipanini, ið kom í gildi 1. januar 1992.

Hetta var gjørt út frá tí at mett varð, at annars fóru allar íløgur (investeringar) at steðga í 1992. Tað er sostatt eingin orsøk til at gera serligar reglur hesum viðvíkjandi.

Eftir at nýggja tollskipanin kom í gildi 1, februar 1992, hevur borið til at gera upp, hvussu stórur partur av teimum óbeinleiðis inntøkunum ið er innflutningsgjald.

Út frá gongdini í februar, mars og apríl er realistiskt at rokna við, at inntøka landskassans av innflutningsgjaldinum er kr. 19 mio. um mánaðin, ella kr. 228 mió. í 1992.

Verður roknað við at 3/4 av hesum vørum eru seldar í 1992, verður talan um at endurrinda 80% av kr. 57 mió. ella kr. 45,6 mió.